**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um størv og embæti í fólkakirkjuni**

## Kapittul 1

## Sóknarprestur

*Førleikakrøv*

**§ 1**. Sóknarprestur er limur í fólkakirkjuni og hevur embætisprógv í gudfrøði frá lærdum háskúla.
*Stk. 2*. Sum embætisprógv í gudfrøði er í hesi lóg at skilja útbúgving á vísindaligum grundarlagi, cand. theol. ella bachelor og master í gudfrøði, og yrkisútbúgving sum prestur. Embætisprógvið skal í minsta lagi vera á 300 ECTS námsstig. Kravdar lærugreinar eru:
1) Amboðslærugreinarnar: hebraiskt, grikskt, latín, heimspeki og vísindaástøði, til samans í minsta lagi 80 ECTS námsstig, sum greiniligari ásett í kunngerð.
2) Klassiskar gudfrøðilærugreinar: gamla testamenti, nýggja testamenti, trúarlæra, harundir luthersku játtanarritini, siðalæra og trúarheimspeki, kirkjusøga við nøktandi denti á lutherska kirkjusøgu, og praktisk gudfrøði, til samans í minsta lagi 150 ECTS námsstig, tó kortini við denti á einstøku lærugreinarnar, sum ásett í kunngerð.
3) Yrkisútbúgving til at virka sum prestur við evangeliskt lutherska kirkju.

*Stk. 3*. Vikið verður frá krøvunum eftir seinna liði í stk. 1, eftir stk. 2 og eftir § 2, stk. 1 fyri tann, ið verður kallaður eftir tilgongdini í § 14 (kirkjuliðið kjósar sær prest), um biskupur mælir til hetta.
*Stk. 4*. Biskupur kann við loyvi frá landsstýrismanninum gera frávik frá førleikakrøvunum eftir seinna liði í stk. 1 og eftir stk. 2, um umsøkjari, sum er komin í starv við fráviki frá fakligu førleikakrøvunum, sbr. stk. 3, hevur minst 10 ára starvsroyndir sum sóknarprestur í Føroyum.
*Stk. 5*. Biskupur kann eftir samráð við kirkjuráðini gera frávik frá førleikakrøvunum eftir fyrra liði í stk. 1 og eftir stk. 2, tá hann, sbr. § 9, stk. 4, landsstýrismansins vegna skipar prest úr limakirkju í lutherska heimssamfelagnum í tíðaravmarkað sóknarprestaembæti í upp til 3 mánaðir.

**§ 2**. . Tann, ið ikki hevur tikið lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu, sum galda í fólkakirkjuni í Føroyum, áðrenn hann søkir embæti fyrstu ferð, hevur embætisskyldu at taka tey, áðrenn 2 ára starvstíð er lokin.
*Stk. 2*. Tann, ið tekur við føstum starvi fyrstu ferð, og sum ikki hevur føroyskt sum móðurmál, skal í verki vísa, at hann skilir føroyskt, og skal innan 2 ár frá starvssetanardegnum prógva, at hann í hóskandi mun er førur fyri at orðbera seg skilliga á føroyskum.

**§ 3**. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð
1) greiniligari krøv til einstøku amboðslærugreinarnar, sbr. § 1, stk. 2, 1. pkt.
2) greiniligari krøv til einstøku klassisku gudfrøðilærugreinarnar, sbr. § 1, stk. 2, 2. pkt.
3) eftir tilmæli biskups reglur um, hvussu eftirútbúgvingin verður skipað, og um hvussu hetta, at taka eftirútbúgving fyrstu árini eftir starvssetan, verður sett sum treyt fyri at verða settur í starv.

*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir, eftir ráðføring við biskup og samráðing við prestafelagið, í kunngerð, hvussu lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu, sum galda í fólkakirkjuni í Føroyum, sbr. § 2, stk. 1, verður skipað.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin kann, eftir ummæli frá biskupi og prestafelagnum, áseta í kunngerð, at gudfrøðiútbúgvingar av lærdum háskúlum í Danmark, Íslandi og Noregi verða viðurkendar at geva førleika til at søkja sóknarprestaembæti uttan viðgerð í nevndini eftir § 4. Somuleiðis ásetir landsstýrismaðurin treytir um:

1) At gudfrøðiútbúgvingin saman við yrkisútbúgving sum prestur er viðurkend sum førleikaveitandi til sóknarprestaembæti í fólkakirkjuni í viðkomandi landi,
2) at viðkomandi gudfrøðingur hevur kravdu yrkisútbúgvingina sum prestur
3) at gudfrøðiútbúgvingin fevnir um allar lærugreinarnar, nevndar í § 1, stk. 2, nr. 1 og 2, og
4) at ávísar lærugreinar í minsta lagi eru á ávísum støði.

*Nevnd at meta um førleikastøði*

**§ 4**. Landsstýrismaðurin setur nevnd at gera meting um førleikastøði hjá umsøkjara, sbr. § 1, stk. 2, og góðkenna embætisprógv. Í nevndini sita ein prestlærdur føroyingur eftir uppskoti frá prestafelagnum, og tvey umboð við granskingarførleika í gudfrøði av norðurlendskum universiteti eftir uppskoti frá Fróðskaparsetri Føroya.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir greiniligari reglur um, hvussu nevndin verður mannað, og um virksemi og skrivstovu nevndarinnar.

**§ 5**. Nevndin viðger eftir áheitan frá biskupi embætisprógv ella lesiætlan og váttan um lestraravrik higartil hjá gudfrøðingi ella gudfrøðilesandi, ið hevur í umbúna at søkja sóknarprestaembæti. Niðurstøðan í viðgerðini er ein góðkenning um, at eitt embætisprógv lýkur førleikakrøvini eftir § 1, stk. 2, ella eitt tilmæli um, hvat vantar í útbúgvingini, til tess at lúka hesi krøv. Metingin er endalig innan fyrisitingina.

*Vegleiðing*

**§ 6**. Biskupur vegleiðir og ráðgevur gudfrøðilesandi og gudfrøðingum, sum hava í umbúna at søkja sóknarprestaembæti.

*Próvhoyring hjá biskupi*

**§ 7**. Gudfrøðingur, ið lýkur førleikakrøvini sbr. § 1, stk. 1 og 2, ella sbr. § 3, stk. 1 og 3, og hevur í umbúna at søkja kall, skal til próvhoyringar hjá biskupi.
*Stk. 2*. Tann, ið stendur til at taka við kalli fyrstu ferð eftir mannagongdini í § 14, skal hava verið til próvhoyring, áðrenn biskupur, við heimild í § 1, stk. 3, mælir landsstýrismanninum til at víkja frá førleikakrøvunum, sbr. § 1, stk. 2, og at seta viðkomandi í embæti.
*Stk. 3*. Biskupur kann víkja frá próvhoyringini, um umsøkjari hevur verið í embæti sum sóknarprestur, ella áður hevur staðið próvhoyring hjá biskupi.

**§ 8**. Í próvhoyringini tryggjar biskupur sær, at tann, sum hevur í umbúna at søkja sóknarprestaembæti, hevur fakligu og verkligu fortreytirnar fyri at røkja embætið, hevur átrúnaðarligu og menniskjaligu fortreytirnar fyri at kunna virka sum sóknarprestur millum fólk, og kann fremja boðanina í samljóði við læru fólkakirkjunnar.

*Stk. 2*. Biskupur fær í próvhoyringini munnliga og skrivliga váttan fyri, at umsøkjarin hoyrir til fólkakirkjuna, tekur undir við lærugrundarlagi hennara, og at hann vil geva prestlyfti fólkakirkjunnar.
*Stk. 3*. Eftir próvhoyringina skrivar biskupur niðurstøðuskjal. Í niðurstøðuskjalinum tekur biskupur støðu til, um hann við støði í próvhoyringini fer at kunna geva umsøkjaranum kallsbræv. Viðkomandi, sum hevur verið til próvhoyring, fær eintak av niðurstøðuskjalinum. Niðurstøðuskjalið og upplýsingar í sambandi við próvhoyringina eru ikki fevnd av rættinum til alment innlit eftir øðrum kapitli í Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina.

*Embæti*

**§ 9**. Landsstýrismaðurin skipar embæti eftir tilmæli biskups.
*Stk. 2*. Biskupur lýsir hesi embæti leys alment:
1) sóknarprestur í føstum starvi,
2) fyribils settur sóknarprestur,
3) prestur í tænastu hjá føroyingum uttanlands
4) prestur til at røkja serliga uppgávu innlendis
5) próstur.

*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin tekur eftir tilmæli biskups støðu til, um starv eftir stk. 2, nr. 1 ikki skal verða lýst leyst sum tænastumannastarv, og um starv eftir stk. 2, nr. 2-4 skal verða lýst leyst sum tænastumannastarv.
*Stk. 4*. Í serligum føri kann biskupur landsstýrismansins vegna skipa sóknarprest í tíðaravmarkað starv upp til 6 mánaðir, uttan at starvið frammanundan er lýst leyst. Biskupur ráðførir seg við kirkjuráðini, men kirkjuráðini eru ikki partur í setanartilgongdini í slíkum føri.
*Stk. 5*. Er tann, sum biskupur hevur í umbúna at skipa í tíðaravmarkað starv upp til 6 mánaðir, ikki prestvígdur, heitir biskupur á landsstýrismannin um at fáa prestvígsluloyvi.

*Setanartilgongd*

**§ 10**. Biskupur letur nevndini sbrt. § 4 embætisprógvið ella ávegis próvskjølini frá umsøkjara, ið ikki áður hevur verið við í setanartilgongdini til sóknarprestaembæti, og sum ikki er fevnt av ásetingunum í § 1, stk. 3, § 1, stk. 4, ella § 3, stk. 3, til metingar.

**§ 11**. Tá ið umsøkjarar hava verið til próvhoyring, sendir biskupur kirkjuráðunum í prestagjaldinum umsóknirnar til gjøgnumlestur og upplýsir talið av umsóknum, ið komu inn. Hann kallar kirkjuráðini til fundar og veitir teimum leiðbeining, greiðir teimum frá meting síni um umsøkjararnar eftir próvhoyringina, og um setanartilgongdina.
*Stk. 2*. Biskupur hevur ábyrgdina av setanartilgongdini.

**§ 12**. Kirkjuráðini gera í felag biskupi raðfesta tilráðing um 3 umsøkjarar, og skulu ikki grundgeva fyri hesi. Biskupur kann gera av, at tilráðingin skal vísa, hvussu umboðini fyri einstøku kirkjuráðini hava greitt atkvøðu.
*Stk. 2*. Kirkjuráðini hava setanarsamrøðu við umsøkjara og geva honum høvi at hava royndarprædiku fyri kirkjuráðunum. Umsøkjari skal verða boðin til setanarsamrøðu og at royndarprædika, um so er, at 3 kirkjuráðslimir ynskja hetta.
*Stk. 3*. Royndarprædika er ikki almenn, uttan so at umsøkjarin og biskupur semjast um hetta.

**§ 13**. Tá ið biskupur hevur tikið støðu til tilráðingina frá kirkjuráðunum, ger hann landsstýrismanninum tilmæli og leggur tilráðingina frá kirkjuráðunum við. Tekur umsøkjari, ið kirkjuráðini hava rátt til, seg aftur, gevur biskupur kirkjuráðunum høvi at gera nýggja tilráðing.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin setir umsøkjara, ið allir kirkjuráðslimirnir atkvøddu fyri í fyrstu atkvøðugreiðslu. Er eittans sóknarprestaembæti í prestagjaldinum, setir landsstýrismaðurin umsøkjara, ið tveir triðingar av kirkjuráðslimunum atkvøddu fyri í fyrstu atkvøðugreiðslu.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin hevur serlig fyrilit fyri minnilutum í prestagjaldinum, tá hann setir starv í prestagjaldi, har fleiri sóknarprestaembæti eru.
*Stk. 4*. Landsstýrismaðurin setir ikki umsøkjara, ið ikki er teirra millum, sum kirkjuráðini ráða til at seta. Landsstýrismaðurin kann gera av, at embætið verður lýst leyst av nýggjum.
*Stk. 5*. Landsstýrismaðurin ásetir greiniligari reglur um mannagongdir í sambandi við tilráðing, krøv til viðgerð og um atkvøðugreiðslu, tá kirkjuráðini gera tilráðing um setan.

*Kirkjulið kjósar sær prest*

**§ 14**. Meta kirkjuráðini í prestagjaldinum, at sera stór undirtøka er í prestagjaldinum fyri, at onkur ávísur verður settur í starv, og heita í minsta lagi 40% av kirkjufólkinum í hvørjari av kirkjusóknunum í prestagjaldinum, sum hava atkvøðurætt eftir reglunum í Løgtingslóg um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn, skrivliga á biskup um, at onkur ávísur verður settur í embætið, kann biskupur, uttan mun til mannagongdina eftir §§ 12 og 13, mæla landsstýrismanninum til, at viðkomandi verður settur, treytað av:
1) at áheitanirnar eru biskupi í hendi í seinasta lagi 14 dagar eftir, at umsóknarfreistin er farin,
2) at 2/3 av teimum, sum hava atkvøðurætt á felags fundi, hildin eftir ásetingunum um felags fund í kirkjuliðunum í fleiri kirkjusóknum í Løgtingslóg nr. 27 frá 19. mai 2008 um kirkjuráð og próstadømisráð, taka undir við hesum,
3) at viðkomandi er 35 ár ella eldri
4) at viðkomandi í serligan mun hevur víst seg at hava gávur, sum hava avgerandi týdning fyri at røkja sóknarprestaembætið.

Er viðkomandi kallaður til valkirkjulið, er treytin harumframt, at tveir triðingar av atkvøðunum á aðalfundi í valkirkjuliðnum eisini eru fyri hesum.
*Stk. 2*. Í sambandi við kirkjuliðsfundin eftir stk. 1, nr. 2 boðar biskupur til fundar og kemur í leiklutin hjá formanninum í kirkjuráðnum í kirkjusóknini, har flest fólk búgva.
*Stk. 3*. Annars galda mannagongdirnar eftir § 13 til javndømis.

## Kapittul 2

## Annar prestur

**§ 15**. Landsstýrismaðurin kann seta prest í tænastu hjá føroyingum uttanlands og til at røkja serliga tænastu innlendis.

**§ 16**. Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli biskups loyva, at gudfrøðingur, sum lýkur treytirnar at gerast sóknarprestur, sbr. §§ 1-3, 7 og 8, og sum
1) hevur vísindastarv í Føroyum, við serligum atliti at gransking og undirvísing í føroyskum kirkjuviðurskiftum sum høvuðsstarv, ella
2) er í fulltíðarstarvi hjá fríum, kirkjuligum felagsskapi, fyrst og fremst at røkja innlendis kirkjuligt arbeiði hjá felagsskapinum,

verður prestvígdur, um kirkjuráðini í einum prestagjaldi, ta tíð hann er í viðkomandi starvi, játta at vilja hava viðkomandi sum atknýttan, ólønntan hjálparprest, ið hevur skyldu at halda í minsta lagi 6 gudstænastur um árið.

*Stk. 2.* Prestvígsluloyvi eftir stk. 1 er treytað av

1) at viðkomandi, umframt váttanina eftir § 8, stk. 2, skrivliga váttar í virki sínum sum prestur at vilja fylgja reglunum, ið galda í fólkakirkjuni
2) at viðkomandi skrivliga váttar á hvørjum ári at vilja lata biskupi skrivliga frágreiðing um virki sítt sum prestur.

*Stk. 3.* Prestvígsluloyvi eftir stk. 1, nr. 2 er harumframt treytað av,

1) at leiðslan í viðkomandi kirkjuliga felagsskapi heitir skrivliga á biskup um, at viðkomandi verður prestvígdur
2) at biskupur metir, at tað hevur týdning fyri fólkakirkjuliga virksemið hjá felagsskapinum, at viðkomandi verður prestvígdur
3) at landsstýrismaðurin, í samsvari við tilmæli biskups, metir, at talan er um frítt kirkjuligt virksemi innan fólkakirkjuna, sum hevur munandi týdning fyri fólkakirkjuna.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann í mesta lagi loyva, at upp til svarandi til 8% av sóknarprestunum í føstum embæti eru prestvígdir eftir stk. 1, nr. 2.

**§ 17**. Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli biskups, og eftir ummæli frá prestafelagnum og felagnum fyri kirkjuráðslimir, áseta greiniligari reglur fyri mannagongdunum, tá prestur verður settur í starv eftir § 15.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skipar í hvørjum einstøkum føri embæti eftir §§ 15 og 16 við støði í tilmæli biskups.

## Kapittul 3
## Próstaembæti

*Próstur*

**§ 18**. Próstaembæti kann sóknarprestur í embæti í próstadøminum og umsøkjari til leyst kall í próstadøminum søkja.
*Stk. 2.* Próstur lýkur førleikakrøvini til at gerast biskupur, sbr. § 22, stk. 1.

*Setanartilgongd*

**§ 19**. Biskupur ger landsstýrismanninum raðfest tilmæli um 3 umsøkjarar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin setir ein teirra, sum biskupur hevur mælt til, í embætið sum próstur.

*Dómpróstur*

**§ 20**. Dómpróstur lýkur førleikakrøvini til at gerast biskupur, sbr. § 22, stk. 1.

**§ 21**. Biskupur hevur fund við kirkjuráðini í prestagjaldinum, tá ið dómpróstur skal setast. Á fundinum verður farið ígjøgnum innkomnu umsóknirnar, og biskupur leiðbeinir um mannagongdina og ummælir umsøkjararnar.
*Stk. 2.* Kirkjuráðini viðgera umsóknirnar og ummæla tær á fundi, í seinasta lagi 3 vikur eftir fundin við biskup. Mannagongdirnar eru, sum tá kirkjuráðini virka við til at seta sóknarprest. Tó

ber ikki til at nýta mannagongdina eftir § 14. Kirkjuráðini lata biskupi raðfest ummæli av 3 umsøkjarum.
*Stk. 3.* Biskupur ger landsstýrismanninum raðfest tilmæli um 3 umsøkjarar og leggur ummælini frá kirkjuráðunum við. Biskupur ger sjálvur av, hvørjar umsøkjarar hann mælir til.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin mælir løgmanni til at seta ein teirra, sum biskupur hevur mælt til, í embætið sum dómpróstur.

**Kapittul 4**
**Biskupur**

**§ 22**. Biskupur lýkur treytirnar at gerast sóknarprestur, sbr. § 1, stk. 1, og sbr. § 1, stk. 2, ella kunngerð eftir § 3, stk. 3, hevur lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu, sbr. § 2, og hevur virkað í sóknarprestaembæti í Føroyum í minsta lagi í 6 ár, ella kann á annan hátt skjalprógva, at hann hevur royndir og vitan, ið geva honum samsvarandi innlit í kirkjuviðurskiftini í Føroyum.
*Stk. 2.* Løgmaður setur biskup, samsvarandi biskupsvalinum, eftir tilmæli frá landsstýrismanninum.

*Biskupsval*

**§ 23**. Valrætt á biskupsvali hava valdu kirkjuráðslimirnir og sóknarprestarnir.
*Stk. 2.* Sóknarprestur, sum er limur í kirkjuráði, hevur valrætt í kirkjusóknini, hann býr í. Prestur, sum ikki er limur í kirkjuráði, men sum er í hálvtíðarstarvi ella meira í fólkakirkjuni í Føroyum longri enn eitt ár, hevur valrætt til biskupsval í kirkjusóknini, hann býr í. Prestur í hálvtíðarstarvi ella meira uttanlands fyri fólkakirkjuna í longri enn eitt ár hevur valrætt í dómkirkjusóknini. Prestur hjá fleiri valkirkjuliðum hevur valrætt í størsta valkirkjuliðnum. Prestur, ið røkir fleiri embæti, boðar valstýrinum frá, hvar hann greiðir atkvøðu sína.
*Stk. 3.* Fyri valkirkjulið hava 4 umboð valrætt fyri tey fyrstu 59 kirkjufólkini í valkirkjuliðnum. Fyri valkirkjulið við 60-999 kirkjufólkum hava 6 umboð valrætt. Talið á umboðum verður síðani økt við einum fyri hvørji 1000 kirkjufólk tó so, at í mesta lagi 12 umboð hava valrætt fyri eitt valkirkjulið. Talið á kirkjufólki í valkirkjuliðnum verður gjørt upp pr. undanfarna 1. februar, ella við seinastu uppgerð undan hesum.

**§ 24**. Landsstýrismaðurin ásetir freist at boða frá valevnum til biskupsval. Fráboðanin verður latin Stiftsstjórnini og er undirskrivað av í minsta lagi 10%, men ikki meira enn 20% av teimum, sum hava valrætt.
*Stk. 2.* Kirkjuráðslimur kann bert verða stillari á einum valevnislista. Stillari á fleiri valevnislistum verður ikki roknaður sum stillari á nøkrum lista.
*Stk. 3.* Biskupsvalevni er ikki stillari og váttar skrivliga, at tað tekur undir við fráboðanini.

**§ 25**. Eitt valstýri við 2 limum úr próstadømisráðum og einum limi úr stiftsstjórnini stendur fyri biskupsvalinum. Føddir limir kunnu ikki vera í valstýrinum.
*Stk. 2.* Avgerð hjá valstýrinum kann kærast til landsstýrismannin innan eina viku eftir, at kærarin hevur fingið avgerðina.

**§ 26**. Valið fer fram við skrivligari atkvøðugreiðslu millum tey, ið hava valrætt sbr. § 23. Landsstýrismaðurin ásetir greiniligari reglur um valið.
*Stk. 2.* Kirkjugrunnurin rindar útreiðslurnar í sambandi við valið.

**§ 27**. Eru bert tvey valevni uppstillað, skal landsstýrismaðurin mæla løgmanni til at seta valevnið, sum hevur fingið flestar atkvøður. Stendur á jøvnum, er umval. Stendur aftur á jøvnum, er lutakast um, hvør skal setast.
*Stk. 2*. Eru fleiri enn tvey valevni, mælir landsstýrismaðurin løgmanni til at seta valevnið, sum hevur fingið meira enn helvtina av atkvøðunum. Hevur einki valevni fingið helvtina av atkvøðunum, mælir landsstýrismaðurin løgmanni til at seta valevnið, sum hevur fingið fleiri enn 42% av atkvøðunum, treytað av at ikki annað valevni hevur fingið fleiri enn 26% av atkvøðunum. Annars er umval millum tey bæði valevnini, sum fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum, er umval. Stendur aftur á jøvnum, er lutakast.
*Stk. 3*. Valstýrið skipar fyri lutakasti sbrt. stk. 1 og 2.

## Kapittul 5

## Bústaðarskylda

**§ 28**. Er embætisbústaður tengdur at embæti sum nevnt í kapitlunum 1 til og við 4, hevur tann, sum verður settur í embæti, skyldu at búgva í honum.
*Stk. 2*. Biskupur kann gera frávik frá ásetingini um bústaðarskyldu, tá staðfest er, at 3 ár eru eftir, til viðkomandi fer frá, ella um heilt serlig persónlig viðurskifti tala fyri hesum. Biskupur letur kirkjuráðini fáa høvi at geva ummæli, áðrenn hann tekur avgerð um frávik.
*Stk. 3*. Frávik eftir stk. 2 kann einans verða givið, um koyrandi er frá bústaðnum til kirkjuna í størstu kirkjusóknini í prestagjaldinum, ella til aðra kirkju í mestsum javnstórari kirkjusókn í prestagjaldinum, og flutningstíðin í mesta lagi er hálvur tími í bili.

## Kapittul 6

## Kirkjutænari og hjálparfólk

**§ 29**. Kirkjuráðið skipar kirkjutænastuna, heitir á fólk um at taka á seg tænastu sum kirkjutænari ella hjálparfólk, og kann veita kirkjutænara og hjálparfólki samsýning ella endurgjald fyri útreiðslur . Samsýningin og endurgjaldið fyri útreiðslur kunnu í meðal um mánaðin í mesta lagi svara til 0,08% av samtalda landskirkjuskattinum undanfarna ár.
*Stk. 2*. Kirkjuráðið heitir á Próstadømisráðið um loyvi til at veita endurgjald hægri enn hámarkið eftir stk. 1, og um at biðja Stiftsstjórnina seta í verk samsýning hægri enn hámarkið eftir stk. 1, til hjálparfólk við kirkjuna.
*Stk. 3*. Kirkjuráð í kirkjusókn við fleiri enn 4,5% av kirkjufólkinum í landinum heitir á Próstadømisráðið um at mæla Stiftsstjórnini til at seta kirkjutænara ella hjálparfólk í starv.
*Stk. 4*. Kirkjuráðini í prestagjaldi, ella kirkjuráð í kirkjusóknum við meira kirkjufólki enn lágmarkið eftir stk. 3, heita eftir avgerð á felags kirkjuráðsfundi á Próstadømisráðið um at mæla Stiftsstjórnini til at seta kirkjutænara ella hjálparfólk í starv.
*Stk. 5*. Við atliti at ítøkiliga tørvinum og at fíggjarstøðuni hjá kirkjusóknunum yvirhøvur, ger Próstadømisráðið av, hvørt tiltak eftir stk. 2 kann verða framt, og mælir til, hvørt tiltak eftir stk. 3 ella 4 kann verða framt. Stiftsstjórnin ger av, um og hvussu starvið verður sett, og tænastan samsýnt, ella um tørvurin verður nøktaður á annan hátt, harundir í samstarvsavtalu við annan veitara, tó so at kostnaður og tímatal ikki verða størri, enn kirkjuráðið hevur ætlað.

*Stk. 6*. Kirkjuráðið kann ikki kæra avgerðir Próstadømisráðsins og Stiftsstjórnarinnar eftir stk. 5, men kirkjuráðið kann taka áheitanina aftur, tekur tað ikki undir við loysnini, ið Stiftsstjórnin velur.

*Setanartreytir og umsitingarreglur*

**§ 30**. Kirkjutænari og hjálparfólk, tó ikki urguleikari, skal vera limur í fólkakirkjuni. Biskupur kann loyva fráviki eftir áheitan frá kirkjuráðnum.
*Stk. 2*. Áðrenn kirkjutænari ella hjálparfólk fer undir tænastuna, váttar hann við trú og heiður at vilja inna tað starv, sum litið verður honum til, í trúskapi móti lærugrundarlagnum hjá evangelisk-luthersku fólkakirkjuni, soleiðis at hon kann bjóða kirkjuliðnum góð kor fyri lívi og vøkstri.

**§ 31**. Kirkjutænari og hjálparfólk eru í øllum virki í kirkjuni ella fyri kirkjuna fevnd av ásetingunum í áttanda kapitli í fyrisitingarlógini.
*Stk. 2*. Lønt tænasta sum kirkjutænari ella hjálparfólk heldur uppat fyri aldur, samsvarandi reglunum um fráfaringaraldur hjá alment settum. Samsýnt tænasta sum kirkjutænari ella hjálparfólk steðgar við endan á mánaðinum, hann fyllir 5 ár meira, enn almenni fráfaringaraldurin er. Kirkjuráðið kann tó lata Stiftsstjórnini grundgivið tilmæli um, at samsýnta tænastan verður longd við einum ári í senn.

**§ 32**. Stiftsstjórnin er vegna kirkjuráðið setanarmyndugleiki viðvíkjandi størvum og avtalupartur um samsýntar uppgávur ella tænastuveitingar, sbr. § 29, stk. 2, 3 og 4.
*Stk. 2*. Stiftsstjórnin rindar lønir og samsýning, sbr. § 29, stk. 2, 3 og 4, vegna kirkjuráðið.
*Stk. 3*. Stiftsstjórnin kann, í tann mun umsitingarlig viðurskifti hjá Stiftsstjórnini tala fyri hesum, fyribils lata kirkjuráði í kirkjusókn við meira kirkjufólki enn lágmarkið eftir § 29, stk. 3, heimildir sínar eftir hesi grein heilt ella lutvís eftir treytum, sum Stiftsstjórnin leggur við.

**§ 33**. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð greiniligari reglur um,
1) hvussu samsýning fyri tænastur í mesta lagi kann verða, harundir í mun til vavið á tænastuni og í mun til førleikar tænastuveitarans
2) hvussu samsýning til urguleikarar í mesta lagi kann vera, alt eftir
    a. fakligu førleikum urguleikarans
    b. talinum av kirkjufólki í kirkjusóknini
    c. støddini á urguni
3) landsstýrismaðurin kann áseta reglur um mesta samsýnta tímatal fyri urguspæl tilsamans, í mun til hvussu stór kirkjusóknin er, og um serstakar viðbøtur í sambandi við serstakar skyldur ella tænastur, sum verða røktar í samráð við Stiftsstjórnina.

## Kapittul 7

## Setan í starv hjá stiftsstjórnini

**§ 34**. Stiftsstjórnin setir starvsfólk í starv hjá stiftsumsitingini. Stiftsstjórnin kann heimila biskupi at inna setanarmyndugleikan.
*Stk. 2*. Starvsfólkini hjá stiftsumsitingini verða sett samsvarandi setanar- og lønarviðurskiftunum hjá alment settum.

## Kapittul 8

## Umsitingarreglur og kæra

**§ 35**. Annar, fjórði, fimti og áttandi kapitul í fyrisitingarlógini galda fyri øll lið í setanartilgongdum eftir hesi lóg.
*Stk. 2.* Avgerðir eftir hesi lóg kunnu verða kærdar til landsstýrismannin í tann mun, tær ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eru um læru og boðan fólkakirkjunnar.

## Kapittul 9

## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 36**. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. § 2, stk. 1 kemur tó í gildi 1. januar 2014.
*Stk. 2.* Samstundis fara úr gildi:

1) Konglig fyriskipan nr. 884 frá 8. desembur 1999: „Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.v.
2) Norska lóg 2.3.2
3) Konglig fyriskipan nr. 886 frá 8. december 1999 „Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning"
4) Konglig fyriskipan nr. 49 frá 21. januar 1921 "Anordning om præstevielse af teologiske kandidater i visse tilfælde"
5) Konglig fyriskipan nr. 191 frá 18. November 1907 "Bekendtgørelse angaaende Adgang for Folkekirkens Præster til at afholde Gudstjeneste og forrette Altergang i en evangelisk-luthersk Frimenigheds Kirke under Vakance i Frimenighedens Præsteembede."
6) Lov nr. 79 af 3. marts 1948 um "Adgang for Biskopper til Fritagelse i visse Tilfælde for at føre Tilsyn med en Menighed og dennes Præster"
7) Konglig fyriskipan nr. 34 frá 6. februar 1936 um "Ophævelse af Præsteskyds paa Færøerne og Udredelse af Befordringsgodtgørelse til Præsterne sammesteds".

*Stk. 3.* Fyrsti til og við fimta kapitul galda eisini fyri embæti, ið eru lýst leys, tá lógin kemur í gildi.
*Stk. 4.* Í § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 27 frá 19. mai 2008 um kirkjuráð og próstadømisráð verður "/setir" strokin.

**Kap. 1**
**Almennar viðmerkingar:**

Orsøkin til, at lógarupskotið verður lagt fram, er, at í sambandi við yvirtøkuna av málsøkjunum "fólkakirkjan og onnur trúarsamfeløg" varð gjørt av at gera alla kirkjulóggávuna føroyska.

Lógaruppskotið kemur fyrst og fremst í staðin fyri galdandi løgskipan, *"Anordning nr. 884 frá 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ansættelse i stillinger i folkekirken m.v.",* sum tað í høvuðsheitum fylgir rættiliga neyvt, í tann mun hetta er hóskandi eftir føroyskum viðurskiftum, tó at førleikakrøvini til sóknarprestar ikki kunnu vera gjørd á sama hátt sum tey galdandi donsku, og dagføringar verða skotnar upp á fleiri økjum.
Lógaruppskotið kemur eisini í staðin fyri "*Anordning nr. 886 frá 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning*". Viðvíkjandi biskupstilnevningini er eingin broyting av størri týdningi; men skotið verður ikki upp at hava ásetingar um at loysa stiftsband. Hetta ber ikki til, tí at Føroyar er eittans stift. Talan er sostatt um fylgjubroyting, sum er fylgja av yvirtøkuni.
Eisini kemur lógin í staðin fyri kongligu fyriskipanina nr. 49 frá 21. januar 1921, *"Anordning om præstevielse af teologiske kandidater i visse tilfælde"*, og her eru ávísar broytingar og tillagingar.
Endiliga tekur lógin av Lov nr. 79 af 3. marts 1948 um *"Adgang for Biskopper til Fritagelse i visse Tilfælde for at føre Tilsyn med en Menighed og dennes Præster"*, av tí at landið er eitt biskupsdømi (stift), hevði ikki borið til at loyst biskupin frá umsjónarskylduni í mun til ávís kirkjulið. Talan er sostatt eisini her um broyting, sum er fylgja av yvirtøkuni.

Uppskotið er um, hvussu embæti og størv í fólkakirkjuni verða sett, um hvør hevur hvørjar setanarheimildir, og um førleikakrøv til sóknarprest, próst og biskup.

Endamálið við lógaruppskotinum er, – í samsvari við semjuna millum allar flokkar á Tingi undan yvirtøkuni av málsøkinum – at kirkjulóggávan verður gjørd føroysk, men soleiðis at fólkakirkjan kann halda fram í verandi bygnaði.

**Nýskipanin við uppskotinum**
Ætlanin er sum sagt, at lógaruppskotið ikki á nakran hátt skal broyta fólkakirkjuna.
Kortini verða fleiri broytingar/tillagingar skotnar upp, og summar teirra hava eisini innihaldsligan týdning. Í flestu førunum eru hetta broytingar, sum koma av, at økið nú verður reglusett við løgtingslóg, so at nú ber til at taka støði beinleiðis í føroyskum viðurskiftum, heldur enn sum higartil, at donsk lóggáva í ávísan mun varð lagað til føroysk viðurskifti.
Einstakar meira nýskapandi og nýskipandi innihaldsligar broytingar verða tó eisini skotnar upp:

- Førleikakrøvini til teirra, ið søkja sóknarprestaembæti verða lagað til, so at tey eru grundað á veruleikan, sum er í dag: ikki ber til at gerast kandidatur í gudfrøði í Føroyum, og tí taka flestu føroyingar gudfrøðiútbúgving í Danmark ella øðrum av grannalondunum. Galdandi reglur taka støði í galdandi donsku løgskipan. Tí hevur higartil einvíst verið mett um førleikan hjá gudfrøðingum við at javnbera eina og hvørja gudfrøðiútbúgving við ta donsku, sum sjálvsagt er at gera í Danmark. Skotið verður upp at tryggja gudfrøðiliga støðið og trúarlæruliga og kirkjusiðaliga framhaldið við at seta saman innihaldslig førleikakrøv við støði í gudfrøðiútbúgvingunum, sum fólkakirkjurnar í gamla dansk-norska ríkinum, Danmark, Íslandi og Noregi – tær, sum eru mest samlíkar fólkakirkjuni í Føroyum – hvør sær viðurkenna sum førleikagevandi.

- Ein broyting í mun til galdandi løgskipan er, at skotið verður ikki upp at taka ásetingarnar í § 1, stk. 1, nr. 2) og 3) við í uppskotið. Hesar eru um, at prestlærdur við serstaka grønlendska framhaldslestrinum í kristnikunnleika, og um, at tann sum í 7 ár hevur virkað sum prestur hjá evengeliskt-lutherskari fríkirkju, kunnu verða settir í starv á jøvnum føti við gudfrøðilærdan eftir aðalregluni. Grundgevingin er fyrst og fremst, at serstakar ásetingar um hetta – um enn mestsum sjálvsagdar í donskum høpi – eru óviðkomandi fyri føroysk viðurskifti. Tað hevur ongantíð verið upp á tal at fremja setanir her á landi eftir hesum heimildum, og tí eru tær óneyðugar.
- Sum nakað nýtt verður skotið upp – uttan mun til formlig førleikakrøv – at heimila biskupi at skipa prest úr lutherskari kirkju í starv í fólkakirkjuni fyribils í upp til 3 mánaðar.
- Sum nakað nýtt verður skotið upp at krevja, at sóknarprestur skal taka lært nám í føroyskari kirkjusøgu, -skipan, -siðum og embætisførslu, sum galda í fólkakirkjuni, um hann ikki hevur tikið hesi sum lið í kandidatútbúgvingini. Eyðsýniligur tørvur hevur leingi verið á slíkum serlestri í føroyskum viðurskiftum, tí at ikki ber til at taka gudfrøðiútbúgvingina í Føroyum, men kravið er enn meira neyðugt at seta, nú ið latið verður meira upp fyri ymiskum gudfrøðiútbúgvingum, og harvið fyri sóknarprestum við enn meira fjølbroyttum royndum og bakstøði enn higartil.
  Kravið ger, at neyðugt er at skipa slíkt nám á Fróðskaparsetrinum. Hetta kann verða gjørt í samstarvi við fólkakirkjuna, ið kundi fíggjað part av neyðuga granskarastarvinum.
- Sum nakað nýtt verður skotið upp at krevja, at sóknarprestur, sum ikki hevur føroyskt sum móðurmál, í verki skal vísa, at hann skilir føroyskt, og at hesin innan 2 ár frá starvssetanardegnum skal prógva, at hann í hóskandi mun er førur fyri at orðbera seg skilliga á føroyskum
- Greiniligari reglur verða settar fyri próvhoyringina hjá biskupi, eins og skotið verður upp, at hon skal kunna vera í góðari tíð, áðrenn gudfrøðingur søkir ítøkilig embæti. Próvhoyringin er kanning og meting biskups av, um umsøkjari er skikkaður at gerast sóknarprestur, og fortreyt fyri at biskupur kann geva kallsbræv.
- Førleikakrøvini til biskup, dómpróst og próst (um próstaembæti verður sett) verða lagað til samsvarandi nýggju førleikakrøvunum til sóknarprestar. Haraftrat kemur krav um minst seks ára starvsroyndir í fólkakirkjuni í Føroyum, og um staðið lært nám í føroyskari kirkjusøgu – eisini hóast kravið ikki galt, tá viðkomandi var settur í starv sum sóknarprestur.
- Í fólkakirkjuni í Danmark kunnu kirkjulið og sóknarprestur koma undir umsjón hjá øðrum biskupi. Hetta til tess at skapa bestu hugsandi rúmd fyri samstarvi innan karmar fólkakirkjunnar, hóast átrúnaðarliga grundaðar ósemjur innan lærugrundarlagið. Føroyar er <u>eitt</u> stift við <u>einum</u> biskupi. Tí er tann møguleikin ikki til, og heimildir verða tí ikki ásettar hesum viðvíkandi.
- Lítið nýtta heimildin at seta onnur starvsfólk í fólkakirkjuni verður broytt, so at størstu kirkjusóknirnar ikki seta størv sjálvar, men umvegis Próstadømisráðið heita á Stiftsstjórnina um at seta starv teirra vegna, og samstundis verður skotin upp nýggj heimild til, at eisini smáu kirkjusóknirnar kunnu ganga saman um, umvegis Próstadømisráðið, at heita á Stiftsstjórnina um at seta teimum starvsfólk.
- Skotið verður upp, at kirkjutænari og hjálparfólk í øllum virki í kirkjuni ella fyri hana verða fevnd av ásetingunum um tagnarskyldu í áttanda kapitli í fyrisitingarlógini. Neyðugt er at áseta hetta staðiliga, tí at kirkjan ikki er partur av fyrisitingini, og tí galda ásetingarnar ikki annars her.

- Skotið verður upp, at setan hjá kirkjutænara og hjálparfólki steðgar, tá fráfaringaraldurin hjá alment settum er rokkin, og at avtalur um tænastu hjá kirkjutænara og hjálparfólki steðga 5 ár eftir, at viðkomandi er farin um fráfaringaraldurin hjá alment settum, men at hesar seinnu síðani kunnu verða longdar við einum ári í senn.
- Heimildin at seta fólk í starv hjá Stiftsstjórnini verður flutt frá landsstýrismanninum til Stiftsstjórnina. Hevði talan verið um alment fíggjaðan landsstovn, hevði leiðslan sett starvsfólkini, men raksturin av Stiftsstjórnini verður fíggjaður við kirkjuskatti burturav. Við broytingini verður betri samsvar millum gjald og vald.

Víst verður annars til neyvaru gjøgnumgongdina av ymisku viðurskiftunum niðanfyri her í kapitlinum, og til serstøku viðmerkingarnar til einstøku ásetingarnar.

**Sóknarprestaembætið í mun til kirkjuliðið/kirkjuráðið**
Í Lógini um fólkakirkjuna í Føroyum er ásett í § 7, at "*Sóknarprestur er tann, sum er rætt kallaður til at tæna í fólkakirkjuni við orði og við sakramentum og er vígdur til hesa tænastu.*
*Stk. 2. Sóknarprestur boðar gleðiboðskapin, heldur gudstænastu, fremur kirkjuligar tænastur, hevur undirvísing og veitir sálarrøkt, og skal støðugt granska Guds orð og trúarinnar læru.*"
Hetta er ein samandráttur av embætisuppgávunum hjá sóknarpresti, sum tær eitt nú eru ásettar í Augsburgsku trúarjáttanini, Norsku Lóg, prestvígsluritualinum og í prestlyftinum.

Eftir luthersku læruni er ikki nakað millumlið millum Gud og hin einstaka. Tann, sum er doyptur, kann – við orðum Luthers – rósa sær av, at hann longu er vígdur til prest, biskup og páva, tó at tað ikki hóskar øllum at fremja slíkt embæti. Hetta – vanliga nevnt "vanliga prestadømið" – ber við sær, at ein og hvør kristin hevur ein prestagerning at fremja í lívi sínum (ella vit kunnu siga, at øll doypt kristin eru prestar við rættindum og skyldum í mun til kirkjuliga embætið, sum Gud hevur fyriskipað); men til tess at halda skil á og halda fast við læruna, hevur kirkjan fyriskipað embæti, og eftir 14. grein í augsburgsku trúarjáttanini skal eingin læra alment í kirkjuni ella fara um sakramentini, uttan at hann er kallaður á rættan hátt.
Í kirkjuordinansinum frá 1537/1539 verður mint á, at fyrisetta skipanin við sóknarprestum er bara ein verklig fyriskipan. Luther skrivar somuleiðis í 1535 m.a, at embætið er ikki annað enn ein almenn tænasta, ið kirkjuliðið alt, ið samstundis øll eru prestar, áleggur einum persóni. – Hóast sóknarprestaembætið er tænandi og álagt sóknarpresti av kirkjuliðinum, er sóknarprestur tó ikki *undirlagdur* kirkjuliðinum/kirkjuráðnum:
Kirkjuráðslimirnir kalla vegna kirkjuliðið, ið hevur kallsrætt og –skyldu, á ein teirra, ið kennir andaligu kallingina til kirkjuliga embætið. Sóknarpresturin fær við hesum ábyrgd fyri at boða Guds orð reint og rætt, sambært luthersku læruni, at fara um sakramentini, og at halda kirkjuliðini við luthersku læruna.
Kirkjuráðslimur hevur – eins og øll hini í kirkjuliðnum – lut í vanliga prestadøminum. Harumframt hevur hann meira verkligar og ítøkiligar skyldur viðvíkjandi kirkjuliga lívinum í kirkjusóknini – skyldur av bæði almennum og ítøkiligum slag, sum eitt nú eru álagdar honum í §§ 1, 6 og 16-19 í lógini um kirkjuráð og próstadømisráð.
Kirkjuráðið hevur sostatt saman við sóknarpresti ábyrgd fyri kirkjuliga lívinum í kirkjusóknini.
Kirkjulið/kirkjuráð og sóknarprestur hava hvør á sín hátt rættiliga greitt skilmarkaðar ábyrgdir og skyldur mótvegis kirkjuliga lívinum á staðnum og mugu samvinna til tess at røkja hesar.
Sóknarprestur er (sbr. § 23 í lógini um kirkjuráð og próstadømisráð) óheftur av kirkjuráðnum í embætisvirksemi sínum, so at veruleiki kann vera í teirri serstøku skyldu og ábyrgd, sum hann við embætinum, prestalyftinum – og við serstøku fortreytunum, sum hann hevur fingið við útbúgvingini – hevur átikið sær at røkja vegna kirkjuliðið og undir umsjón biskups.

Sóknarprestur er tí føddur limur í øllum kirkjuráðunum í prestagjaldinum. Umframt mongu verkligu orsøkirnar, ið eru og (enn meira) hava verið til hetta, kemur eisini, at við embætinum hevur sóknarprestur serliga ábyrgd og serligar fortreytir fyri at virka við til, at kirkjuliga lívið og virksemið í kirkjusóknini eru innan karmarnar á evangeliskt luthersku læruni.

**Sóknarprestaembætið og gudfrøðiútbúgvingin**

Sóknarprestur er gudfrøðingur og prestur, tí at hann í lesnaðinum hevur arbeitt vísindaliga við gudfrøðiligu fakøkjunum úr átrúnaðarligum sjónarhorni – og hevur førleika til (sbr. prestlyftið) áhaldandi at arbeiða sjálvstøðugt við hesum. Hetta er í sjálvum sær eitt slag av góðskutrygging, í mun til t.d. ein ikki-gudfrøðiliga útbúnan prædikumann, sum hóast dugnaskap forkynnir bíbliuna á meira privatum, ella, ið hvussu er, minni fakligum støði. Eitt av endamálunum við førleikakrøvunum er tí at tryggja, at gudfrøðilesturin er somikið breitt grundaður, at gudfrøðingurin í lesnaðinum vinnir sær ta albúgving, ið saman við trúnni og sannføringini um luthersku læruna er fortreyt fyri og amboð til, at hann verður førur fyri at virka, ikki sum gudfrøðingur, verðsligur sálarhirði, sosialráðgevi, kunningarstarvsfólk ella sum prædikumaður, men sum júst sóknarprestur eitt heilt yrkislív. Virkið sum sóknarprestur er sera breitt, samansett, krevjandi, og á mangan hátt einsligt, og tí er neyðugt at hava rætta førningin við sær, til tess at vera førur fyri at endurnýggja seg fakliga í virkinum sum sóknarprestur.
Gudfrøðiútbúgving á høgum fakligum støði borgar ikki í sjálvari sær fyri, at gudfrøðingurin sum sóknarprestur áhaldandi verður førur fyri at fremja boðan, undirvísing og sálarrøkt á nøktandi støði og inn í samtíðina, men gudfrøðiliga tyngdin og breiða albúgvingin kunnu vera týðandi amboð at endurnýggja seg yrkisliga við, og kunnu hartil virka við til at tryggja embætisførsluna ímóti at reka út í sjálvkenda, einstaklingsbundna tilvild.

**Sóknarprestaembætið og fyrisitingaruppgávur**

Sóknarprestur røkir, umframt kirkjuligu uppgávurnar, ymiskar fyrisitingarligar uppgávur í prestagjaldinum landsmyndugleikanna vegna.
Serliga er vert at nevna, at kirkjubókaførandi sóknarprestur førir kirkjubøkur, er navnaskrásetingarmyndugleikin og jarðarferðarmyndugleikin á staðnum, og hevur myndugleika at fremja hjúnavígslu, sum eisini hevur borgarligt gildi.

**Sóknarprestaembætið og starvsøkið - Prestagjaldið**

Landið er býtt í prestagjøld, ið eru virkis-og ábyrgdarøki sóknarprests. Í prestagjaldinum eru altíð fleiri kirkjusóknir. Eru fleiri sóknarprestaembæti í prestagjaldinum, hevur ein av sóknarprestunum skyldurnar sum kirkjubókaførandi og jarðarferðarmyndugleiki.
Eins og øðrum tænastumonnum kann eisini sóknarprestum verða álagt at gera tænastu í øðrum prestagjøldum; men vísandi til tað, sum er greitt frá um kallingina, ber av kirkjuligum ávum ikki til at flyta sóknarprestar varandi millum líknandi embæti, hóast tænastumannalógin heimilar hesum.

**Sóknarprestaembætið – samandráttur um setanartilgongd**

Sóknarprestaembætini í prestagjøldunum verða lýst leys, og tann, sum kann virka sum sóknarprestur í fólkakirkjuni, skal vera rætt kallaður, umframt at lúka førleikakrøvini. Kirkjufólkið (umboðað av limunum í kirkjuráðunum í prestagjaldinum) kallar við setanartilgongdini sóknarprestin, sum biskupur gevur kallsbræv, og sum próstur innsetir, eftir at landsstýrismaðurin hevur sett hann í starv eftir tilmæli biskups.
Áðrenn hann kann taka við embæti fyrstu ferð, skal sóknarprestur harumframt standa próvhoyringina hjá biskupi og undirskriva prestlyftið, til tess at biskupur kann prestvíga hann.

**Sóknarprestaembætið – um galdandi førleikakrøv her og í grannalondunum**

Eftir galdandi løgskipan galda donsku førleikakrøvini. Tí er meginregluliga førleikakravið gudfrøðiútbúgving av viðurkendum donskum lærdum háskúla. Hevur umsøkjarin ikki gudfrøðiútbúgving av viðurkendum donskum lærdum háskúla, verður útbúgvingin javnvirðismett neyvt við donsku gudfrøðiútbúgvingina, og síðani verða sett ítøkilig krøv um, at gudfrøðingurin tekur ískoytisnám, til útbúgvingin tilsamans grundregluliga hevur alt tað í sær, sum minstalagskrøvini í donsku útbúgvingini áseta.

Í t.d. norsku og skotsku kirkjunum verður í prinsippinum eisini gjørd líknandi innihaldslig meting, tá um gudfrøðiútbúgving frá universiteti í øðrum landi ræður, meðan Svenska kyrkan viðurkennir tann, sum í fyrsta lagi hevur viðurkenning at virka sum prestur hjá aðrari kirkju í Lutherska heimssamfelagnum ella øðrum trúarsamfelag, sum Svenska kyrkan hevur serstakt samkirkjuligt samstarv við, og sum í øðrum lagi stendur eina (í mun til próvhoyringina hjá biskupi, sum vit kenna hana, serstakliga nágreiniliga og umfatandi) veruliga prestaroynd, sum hvørt stiftið sær skipar fyri.

Orsøkin til, at kirkjurnar gera okkurt slag av innihaldsligari meting av gudfrøðiútbúgvingum, er, at førleikarnir og vitanin, ið tú nemur í vísindaligum gudfrøðinámi, kunnu vera ómetaliga ymisk, alt eftir hvønn átrúnað og hvørjar trúargreinar, ið høvuðsdentur verður lagdur á í lesnaðinum.

Gudfrøði er vísindin um átrúnað yvirhøvur, so gudfrøðilesnaður nýtist fyri tað yvirhøvur ikki at viðgera júst kristnina í nevniverdan mun. Saktans ber til at hava holla, vísindaliga gudfrøðiútbúgving, uttan at hava kunnleika, ið er viðkomandi fyri virkið í kristnari kirkju yvirhøvur, og enn minni júst í lutherskari fólkakirkju, havandi í huga, at í øllum heiminum hoyra einans um 75 milliónir til lutherskar kirkjur, meðan á leið 1,2 milliardir eru katólsk, og hinar á leið 1,1 milliardirnar av kristnum hoyra til aðrar kristnar trúarbólkar í túsundatali, harav einar 325 milliónir hoyra til aðrar protestantiskar kirkjur ella samkomur.

Um okkara leiðir gerast flestu kandidatar í gudfrøði prestar í kristnum kirkjum, og í Norðurlondum verða tey flestu prestar í lutherskum kirkjum. Universitetini í einstøku londunum bjóða sjálvsagt út fak, ið eru viðkomandi og neyðug í arbeiðsplássunum hjá flestu kandidatum teirra. Soleiðis verður – á sama hátt sum við so at siga øllum øðrum universitetsútbúgvingum og størvum, ið krevja akademiska útbúgving – mestsum av sær sjálvum trygd fyri, at er gudfrøðiútbúgvingin tikin í egnum landi, so er hon eisini viðkomandi fyri embætið sum prestur í onkrari av stóru kirkjunum har.

Summar gudfrøðiútbúgvingar eru tó mest tilætlaðar komandi trúboðarum í fremmandum londum. Á slíkum útbúgvingum er neyðugt at hava lestrarevni – til dømis í boðan tvørturum mentanarmunir – ið eru viðkomandi fyri virkið sum trúboðari, men sum ikki í sama mun eru viðkomandi fyri virkið sum sóknarprestur, og serliga ikki í so eindarmentanarligum samfelag sum Føroyar. Eisini kann gudfrøðiútbúgvingin ofta vera ætlað til at geva førleika at undirvísa um átrúnaðir yvirhøvur, og tann lestrartíð, ið fer til at byggja upp hesar serligu førleikar, ger eyðvitað, at tað minni av lesnaðinum kann vera um onnur verkevni.

Nú ið innlendis gudfrøðiútbúgving ikki er at miða seg eftir, er tí ikki einans neyðugt at tryggja sær, at útbúgvingin er vísindalig, men eisini at hon er sett saman av fakum, sum í hóskandi mun eru viðkomandi fyri júst gerningin sum sóknarprestur í evangeliskt luthersku fólkakirkjuni í Føroyum.

**Sóknarprestaembæti – atlit, tá førleikakrøv verða sett**

Støðan er, at ikki ber til at lesa gudfrøði í Føroyum, og valla fer heldur í næstum at bera til at taka gudfrøðiútbúgving her. Gongdin er, at gudfrøðilesandi í størri mun velja sær lestrarstað í ymiskum øðrum londum, og eitt av endamálunum við uppskotinum er at lata meira upp fyri útbúgvingum úr fleiri londum. Tí er væntandi, at fólkakirkjan verður óvanliga væl fyri í so máta, at sóknarprestarnir fara at hava ymislig faklig íkøst til – og helst í ávísan mun eisini fara at hava ymisliga tilgongd til – gerningin sum sóknarprestur.

Hetta man verða ein styrki fyri fólkakirkjuna.

Eitt av endamálunum við førleikakrøvunum verður tó, – vísandi til aðalregluliga politiska setningin um ikki at broyta fólkakirkjuna við yvirtøkuni – at nýggju førleikakrøvini halda saman um tað, sum mett verður at vera aðaltátturin í teirri dygd, sum sóknarprestarnir við verandi førleikakrøvum hava borið til kirkjuna við yrkisføri sínum.

Fólkakirkjan hevur felags uppruna og langa felags søgu við verandi fólkakirkjum í londunum í gamla danskt-norska ríkinum. Kirkjurnar í Danmark, Noregi, Føroyum og Íslandi eru serstakliga líkar í mangar mátar. Tí er givið, at hevði borið til at tikið gudfrøðiútbúgving í Føroyum, hevði hon líkst útbúgvingunum í hesum londum mest av øllum, og natúrligt er at leggja hetta til grund, tá førleikakrøv verða sett, sí partin "*Sóknarprestaembæti – grundregluliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving*".

Ítøkiligu førleikakrøvini eru tó so ella so eitt stórt tal av til- og frávalum, av upp- og niðurraðfestingum millum ymisk sløg av førleikum, ið allir (eins og nakrir, sum als ikki eru raðfestir við uppskotnu førleikakrøvunum) av røttum kunnu sigast at vera sjálvsagdir partar av yrkinum og virkinum sum prestur.

Hvørji fak og hvørji verkevni, ið eiga at fáa rúmd í førleikakrøvunum til sóknarprest, veldst um, hvørjir útbúgvingarligir førleikar verða mettir at hava størstan týdning fyri júst gerningin sum sóknarprestur. Og hetta veldst so aftur um, hvussu mett verður um leiklutin hjá fólkakirkjuni – bæði sum størsta trúarsamfelagið við serstøkum rættindum og skyldum, ið fylgja av samvirkinum við hitt almenna, og sum eitt trúarsamfelag í samvinnu og kapping við onnur trúarsamfeløg í landinum.

Sum greitt frá í partinum "*Sóknarprestaembætið og gudfrøðiútbúgvingin*", er akademiska gudfrøðiútbúgvingin ein av aðalfortreytunum fyri, at sóknarpresturin kann menna og dagføra førleika sín at virka sum sóknarprestur, soleiðis sum hann bindir seg til við 3. liði í prestlyftinum: "*Endiliga: at eg við ídni og álvarsemi skal granska Guds orð og trúarinnar heilagu læru, og á tann hátt gera meg enn meira dugandi til hetta heilaga embæti.......*".

Nágreinilig vitan innan gudfrøðiliga økið stuðlar upp undir almennu menningina. Tann nágreiniliga vitanin, sum tú kanst fáa við gudfrøðilestri við galdandi førleikakrøvum – har bíbilsku upprunamálini og latín eru raðfest høgt, og samvirka við tær gudfrøðiligu, dogmatisku, kirkjusøguligu og heimspekiligu lærugreinarnar – er við til at menna gudfrøðilesandi til gudfrøðingar og prestar, sum hava evni til at kunna um sakliga, gudfrøðiliga vitan.

Arbeiðið við upprunaligu gudfrøðiligu tekstunum gevur hinum lesandi førleika at menna evnini til at greina og tulka tekstir og at seta teir inn í bæði søguligan og nútíðarligan samanhang.

Vit kunnu kanska siga, at við galdandi førleikakrøvum verður høvuðsdenturin lagdur á gudfrøðifakliga og heimspekiliga grundaða boðan av boðskapinum, sbr. 1. lið í prestlyftinum: "*Fyrst: at eg skal leggja mær nær við at prædika Guds orð reint og rætt, soleiðis sum tað finst í profetisku og apostólsku skriftunum og í symbolsku bókum evangelisk-luthersku kirkju okkara......*".

Við nakað broyttum førleikakrøvum hevði borið til at skapt eitt sóknarprestaembæti, sum í størri mun setir ljóskastaran á tey ymisku sløgini av menniskjum, sum sóknarprestur fer at møta í

gerninginum, og á henda hátt tryggja, at sóknarprestur í størri mun kann gera sálarhirðaarbeiðið út frá einum sálarfrøðiligum sjónarhorni.
Somuleiðis ber við eitt sindur broyttum førleikakrøvum til at skapa eitt sóknarprestaembæti, sum í størri mun leggur dent á ymisku samfelagsligu korini, sum menniskjuni, sum sóknarprestur fer at møta í gerninginum, fara at vera í og á henda hátt tryggja, at sóknarprestur í størri mun kann gera sálarhirðaarbeiðið út frá einum sosialfakligum sjónarhorni.
Endiliga hevði borið til at sett krav um meira nútíðarlig samskiftisfak, og soleiðis lagt upp fyri stóru kunningaruppgávuni, sum liggur í sóknarprestaembætinum. Hetta kundi virkað við til at skapt eina meira ”nýmótans” ímynd av fólkakirkjuni.

Uttan mun til hvat valt verður at leggja aftrat gudfrøðilesnaðinum, verður fylgjan tó, at okkurt ella nøkur av fakunum, sum frá eldri tíð hava verið partur av gudfrøðilesnaðinum, noyðast at verða raðfest samsvarandi lægri, ella tikin burtur úr førleikakrøvunum. Í Íslandi og Noregi – sum lættast er at samanbera við Danmark, vegna felags upprunan – verður høga støðið viðvíkjandi bíbilsku upprunamálunum framvegis raðfest høgt, meðan serliga latín verður raðfest lægri. Í Noregi hevur hetta serliga givið rúmd fyri at uppraðfesta prestlæruna, ið har er samrunnin liður í gudfrøðilesnaðinum hjá teimum sum velja prestvegin.

Bæði vísandi til politiska setningin um ikki at broyta fólkakirkjuna í sambandi við yvirtøkuna, og til umhugsni fyri, hvat ið er og kann vera serliga styrkin hjá júst fólkakirkjuni, verður mett, at útbúgvingarkrøv í rættiliga neyvum samljóði við tey, ið higartil hava verið galdandi, munnu hóska best til kirkjunnar verandi bygnað og karmar.

Í fólkakirkjuni skal vera rúmsátt innan lærugrundarlagið, og gjøgnum tíðina eru eitt nú bygnaðarligar tillagingar framdar til tess at tryggja hetta. Í og afturat kirkjuni og skipaða virki hennara er fjøld av meira og minni skipaðum, ymisligum virksemi, har limir hava tikið seg saman eftir fatanum og áhugamálum. Onnur ganga í kirkju og eru ikki virkin í øðrum kirkjuligum ella átrúnaðarligum høpi, meðan upp aftur onnur í long skifti hava lítið samband við kirkjuna, tó at tey síggja seg sum kirkjufólk. Bæði kirkjupolitiskt og átrúnaðarliga er fjølbroytnið sera stórt, tó at lærugrundarlagið er felags. Myndin av fólkakirkjuni sum móðurskip, ið fiskar sjálvt, men sum alla handa onnur fiskifør – alt frá dorium til nótaskip – eisini vinna saman við og í nánd av, er helst ikki heilt av leið.
Í fríu, kirkjuligu felgsskapunum eru fólk við støði í lærugrundarlagi fólkakirkjunnar gingin saman um meira samlíkar felags fatanir. Har liggur tí væl fyri at skapa lív, vøkstur og trivnað við meira liðiligum og minni bundnum tilgongdum til boðan og samkomulív, har lutfalsliga størri dentur verður lagdur á, at hin einstaki er beinleiðis virkin, og á at møta einstøku málbólkunum á ymiskan, smidligan hátt.
Í fólkakirkjuni yvir høvur ger stóra breiddin hinvegin, at avgerandi er fyrst og fremst at tryggja, at grundleggjandi skipan fólkakirkjunnar, eins og gudstænastuskipan og gudstænastusiðir eru so støðug, rúmsátt, kend og alkunnug, at hesi viðurskifti – saman við tí, at boðanin er á lærugrundarlagnum – borga fyri, at kirkjan framhaldandi kann savna og vegleiða.

Vísandi til frammanfyri standandi verður mett, at hitt almenna tryggjar frægastu karmarnar um lív og virki fólkakirkjunnar við, at avgerandi høvuðsdenturin í útbúgvingarkrøvunum verður lagdur á siðbundnu amboðs- og gudfrøðifakini.
Við hesi raðfesting verður hildið fast við ein týðandi part av tí, ið hevur gjørt fólkakirkjuna føra fyri framhaldandi at hava undirtøku frá allarflestu føroyingum, og kirkjan hevur helst á henda hátt lættari við at halda fast við og styrkja um samvinnuna við fríu, kirkjuligu felagsskapirnar,

eins og við aðrar samkomur, ið ikki altíð á sama hátt leggja dent á gudfrøðifakliga tyngd og gudstænastuskipanarligt nákvæmi.

Eitt høgt gudfrøðifakligt støði kann sostatt stuðla fólkakirkjuni á verandi kós og virkishátti, og soleiðis styrkja og fasthalda støðu hennara sum dyggur miðdepil í samfelags- og trúarlívinum, meðan tíðarrákið annars er, at alt skal ganga so skjótt fyri seg, og skiftandi boðskapir verða bornir fram í yvirskriftum og yvirlitum.

Fólkakirkjan er somikið stór og somikið embætisliga stýrd, at spurdómur er í, um hon hevði kunnað styrkt um støðu sína við til dømis at leggja seg eftir størri flytføri í mun til rák og háttaløg, sum eru uppi í tíðini, ella um vandi heldur hevði verið fyri, at hon kundi gingið sundur, tí at broyttu virkishættirnir høvdu virkað við til at drigið ósemjur og ymisleikar fram, í størri mun enn teir kundu latið upp fyri, at fólk legðist aftrat.

Við gudfrøðifakligum nákvæmi, yrkisføri, og mørkum fær sóknarprestur eitt frælsi til at virka sum slíkur innan fyri mørkini, so hann í gerninginum kann miðsavna seg um at boða boðskapin, at útinna arbeiðið og at hitta ymisk menniskju í ymiskum støðum, júst tí at gudfrøðifakligi grundvøllurin er dyggur.

Her er eisini vert at hava í huga, at prestlæran – uttan mun til, hvørt hon er liður í lesnaðinum, ella verður tikin aftaná – kemur inn á millum annað samskifti, sálarfrøði og sosialfak. Førleikakrøvini binda eisini einans ein part av gudfrøðiútbúgvingini (sí partin *“Sóknarprestaembæti – ítøkiliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. Gudfrøðiútbúgving”, annað reglubrot*), so gudfrøðilesandi, sum er hugaður fyri hesum ella øðrum fakøkjum, hevur eisini møguleikar at vinna sær ávísan serkunnleika innan eitt nú samskifti, sálarfrøði ella sosialfak, aftrat klassisku gudfrøðiligu barlastini.

Ynskir fólkakirkjan, umframt siðbundna virkið, at leggja størri dent á øðrvísi sløg av virki og boðan, enn rúm er fyri at fyrireika komandi sóknarprestar til í gudfrøðiútbúgvingini, ber hetta tó væl til, bæði við øktum ella broyttum samvirki við fríu, kirkjuligu felagsskapunum, við at kirkjan í størri mun fíggjar sóknarprestunum omanáútbúgving, ella við at elva kirkjusóknunum til at nýta rúmkaðu heimildirnar í sætta kapitli og skapa fíggjarliga rúmd fyri hesum.

**Sóknarprestaembæti – grundregluliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving**
Førleikakrøvini til teirra, ið kunnu søkja sóknarprestaembæti, eru orðað av nýggjum, nágreinað og lutvís broytt í uppskotinum.

Tá serstøk førleikakrøv verða orðað til sóknarprest, er sum sagt vanligt og natúrligt at taka støði í gudfrøðiútbúgving í egnum landi; meðan ískoytiskrøv við støði í “egnari” útbúgving verða sett gudfrøðingum av universitetum úr øðrum londum. Soleiðis verður gjørt í grannalondunum, meðan summar kirkjur, til dømis hin katólska, hava egnar útbúgvingarstovnar; men av tí at ikki ber til at taka gudfrøðiútbúgving í Føroyum, er neyðugt at finna annað støði undir førleikakrøvunum, sum tó innihaldsliga kann geva samlíkt úrslit.
Avgerandi er at tryggja, at útbúgvingin er vísindalig, og at hon í hóskandi mun er sett saman av fakum, sum eru viðkomandi fyri gerningin sum sóknarprestur í Føroyum.

Grundregluliga mest opni – og, um rætt varð atborið, helst eisini úrslitabesti, liðiligasti og best framtíðartryggjaði – hátturin at tryggja sær, at innihald, góðska og førleikar yvirhøvur eru, nett

sum ynskiligt er, mundi verið at gjørt sum Svenska kyrkan og latið upp fyri øllum útbúgvingum, sum aðrar lutherskar kirkjur viðurkenna sum førleikagevandi, men haraftrat havt umfatandi kirkjuligar, prestlæruligar og gudfrøðifakligar royndir til tess at skjalprógva kravdu fakligu og menniskjaligu førleikarnar. Hetta hevði tó verið ein ómetaliga fakliga og peningaliga krevjandi loysn, sum í roynd og veru als ikki ber til í fámentum samfelag, har gudfrøðideild ikki er á universitetsstigi. – Tað man valla vera av tilvild, at kirkjan í fólkaríkasta Norðurlandinum er hin einasta, ið nýtir slíka skipan.

Uppskotnu førleikakrøvini eru tí hvørki um roynd ella um útbúgving av ávísum lærdum háskúlum, men eru ítøkilig innihaldslig krøv um, hvussu útbúgvingin skal vera samansett. Krøv um, hvørji fak, ið hvussu so er, skulu vera í útbúgvingini, og hvussu nógv í minsta lagi skal vera lisið í einstøku fakunum.
Hetta er rættiliga neyv regluseting, sum tí fyri ein part eigur at verða framd við kunngerð. Uppskot til kunngerð liggur hjá sum fylgiskjal 1.
Líknandi ásetingar eru ikki í lóggávuni í hinum Norðurlondunum, tí tær eru fylgja av, at fortreytirnar fyri at nýta loysnir sum teirra ikki eru til staðar – fyrst og fremst hetta, at ikki ber til at gerast kandidatur í gudfrøði á føroyskum universtiteti.
Hóast hesi førleikakrøvini eru orðað á øðrvísi hátt enn í galdandi løgskipan, er endamálið sostatt grundregluliga at hava samlík førleikakrøv við tey sum galda í dag, samstundis sum fyrilit verður havt fyri ónøgdini, sum hevur verið við, at førleikakrøvini higartil einvíst hava verið tengd at danskari útbúgving.

Felags upprunin og langa felags søgan hjá núverandi fólkakirkjunum í londunum í gamla danskt-norska ríkinum gera, at kirkjurnar í Danmark, Noregi og Íslandi eru serstakliga líkar í mangar mátar. Sum dømi um hetta kunnu vit nevna so at siga felags trúbótina, at donsku og norsku kirkjuordinansirnir frá 1607 settu grundregluliga samlíkar karmar um kirkjuliga lívið. Heilt fram til 1815 bar í hesum londum einans til at lesa gudfrøði við lærda háskúlan í Keypmannahavn, og sambært Norsku Lóg 2.2.1. skuldi tann, sum ikki hevði prógv haðani, standa serstakar royndir har, til tess at kunna gerast sóknarprestur. Hetta hevur gjørt, at kirkjuskipanirnar og kirkjusiðirnir í londunum enn í dag eru grundleggjandi lík. Verkligu frábrigdini eitt nú til Svøríkis eru hinvegin rættiliga skillig, hóast lærugrundarlagið er so at siga eins. Frábrigdi í eitt nú trúbótartilgongd og regluverki hava elvt til hesar munir – og tørvurin hjá kirkjunum verður sum sagt í stóran mun endurspeglaður í undirvísingini á lærdu háskúlunum.

Loysnin, ið skotin verður upp, er tí, at førleikakrøvini eru innihaldsliga myndað eftir tí, sum viðurkendu gudfrøðiútbúgvingarnar í Danmark, Noregi og Íslandi allar geva gudfrøðinginum av amboðslærugreinum og klassiskum gudfrøðilærugreinum; men ikki t.d. eftir gudfrøðiútbúgvingunum úr øllum Norðurlondum, ella øllum grannalondunum.
Við hesum vali verður miðað ímóti at tryggja undir einum, at

- tær gudfrøðiútbúgvingar, sum fara at verða viðurkendar sum førleikagevandi í Føroyum, fara at vera sambæriligar við tær í nevndu londum
- gudfrøðiútbúgvingar, viðurkendar eftir hesum leisti verða viðkomandi fyri virkið sum sóknarprestur í Føroyum, tí at tær eru sambæriligar við tær í nevndu londum
- samstundis verður latið munandi upp fyri gudfrøðiútbúgvingum úr ymiskum londum
- hin lesandi lættliga frammanundan kann vissa seg ítøkiliga um, hvørji førleikakrøvini eru
- hin lesandi hevur ræði at seta stórar partar av útbúgvingini saman eftir egnum ynski
- høga gufrøðiliga støðið, sum í dag eyðkennir fólkakirkjuna, verður varðveitt.

Kanska størstu frambrotini við uppskotnu skipanini eru, at við slíkari skipan ber til frammanundan at síggja svart upp á hvítt, hvørji førleikakrøvini eru, og miða seg rættiliga neyvt eftir tí, og hartil fer at bera til at fáa forhandarmeting av avrikunum higartil; meðan í dag er ilt at siga nett, hvørji krøvini eru, og ikki ber til at fáa myndugleikameting av útbúgvingini, fyrr enn eftir loknan lestur.

Hetta, at mynda førleikakrøvini innihaldsliga eftir viðurkendu gudfrøðiútbúgvingunum í Danmark, Noregi og Íslandi, sum fólkakirkjan í Føroyum hevur felags uppruna við, hevur ein annan fyrimun við sær: kandidatar av lærdu háskúlunum í hesum londunum kunnu fáa serliga lagaliga atgongd at søkja embæti í fólkakirkjuni í Føroyum. Hjá kandidatum úr Danmark verður eingin broyting, meðan kandidatar úr Noregi og Íslandi hereftir einans kunnu vænta at fáa ískoytiskrøv vv latíni. – Til onkur av lestrarskipanunum verður broytt aftur, ið hvussu so er.
Nýggj krøv um lærdan lestur í føroyskum viðurskiftum og um at duga føroyskt koma tó afturat hjá øllum, sí niðanfyri.

Hóast uppskotnu útbúgvingarkrøvini sostatt lata meira upp fyri útbúgvingum úr fleiri londum, skuldi kirkjan tó við hesi loysnini – og serliga við ískoytiskrøvunum um lærdan lestur í føroyskum viðurskiftum – framhaldandi ikki verið fyri munandi, ótilætlaðum árinum frá kirkjusiðum og venjum, ið ikki hava støði í siðvenjuni í kirkjum, meinlíkar fólkakirkjuni í Føroyum.

**Sóknarprestaembæti – ítøkiliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving**
Donsku og norsku gudfrøðiútbúgvingarnar eru 360 ECTS námsstig. Av hesum eru 60 ECTS námsstig í norsku útbúgvingunum markað til praktikum, ið lutvís er skipað starvslæra í kirkjum og lutvís teoretisk viðgerð av hesi á gudfrøðideildini, meðan 30 ECTS námsstig av donsku gudfrøðiútbúgvingini vanliga fara til latín. Aftrat donsku útbúgvingini kemur læra á pastoralseminariet, ið er ein lestrarhálva. Íslendska gudfrøðiútbúgvingin er 300 ECTS námsstig. Eitt lestrarár er sett til 60 ECTS námsstig í fulltíðar lestri.

Við uppskotnu skipanini, sbr. § 1, stk. 2, § 3, stk. 1 og uppskot til kunngerð, fylgiskjal 1 verða krøv sett til á leið tríggjar fjórðingar ella tveir triðingar av yvirskipaðu samansetingini av gudfrøðifakum og amboðsfakum, tað veldst um, hvørt ásetta lestrarskipanin er 5 ella 6 ár. Hesi krøv verða meira nágreiniliga ásett í kunngerð, men eru tó ikki neyvari enn so, at gudfrøðingurin hevur valmøguleikar viðvíkjandi ítøkiligu evnunum innan einstøku fakini, samstundis sum krøvini til samans einans viðvíkja 230 ECTS-námsstigum av 360 ella 300. Við hesum skuldi vandi ikki verið fyri, at innihaldsligu krøvini kunnu føra til, at nakar fær sær eina so serliga fak-samanseting, at gudfrøðiútbúgvingin mestsum einans verður nýtilig í Føroyum.

Skotið verður upp at krevja, at gudfrøðilesturin skal vera "á vísindaligum grundarlagi", sum í hesum høpi merkir, at lesturin skal vera granskingargrundaður eftir alment galdandi góðkenningarskipanunum fyri universitetslesnað, mótsatt øðrum sløgum av bíbliukunnleika, sum t.d. tí lærdómi tú kanst nema á bíbliuskúla.

Hinvegin er, umframt vísindaliga grundarlagið og akademiska støðið, neyðugt at tryggja sær, at í lestrinum verður hóskandi dentur lagdur á lestrarverkevni, sum eru viðkomandi fyri virkið sum prestur í evangeliskt luthersku kirkjuni, sum til dømis lutherska læran og kirkjusøgan. Tí er neyðugt at áseta innihaldsligu krøvini viðvíkjandi lestrarverkevnum meira ítøkiliga, men hesi eru

í so ítøkilig til at vera egnað til at áseta út í æsir í lógini sjálvari, og tí verður skotið upp at áseta tey í kunngerð, sí uppskotið til kunngerð, ið liggur hjá sum fylgiskjal 1.

Víst verður eisini til partin “Hoyring”, har greitt verður frá ymiskum atlitum í sambandi við krøv til amboðsfakini, serliga latín.

Førleikakrøvini eru sostatt orðað, sum tey eru, við tí fyri eyga ein vegin at tryggja framhald og samband við verandi siðvenju, og samstundis lata upp, so at førleikakrøvini ikki longur einvíst eru tengd at teimum donsku.
Tað er tó hvørki sjálvsagt ella neyðugt, at krøvini í føroysku lóggávuni altíð skulu samsvara nett so væl við krøvini í gudfrøðideildunum í øllum gamla danska-norska ríkinum, sum tey gera, nú ið uppskotið verður lagt fram. Rætt hevði ikki verið at bundið føroyskan myndugleika til, einvíst og uttan veruliga, sjálvstøðuga málsviðgerð at fylgja tí, sum myndugleikar í øðrum londum kanska fara at gera seinni; men kirkjupolitiskar grundgevingar kunnu eisini vera fyri, at landsstýrismaðurin eftir ráðføring við biskup og prestafelagið velur at halda fast við ávís førleikakrøv, hóast lestrarskipanin í onkrum landi verður broytt – eisini hóast hetta kan bera við sær, at gudfrøðilesandi onkrastaðni noyðast at vanda sær enn meira um, tá tey seta útbúgvingina saman, um ætlanin er at gerast sóknarprestur her.

Við skipan sum teirri uppskotnu verður neyðugt at seta eina nevnd við fakligum førleika at meta um fakliga innihaldið í útbúgvingunum; men tað verður at lætta munandi um umsitingarbyrðuna hjá nevndini, at skotið verður upp, at landsstýrismanninum verður heimilað at áseta í kunngerð, at gudfrøðiútbúgvingar av lærdum háskúlum í Danmark, Íslandi og Noregi, sum fólkakirkjurnar í viðkomandi landi viðurkenna sum førleikagevandi til sóknarprestaembæti har, verða viðurkendar beinleiðis at geva førleika til at søkja sóknarprestaembæti uttan viðgerð í nevndini.

**Sóknarprestaembæti – førleikakrøv: krav um yrkisútbúgving sum prestur**
Saman við kravinum um vísindaliga gudfrøðiútbúgving verður skotið upp at krevja styttri yrkisútbúgving sum prestur, eins og í galdandi løgskipan. Kravt verður ikki, at yrkisútbúgvingin skal vera frá ávísari kirkju ella úr ávísum landi, uttan at talan skal vera um yrkisútbúgving til at virka sum prestur við evangeliskt lutherska kirkju.
Ráðiligt er ikki at skipa serstaka føroyska yrkisútbúgving, hóast ágóðar høvdu verið av hesum, tí ágóðarnir høvdu á ongan hátt kunnað staðið mát við kostnaðin.

**Sóknarprestaembæti – førleikakrøv: Lært nám í føroyskari kirkjusøgu, -skipan, -siðum og embætisførslu**
Ein nýskipan við uppskotinum er, at skotið verður upp, at nýsettur sóknarprestur skal taka lært nám í føroyskari kirkjusøgu, -skipan, -siðum og embætisførslu, sum galda í fólkakirkjuni, um hann ikki hevur tikið hesi sum lið í kandidatútbúgvingini.
Føroysk gudfrøðiútbúgving og føroysk yrkisútbúgving til prest eru ikki til, og verða valla til. Tí er neyðugt at verja og styrkja bæði tilvitsku um og kunnleika til føroyskan kirkjusið og kirkjuskipan hjá sóknarprestunum á annan hátt, og tí verður hetta skotið upp. Nágreiniligar ætlanir eru ikki gjørdar enn, men ætlandi verður talan um stakgreinalestur á universitetsstigi, svarandi til á leið 30 ECTS-lestrarstig tilsamans. Helst fara lesandi at kunna lata henda lesnaðin ganga heilt ella lutvís inn sum part av sjálvum gudfrøðilesnaðinum uttanlands, men hetta veldst tó um, hvørt viðkomandi gudfrøðideild í hvørjum einstøkum føri velur at góðkenna og avriksflyta lesnaðin her, uttan so at fastar avtalur um hetta verða gjørdar millum Fróðskaparsetrið og viðkomandi lærdu háskúlar.

**Sóknarprestaembæti – førleikakrøv: kunnleiki til føroyskt mál**
Sum nakað nýtt verður skotið upp at krevja, at sóknarprestur, sum ikki hevur føroyskt sum móðurmál, í verki skal vísa, at hann skilir føroyskt, og at hesin innan 2 ár frá starvssetanardegnum skal prógva, at hann í hóskandi mun er førur fyri at orðbera seg skilliga á føroyskum.
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan, men aðalregluliga kravið um danska gudfrøðiútbúgving, sum eisini er í donsku upprunalógini, hevur so at siga henda virknað donskum viðvíkjandi í Danmark. Í Grønlandi er kunnleiki til grønlendskt eitt krav, og t.d. í svenska kyrkoordningen eru “godtagbara kunskaper i svenska språket” millum førleikakrøvini (31. kap., § 2, triði táttur).
Góðar royndir eru eisini av at hava sóknarprestar, ið ikki hava føroyskt sum móðurmál, og tað er gagnligt, at hesin møguleikin framhaldandi verður hildin opin. Ætlanin við kravinum er tí ikki, at sóknarpresturin – heldur ikki við royndini, ið skal verða tikin innan 2 ár – skal duga føroyskt á einum ávísum, neyvt ásettum førleikastøði, men at tryggja, at hann hevur málsligu fortreytirnar til tess at skilja tað, sum sóknarbørnini hava uppá hjarta, og at hann, áðrenn alt ov long tíð er umliðin, eisini er førur fyri at tosa føroyskt so nøkulunda, so at hann, ið hvussu so er, er førur fyri at tosa “gøtu-føroyskt” við tey, ið ikki eru so væl fyri at skilja fremmandamál.
Ikki minst í samskiftinum við børn og ung er tað ein sjálvsagdur fyrimunur, at sóknarprestur skilir og tosar móðurmál teirra.
Havandi í huga, at sóknarprestur noyðist at duga fleiri fremmandamál, til tess at kunna lesa gudfrøði á tí førleikastøði, ið er ásett í § 1, skuldi hetta so dánt at læra móðurmálið hjá teimum, ið tú kennir teg kallaðan til at gerast sálarhirði hjá, ikki verið eitt førleikakrav, ið styggir.
Kravið um at skilja og duga føroyskt verður ikki sett í samband við stutta, tíðaravmarkaða setan, millum annað fyri ikki at leggja forðingar fyri, at sóknarprestar býta um starvsstað nakrar vikur.

**Sóknarprestaembæti – Kallsbræv**
Kallsbrævið er, saman við prestvígsluni, kirkjuliga fortreytin fyri, at gudfrøðingur kann verða settur í starv sum sóknarprestur.

Biskupur prestvígir sóknarprest, tá ið hann hevur fingið sítt fyrsta kall. Í sambandi við prestvígsluna gevur próstur sóknarprestinum kallsbræv/innsetingarbræv (kollats) frá biskupi, sum hann boðar frá og lesir upp undir innsetanargudstænastuni, og tað er við próvhoyringini (sí eisini partin um próvhoyringina), at biskupur endaliga tryggjar sær, at gudfrøðingurin hevur meira enn bert útbúgvingarligu fortreytirnar fyri at gerast sóknarprestur.
Biskupur gevur sóknarpresti kallsbræv, hvørja ferð hann verður settur í ávíst embæti, eisini hóast talan er um at seta prest í fyribilsstarv; men biskupur gevur vanliga ikki kallsbræv, tá frammanundan prestvígdur verður skipaður í starv (“konstitueraður”) styttri skifti.

Kallsbrævið er fortreyt fyri at kunna taka við embæti. Hetta er staðfest í hægstarættardómi 20.06.1862. Men hetta, at biskupur gevur kallsbræv og kann sýta at geva kallsbræv, er ikki einans gamal, samrunnin partur av hirðaligu uppgávum biskups í mun til kirkjuliðini: Sýtir biskupur fyri at geva kallsbræv, forðar hetta fyri, at umsøkjari kann fáa sóknarprestaembæti, og avgerðin um at geva kallsbræv er tí – sæð úr nútíðar fyrisitingarligum sjónarhorni – samstundis ein fyrisitingarlig avgerð í mun til gudfrøðingin. Víst verður til partin um próvhoyring hjá biskupi.

**Sóknarprestaembæti – Próvhoyring hjá biskupi**

Próvhoyringin (“biskupseksaminatiónin”) er royndin, ið biskupur hevur við gudfrøðingi til tess at vissa sær, at hann hevur grundarlag fyri at taka støðu til, hvørt hann vil geva kallsbræv (sí eisini partin um kallsbræv frammanfyri). Tí er neyðugt at tryggja, at karmarnir kring próvhoyringina hjá biskupi í mestan mun eru í samljóði við nútíðar fatan av góðum fyrisitingarsiði, tað vil ikki minst siga, at gudfrøðingurin fær eina skrivliga, grundgivna avgerð.

<u>Nýskipanin viðvíkjandi próvhoyring</u>

Sum nakað nýtt í mun til galdandi lóg og siðvenju verður skotið upp at gera greiniligari ásetingar um próvhoyringina hjá biskupi, og at flyta hana fram, so at hon *kann* verða framd, áðrenn gudfrøðingurin søkir ítøkiligt embæti, og *skal* hava verið, áðrenn biskupur sendir kirkjuráðunum umsóknirnar frá skikkaðu umsøkjarunum at viðgera.

<u>Skipanin við próvhoyring í dag</u>

Skipanin við próvhoyring hjá biskupi gongur heilt aftur til trúbótina. Hon er upprunaliga ásett í kirkjuordinansinum 1537/1539, og nú galdandi í Norsku Lóg 2.3.2, ið skotin verður upp at strika við skiftisásetingunum í hesi lóg; men reglusetingin hevur ikki verið neyv við nútíðar máti. Skiftandi er, hvussu stórur dentur hevur verið lagdur á próvhoyringina, kanska tí at hon ikki er beinleiðis reglusett í nýggjari lóggávu.

Tað vanligasta í danska kongsríkinum hevur í nýggjari tíð helst verið, at biskupur fyrst hevur eina styttri samrøðu við umsøkjaran, áðrenn hann letur kirkjuráðunum umsóknirnar til viðgerðar og vegleiðir tey um umsøkjararnar.

Tá so kirkjuráðini hava gjørt síni tilmæli, gevur biskupur umsøkjaranum, ið ætlanin er at seta í embætið – einar tvær vikur undan framhaldandi eksaminatiónini – eina ella fleiri skrivligar uppgávur at loysa (t.d. at fyrireika prædiku eftir tekstinum til ein ávísan dag, leggja til rættis konfirmantundirvísing, ella viðgera onkran grundtekst á fornmálinum). Harumframt kemur sjálv eksaminatiónin – stutt undan vígslu og innsetan – ið lutvís er munnlig viðgerð av skrivligu uppgávunum, lutvís persónlig samrøða við gudfrøðingin um trúarlæruligu fatanir og embætissýn hansara, umframt um aðrar spurningar, ið á annan hátt benda á, hvussu gudfrøðingurin hevur tikið lærdómin til sín, og hvussu hann menniskjaliga og trúarlæruliga er skikkaður at verða sóknarprestur.

<u>Vansarnir við verandi skipan viðvíkjandi próvhoyring</u>

Við verandi siðvenju er próvhoyringin hjá biskupi í eini truplari støðu í mun til nútíðar fyrisitingarrætt: føst skipan er ikki fyri próvhoyringina, einki krav er um skrivliga tilgongd, og próvhoyringin liggur dygst uppundir evstamark fyri at fremja setanina. Samstundis er avgerð biskups um at geva ella sýta kallsbræv eisini ein fyrisitingarlig avgerð, ið kann fáa avgerandi árin á yrkisleið umsøkjarans. Væntandi verður próvhoyringini tí ikki langt lív lagað afturat, verður hon ikki fingin í frægari samljóð við nútíðar fyrisitingarsið.

Men meira kirkjupolitiskir vansar eru eisini við verandi skipan, tí at hon ikki er broytt í sambandi við, at kirkjuráðini fingu tann formliga leiklut í setanartilgongdini, at tey skulu gera tilmæli um helst tríggjar umsøkjarar: Skuldi tað hent seg, at umsøkjari fyrst er skotin upp sum nummar eitt, og síðani ikki stendur próvhoyringina, hevði hetta gjørt, at øll viðgerðin hjá kirkjuráðunum hevði verið undir skeivum fortreytum. Raðfestingin í uppskotunum hevði kanska verið ein heilt onnur, um hesin nú vrakaði ikki hevði verið millum umsøkjararnar. Havandi í huga, hvussu avgerandi kallingin er í luthersku læruni, verður tað tí mett nógv betur hóskandi, at próvhoyringin er frá

hondini, áðrenn kirkjuráðini fáa umsóknirnar at viðgera. – Eftir mannagongdini í Norsku Lóg kundi hesin trupulleikin ikki koma í, tí tá varð funnið fram til <u>ein</u> umsøkjara, sum kirkjuliðið kundi taka undir við, og hesin fór síðani til próvhoyringar hjá biskupi.

<u>Um nýggja skipan viðvíkjandi próvhoyring</u>
At tikið próvhoyringina av, og harvið mestsum gjørt kallsbrævið til eitt eiti, hevði verið skeivt, tí leiklutur biskups sum sálarhirði sóknarprestanna (pastor pastoribus) og hirði kirkjunnar er ein rættiliga grundleggjandi liður í embætisfatan fólkakirkjunnar, og biskupur hevur tí sjálvsagt rætt og skyldu til at sýta fyri at geva kallsbræv. Og biskupur fær valla frægari skipaðan javngjørdan hátt at útvega sær ta vitan, ið skal liggja til grund fyri avgerðini um kallsbrævið, enn próvhoyringina – ið somuleiðis við broytingini gevur honum betri og javngóðar fortreytir fyri at vegleiða kirkjuráðini um allar umsøkjararnar.

Eftir uppskotinum verður próvhoyringin tí at hava sama innihald sum greitt frá framman fyri, og biskupur fer eisini eftir uppskotinum at hava rættiliga stórt frælsi at velja, nett hvussu hann leggur hana til rættis, tó so at hann kann ikki gera minni burturúr, enn lógin ásetir. Men heilt nýtt er, at próvhoyringin verður nú eitt slag av undangóðkenning – ein fortreyt fyri, at umsókn kann verða tikin til viðgerðar (§ 11) – meðan hon higartil hevur verið ein roynd í seinastu løtu, har biskupur, tá setanartilgongdin so at siga er liðug, tryggjar sær, at komandi sóknarprestur er fakliga, persónliga og trúarlæruliga skikkaður at taka embætið uppá seg, sum hann longu stendur til at fáa.

Eisini er nýtt, at ásett verður í høvuðsheitum, hvørji viðurskifti próvhoyringin er um. Hetta tryggjar, at umsøkjarin veit, hvat ið fer at henda í próvhoyringini.
Eftir nútíðar fyrisitingarreglum eigur umsøkjarin at fáa grundgeving, um biskupur ikki metir seg at fara at kunna geva honum kallsbræv, og umsøkjarin eigur at kunna fáa avgerðina skrivliga. Hetta fer uppskotið at tryggja.
At avgerðin hjá biskupi skal vera skrivlig og grundgivin, fer í sjálvum sær at skapa betri trygd fyri, at próvhoyringarnar koma at vera sambæriligar, og hetta, saman við at próvhoyringin liggur í betri tíð í mun til setanartilgongdina annars, ger, at gudfrøðingurin fær høvi til at umrøða viðurskifti í sambandi við próvhoyringina og niðurstøðuna við biskup aftur, áðrenn ov langt er liðið út í setanartilgongdini.

Við lógaruppskotinum fer at bera til at kæra avgerð biskups um at sýta fyri at geva kallsbræv, men bert í tann mun sum avgerð biskups ikki er grundað á viðurskifti og fyribrigdi, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eru um læru og boðan fólkakirkjunnar, tí slík viðurskifti hevur fyrisitingarmyndugleiki ikki innihaldsligar fortreytir fyri at viðgera – og haraftrat hevði kærumyndugleiki, ið hevði heimild at eftirmeta innankirkjuliga partin av hirðaliga virksemi biskups, í roynd og veru fingið okkurt slag av erkibiskupsmyndugleika, og slíkur er ikki til eftir lutherskari fatan.
Tí verður skotið upp yvirhøvur í § 35, at avgerðir ikki kunnu verða kærdar til verðsliga fyrisitingarmyndugleikan, í tann mun tær beinleiðis ella óbeinleiðis eru um læru og boðan fólkakirkjunnar.

**Sóknarprestaembæti – kirkjuliðini kjósa sær sóknarprest**
Rætindini til, uttanum allar vanligar tilgongdir og flestu førleikakrøv, at kjósa ávísan sóknarprest í serstøkum føri, verða skotin upp at halda fram, so at siga óbroytt (§ 14), hóast skipanin ongantíð hevur verið nýtt her á landi.

Grundgevingarnar fyri hesum eru tvinnar.
Í fyrsta lagi virkar skipanin meira ímyndaliga við til at undirstrika, hvussu avgerandi kallingin er eftir lutherskari fatan, sí eitt nú partin "*Sóknarprestaembætið í mun til kirkjuliðið/kirkjuráðið*" fremri.
Í øðrum lagi er skipanin liður í stovnsligu skipanunum, ið skulu tryggja, at rúmsátt er í fólkakirkjuni, hugsjónar- og trúarlæruliga, so leingi sum bert trúarlæruligu fatanirnar og hugsjónirnar hava støði í lærugrundarlagnum hjá fólkakirkjuni og rúmast innan hetta.
Hinar stovnsligu skipanirnar, ið somuleiðis skulu tryggja, at rúmsátt er í fólkakirkjuni, hugsjónar- og trúarlæruliga innan lærugrundarlagið, eru rætturin til at loysa sóknarband, rætturin til at skipa valkirkjulið, og mannarættindagrundaðu rættindini hjá sóknarpresti til av átrúnaðarligum ávum eitt nú at sýta fyri at hjúnavíga í serstøkum føri.
–Hesar skipanir verða allar lítið nýttar í verki, men hugsjónin er, at tær virka ikki einans í tann mun, tær verða nýttar, men kanska fyrst og fremst við, at møguleikin er til staðar, so at allir partar verða elvdir til at laga seg mest møguliga eftir hvør øðrum, og skipanirnar tí kunnu tykjast óneyðugar.

**Sóknarprestaembæti –setanartilgongd, vígsluloyvi og prestvígsla, setan og innseting**
Vígsluloyvi, prestvígsla, setan og innseting eru talandi dømi um sjáldsama sambandið millum fólkakirkjuna og politiska myndugleikan.

Vígsluloyvi og hetta, endaliga og formliga at seta sóknarprest í starv, eru vanlig fyrisitingarmál, ið politiski myndugleikin avgreiðir, tá ið biskupur og kirkjuráðini hava tikið, ið hvussu so er, høvuðspartin av avgerðini um, hvør ið eigur at verða settur í starv.

Tað er ein rættiliga grundleggjandi liður í fólkakirkjuskipanini her hjá okkum, ið ikki hevur kirkjuting (synodu/eldstaráð) og kirkjustjórn, at fólkakirkjan kann ikki sum slík vera til sum løgfrøðiligur persónur, tí at eingin er, sum einsamallur hevur heimild at tala fyri fólkakirkjuna. Sostatt kann eingin innankirkjulig skipan seta nakran í starv hjá fólkakirkjuni sum slíkari.
Kirkjuliðini á staðnum eru løgfrøðiligir persónar, sum reka kirkjuna á staðnum, og sum kirkjuráðini mynda, eins og Stiftsstjórnin um Kirkjugrunnin rekur verkliga partin av miðsavnaða virksemi fólkakirkjunnar; men uttan mun til, um sóknarprestur hevði verið settur í starv hjá kirkjuliðunum á staðnum ella hjá Kirkjugrunninum, hevði hetta verið ein grundleggjandi broyting av kirkjuskipanini. Tí kann einans landið seta sóknarprestin í starv eftir verandi skipan, men hetta kann einans verða gjørt eftir, at fólkakirkjan eftir fyrisettu mannagongdunum hevur funnið fram til, hvør ið setast skal, og tað er biskupur, ið – sjálvur ella umvegis dómpróst – hevur innihaldsligu starvsfólkaleiðsluna um hendi.

Vígsluloyvið er loyvi til biskup at prestvíga tann, ið skal verða prestur. Vígsluloyvið hevur síðani trúbótina verið avgjørd fortreyt fyri, at biskupur kann fremja prestvígsluna. Einans landsstýrismaðurin kann geva vígsluloyvið, sum søguliga er ein av avgjørdu bindingunum millum politiska myndugleikan og kirkjuna: vígsluloyvi verður einans givið, tá landsstýrismaðurin metir, at hetta sambært tilmæli biskups er neyðugt, tí at tørvur er á at manna sóknarprestaembæti, ella sum ásett í Norsku Lóg 2-3-9: "*Ingen maa til Præste-Embedet indviis, uden hand til noget vist Kald og Embede er kaldet....*".

Vígsluloyvið er fortreyt fyri vígsluni og verður oftast givið í somu málsviðgerð og sama skrivi sum setanin. Tí kemur setanin vanliga áðrenn vígsluna, men hetta nýtist ikki vera so. – Vígsluloyvið er hinvegin fortreyt fyri, at vígslan kann verða framd, so tí verður vígsluloyvi undir

serligum umstøðum givið fyri seg, til dømis tá formligu treytirnar fyri setan ikki eru loknar, men vissa er um, at tær eftir øllum líkindum fara at verða loknar í næstum. – Hetta er oftast, tá okkurt serligt talar fyri, at prestvígslan verður framd, áðrenn til ber at útvega endalig próvskjøl um, at formligu treytirnar eru loknar.

Vígsluloyvi og setan eru sostatt tvær fyrisitingarligar málsviðgerðir hjá landsstýrismanninum. Vanliga eru tær saman, men tær kunnu verða framdar hvør sær – tó so at setan einans kann verða framd, um vígsluloyvi er givið, ella verður givið samstundis. Er vígsluloyvið givið frammanundan, er tað ein nýggj í prinsippinum sjálvstøðug málsviðgerð at taka støðu til setanina.

Vígslan og innsetanin av sóknarpresti eru hinvegin reint kirkjuligar. Vígslan kann tó við verandi kirkjuskipan einans verða framd, eftir at landsstýrismaðurin hevur givið vígsluloyvi, og innsetanin kann við verandi kirkjuskipan einans verða framd, eftir at Mentamálaráðið eftir tilmæli biskups hevur framt endaligu starvssetanina. – Er talan um styttri, tíðaravmarkaða setan, er biskupi tó heimilað at fremja setanina landsstýrismansins vegna.

Vígslan er kirkjulig og hevur tí – hóast vígsluloyvi einans verður givið, tá væntað verður, at setan eisini fer at verða framd – sjálvstøðugt kirkjuligt gildi, frá tí hon er framd, uttan mun til setan.
Vanligasta dømið um, at vígslan hevur sjálvstøðugt gildi uttan mun til setan, er, at tann, sum hevur verið í starvi sum sóknarprestur, framhaldandi stendur undir umsjón biskups, og tí hevur rætt til eitt nú at prædika við hámessu undir egnari ábyrgd og við ábyrgd mótvegis biskupi.
Ein pastor emeritus ella annar fyrrverandi sóknarprestur kann sostatt “missa kragan”, hóast hann kanska langt síðani er farin úr embæti, og harvið eisini missa rættindini at prædika í kirkjuni undir egnari ábyrgd.
Mótsatt er t.d. við gudfrøðilesandi ella ikki-prestvígdum gudfrøðingi, ið uttan mun til formliga fakliga førleikan altíð prædikar í kirkjuni undir ábyrgd sóknarprests (sbr. § 17, stk. 3 og 4 í løgtingslóg nr. 42 frá 26. mai 2008 um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni).

Um so skuldi verið, at sóknarprestur var settur tíðaravmarkað við serligum treytum – til dømis at førleika- ella bústaðarkrøv skulu verða lokin innan ásetta tíð – men ikki leyk treytirnar, hevði ikki borið til, at latið hann hildið fram, ella at sett hann í starv sum sóknarprest aftur eftir vanligu mannagongdunum, fyrr enn hann leyk treytirnar. Prestvígslan hevði tó framvegis verið roynveruleiki – prestvígdi hevði (eins og allir aðrir prestar, ið ikki eru í starvi) kunnað havt gudstænastur o. a. í kirkjuni undir egnari ábyrgd mótvegis biskupi, hóast tað ikki hevði borið til at sett hann í starv.

Setanin er sum nevnt ein fyrisitingarlig avgerð, tó at landsstýrismaðurin ikki kann velja millum uppskotnu umsøkjararnar, um kirkjuráðini eru samd (ella, í prestagjaldi har eittans sóknarprestaembæti er, um tveir triðingar av atkvøðunum eru fyri at seta viðkomandi), og heldur ikki kann hann seta umsøkjara, sum kirkjuráðini ikki hava mælt til. Eisini í nevndu førum er talan um eina veruliga, fyrisitingarliga avgerð, hóast hon fyri stóran part er bundin, tí at avgerðin um setanartreytir og –kor er fyrisitingarlig burturav.
Setanin gevur starvssetta øll vanligu starvsfólkarættindini frá teirri løtu, hon hevur gildi; men skuldi okkurt komið upp, so at biskupur sá seg noyddan at taka aftur tilsøgnina um at prestvíga tann, sum settur er í sóknarprestaembætið, hevði hann uttan mun til setanina í starv sum sóknarprestur ikki kunnað virkað sum sóknarprestur, og eiheldur kunnað hildið einstaka

gudstænastu undir egnari ábyrgd í tíðarskeiðnum, til starvssetanin var endað aftur, tí tað eru prestvígslan og kallsbrævið, ið hava kirkjuligt gildi.

**Annar prestur (kapittul 2)**
Skotið verður upp at regluseta neyvari møguleikan, sum er heimilaður í § 8 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum, at við góðkenning landsstýrismansins ber til at skipa og seta onnur sløg av prestaembætum enn vanlig sóknarprestaembæti (§ 9, stk. 1 og 2), og eisini at velja øðrvísi setanarhættir. Hetta hevur eisini borið til við galdandi skipan, tó í flestu førum uttan staðiliga heimild. Í sambandi við at málsøkið er yvirtikið, er tryggast at regluseta siðvenjurnar meira ítøkiliga í mun til føroysk viðurskifti, so hesar serskipanir framhaldandi kunnu fáa á leið somu rúmd sum higartil.

Í § 15 verður skotið upp at heimila at seta prest í tænastu hjá føroyingum uttanlands, ella til at røkja serliga tænastu innlendis. Ásetingin tekur afturíaftur samsvarandi ásetingarnar í § 8 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum, og í § 17 verður heimilað at áseta greiniligari umsitingarreglur hesum viðvíkjandi í kunngerð.

Í § 16 verður skotið upp at heimila, at prestur, sum er í starvi hjá fríum, kirkjuligum felagsskapi, og granskari, sum er í starvi í Føroyum at granska og undirvísa í føroyskum kirkjuviðurskiftum, kunnu verða prestvígdir. Treytirnar eru, at hesir lúka vanligu førleikakrøvini, og at kirkjuliðini í einum prestagjaldi játta at vilja hava viðkomandi sum atknýttan, óløntan hjálparprest, ta tíð hann er í viðkomandi starvi.
Siðvenjan at prestvíga gudfrøðingar við lærdu háskúlarnar, og siðvenjan at prestvíga prest í starvi hjá fríum kirkjuligum felagsskapi, sum er reglusett í kongligari kunngerð frá 1921, eru aldargamlar, um enn tær í besta føri ikki eru í fullum samljóði við ásetingarnar í Norsku Lóg 2.3.9: "*Ingen maa til Præste-Embedet indviis, uden hand til noget vist Kald og Embede er kaldet....*", og kirkjurættarfrøðingar hava eisini í øldir ávarað ímóti hesum. – At hesar siðvenjurnar, hóast formligar vansar og áhaldandi ávaringar frá kirkjurættarfrøðingum, kortini støðugt hava verið hildnar uppi – um enn eitt sindur skiftandi, og altíð í avmarkaðan mun – kundi bent á, at ein ávísur kirkjuligur tørvur *er* á, eisini at hava prestar sum hesar innan karmar fólkakirkjunnar, og harvið undir umsjón biskups.
Verkligi týdningurin er helst avmarkaður, men serliga av ímyndaligum ávum kann eitt ávíst virði liggja í, at sambandið millum kirkjuna og gudfrøðilesnað og millum kirkjuna og frían kirkjuligan felagsskap á henda hátt verður gjørt ítøkiligt.

At kirkjuráðini í onkrum prestagjaldi skulu játta at vilja hava prest í starvi hjá fríum kirkjuligum felagsskapi sum atknýttan, óløntan hjálparprest, er nýggj fortreyt í mun til kongligu kunngerðina frá 1921; men hetta at víga til mestsum súmbolska, sera avmarkaða skyldu at veita tænastu í ávísum prestagjaldi hevur í mongum førum verið nýtt, tá danir hava prestvígt til annað enn lønt sóknarprestaembæti.
At stovnsprestur verður knýttur at kirkjuliði umframt, ger, at henda serskipanin verður eitt sindur meira átøk vanliga sóknarprestaembætinum, og tað verður meira eyðskilt, at grundregluliga er talan um prest í fólkakirkjuni á sama *hátt* sum hinir, hóast hesin ikki er *sóknar*prestur í sama *mun* sum hinir.

Ein munur millum embæti eftir øðrum kapitli og "vanlig" sóknarprestaembæti eftir fyrsta kapitli er, at meðan eitt "vanligt" sóknarprestaembæti grundregluliga bara skal verða mannað aftur, tá tað av fyrstan tíð er skipað – uttan so at serstøk avgerð verður tikin um at leggja embætið niður,

ella skipa tað um – so ber ikki til at skipa føst embæti eftir øðrum kapitli. Talan er í hvørjum einstøkum føri um eina heilt nýggja avgerð, tá spurningurin verður reistur, eisini hóast talan er um embæti, ið onkur beint er farin úr.

**Próstaembæti (kapittul 3)**
Próstur er sambært § 9 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum sóknarprestur, ið er innsettur at røkja próstaembæti umframt. Próstur hevur lutvís egnar embætisuppgávur, men stuðlar eisini biskupi í embætisvirksemi hansara eftir avgerð biskups.

Til dømis sýnar próstur kirkjur og kirkjubøkur, og hann leggur til rættis, so at prestur er tøkur, eisini tá feriur eru, tá prestur hevur forfall, ella størv eru ósett. Próstur er fyrisitingarligt millumlið millum prestar, kirkjuráð og biskup og er føddur limur í próstadømisráðnum.

Serstøk vígsla er ikki til próstaembætið, men biskupur innsetir próst eftir serligum rituali.

Sum er, er dómpróstaembætið einasta próstaembætið í landinum. Dómpróstur røkir sostatt, sum er, allar próstauppgávurnar; men sambært § 5, stk. 1 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum skipar landsstýrismaðurin prestagjøldini í próstadømi eftir tilmæli frá biskupi. Tí ber formliga til at skipa eitt ella fleiri próstaembæti umframt dómpróstaembætið, um hetta er ynskiligt, og tí skal eisini bera til at manna próstaembæti, eins og við heimild í nú galdandi løgskipan.
Eftir talinum av kirkjusóknum og sóknarprestaembætum kundi verið natúrligt, um próstadømini vóru 2 ella 3, men sum er, eru ikki ítøkiligar ætlanir um nakra umskipan.

Verða fleiri próstadømi skipað, verða próstadømisráðini samstundis fleiri, og tí skal kirkjuskatturin verða lutaður út til próstadømisráðini, áðrenn próstadømisráðini kunnu góðkenna fíggjarætlanirnar hjá einstøku kirkjuráðunum. Tí er ráðiligast, at áðrenn býtt verður upp í próstadømi, verður lógin um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar (Løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007) broytt, so at aðalreglur fyri, hvussu býtislykilin í kirkjuskattinum millum próstadømini skal vera, verða lógarásettar . Annar møguleiki er, at skipanin verður løgd um.

Stórur partur av uppgávunum, sum próstur røkir, eru slíkar, sum hann røkir vegna biskup. Tí hevði eisini borið til hjá biskupi at lagt part av t.d. arbeiðsleiðsluligu uppgávunum til annan prest – ella til ávíst sóknarprestaembæti – heldur enn at skipa fleiri próstadømi. Slík avhending hevði ikki kravt serstaka heimild, biskupur kann gera hetta sum lið í arbeiðsleiðslu síni.

Í samljóði við serstøku viðmerkingarnar um § 9 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum verður skotið upp, at próstaembæti kann verða knýtt at einumhvørjum sóknarprestaembæti í próstadøminum, ella við øðrum orðum at tað ikki – sum dómpróstaembætið – skal vera tengt at ávísum sóknarprestaembæti.

**Próstur, setanartilgongd**
Í framhaldi av at próstaembætið ikki verður tengt at ávísum sóknarprestaembæti, men kann verða tengt at einum og hvørjum sóknarprestaembæti í próstadøminum, verður innankirkjulig orsøk ikki til, at kirkjuráðini hava ein formligan leiklut í setanartilgongdini. Sóknarprestur í prestagjaldinum er hin sami, uttan mun til, um próstaembætið verður álagt sóknarpresti at røkja umframt. Tí verður ikki skotið upp, at kirkjuráð virka við í setanini, men at biskupur ger landsstýrismanninum tilmæli um, hvør av sóknarprestunum skal fáa hetta embætið at røkja umframt.

Hetta er ein størri broyting í mun til ásetingina í galdandi løgskipan, ið ásetir, at tað skuldu verið øll kirkjuráðini í próstadøminum – við øðrum orðum trúliga eini 20 til 30 kirkjuráð (helst einir 100-200 kirkjuráðslimir), alt eftir hvussu próstadømini verða skipað – ið skuldu gjørt biskupi raðfest ummæli av umsøkjarunum til próstaembæti.

Kirkjupolitiskt ber til at grundgeva fyri, at leikfólkini eiga at hava ávirkan á, hvussu øll embæti í kirkjuni verða sett, men próstaembætið er ikki í sjálvum sær eitt hirðaligt embæti við egnum hirðaligum heimildum og skyldum, eins og sóknarprestaembætið og biskupsembætið – javnber eisini, at próstur verður insettur, serskild próstavígsla er ikki.
Próstur hevur sjálvstøðugar *fyrisitingarligar* uppgávur í mun til kirkjurnar og kirkjubøkurnar, men tær uppgávur, hann røkir viðvíkjandi kirkjuliðunum og sóknarprestunum, røkir hann vegna biskup.

Verkliga hevði verið óarbeiðsligt at havt eina setanartilgongd, sum fleiri enn 100 fólk skuldu havt virknan leiklut í.

Galdandi skipan (ið sum sagt ongantíð hevur verið roynd í verki) hevði eisini havt tann veikleika, at kirkjuráðini í prestagjaldinum ikki høvdu havt formligan møguleika fyri at hava avgerandi ávirkan á ummælini til biskups, tí tey høvdu altíð verið ein minniluti av teimum tilmælandi. Tað høvdu við øðrum orðum ikki verið kirkjuliðini í prestagjaldinum, men kirkjuliðini í próstadøminum, sum høvdu kallað henda sóknarprestin, ið hóast hetta skuldi verið sóknarprestur fyrst og fremst, og røkt próstaembætið umframt. Hetta hevði ikki verið í góðum samsvari við kallsrættin hjá kirkjuliðnum.

Við frammanfyri standandi grundgevingum verður skotið upp, at gingið verður frá skipanini í galdandi løgskipan, og at uppskotna skipanin – at próstaembætið ikki er eitt sjálvstøðugt embæti, tengt at einum ávísum kalli, men eitt embæti, ið kann skifta millum sóknarprestaembætini í próstadøminum - verður sett í staðin.

**Próstur og dómpróstur, førleikakrøv**
Dómpróstur er næstur biskupi í tign, og fasti avloysari biskups. Berst dómprósti frá, røkir próstur biskupsembætið fyribils. Siðvenja er eisini, at biskupur í ítøkiligum førum kann leggja prósti týðandi partar av biskupsembætinum at røkja sína vegna, og próstur hevur javnan samskifti við allar sóknarprestarnar.
Tí er rímiligt, at førleikakrøvini, sum verða sett dómprósti og prósti, eru nett tey somu, sum sett verða biskupi, serliga hetta at sóknarprestur skal hava vunnið sær royndir og neyvt innlit í føroysk kirkjuviðurskifti, áðrenn hann kann taka hægri embæti upp á seg.

**Dómpróstur**
Lógin um fólkakirkjuna í Føroyum ásetir í § 10, at próstur við dómkirkjuna er dómpróstur og varamaður biskups.
Dómpróstur er kirkjubókaførandi sóknarpresturin við dómkirkjuna, og umframt serligu uppgávuna sum fasti varamaður biskups hevur hann umsjónina við kirkjunum og kirkjubókaføringini. Harumframt røkir hann aðrar uppgávur vegna biskup eftir avgerð hansara.
Eitt nú er fast, at dómpróstur fremur part av arbeiðsleiðsluni vegna biskup, við at hann leggur til rættis frítíðir, og tryggjar, at einki prestagjald er reiðiliga í prestloysi, tá forføll og frítíðir eru.

**Dómpróstur, setanartilgongd**
Eftir galdandi løgskipan er setanartilgongdin at seta dómpróst átøk setanartilgongdini, tá sóknarprestur verður settur, tó við teimum avgerandi frábrigdum, at biskupur ikki er bundin av ummælinum hjá kirkjuráðunum, og at landsstýrismaðurin ikki kann seta umsøkjara, ið biskupur ikki hevur mælt til. Skotið verður upp, at skipanin heldur fram so at siga fullkomiliga óbroytt.

**Biskupur (Kapittul 4)**
Í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum er ásett í §§ 11 og 12 um biskup, at hann er sóknarprestur, sum umframt orðsins tænastu hevur fingið litið til evstu umsjón og umsorgan við biskupsdøminum, og er vígdur til hesa tænastu, at biskupur hevur umsjón við kristniboðanini og sakramentunum, at tey verða umsitin sambært læru og fyriskipan fólkakirkjunnar, og endiliga at hann hevur umsjón við sóknarprestunum og embætisførslu teirra.
Hetta er ein samandráttur av innankirkjuliga partinum av embætisuppgávum biskups, sum tær eitt nú eru ásettar í kirkjuordinansinum frá 1537/39, í Norsku Lóg, og í ritualinum til biskupsvígslu, men harumframt hevur biskupur, bæði beinleiðis embætisins vegna og sum føddur formaður í Stiftsstjórnini, nógvar meira ítøkiligar ábyrgdir og heimildir viðvíkjandi leiðslu fólkakirkjunnar, og biskupur hevur um hendi formliga samskiftið millum kirkjuna og landsins myndugleikar og leiðbeinir teir í spurningum um læru og siðvenju fólkakirkjunnar.

Eins og sóknarprestaembætið er biskupsembætið eftir lutherskari fatan fyrst og fremst ein verklig fyriskipan, ið ikki hevur serstakt átrúnaðarligt gildi, men biskupsembætið verður mett neyðugt, ikki minst til tess at halda skil á, ella sum sagt verður um biskupar og próstar í innganginum til donsku umsetingina frá 1539 av kirkjuordinnansinum, ið í fyrstu atløgu (í 1537) var skrivaður á latíni: “*At der maa wære saadanne, som kunde holde tienerne wed deris embede, oc see til med, at alle ting maa alle wegne gaa skickelig oc ret til*”. Orðið “biskupur” stavar frá grikska orðinum “episkopos”, sum merkir umsjónarmaður, og biskupur verður vígdur til prestatænastu, ið bæði innihaldsliga og landafrøðiliga røkkur út um virksemi sóknarprestaembætisins.

Í Danmark verður formliga hildið fast við, at biskuparnir eru starvsbrøður, at biskuparnir í ymisku stiftunum eru javnsettir, og at harvið er eingin evsti leiðari í fólkakirkjuni. Grundregluliga er sama galdandi her, tó at tann veruleiki, at Føroyar er eitt biskupsdømi, og Føroya biskupur sostatt ikki hevur starvsbrøður, eyðvitað í roynd og veru skeiklar støðuna nakað. Grundregluliga hevur sostatt heldur ikki biskupur heimild at tala kirkjunnar vegna, men hinvegin hevur hann sum hirði og umsjónarmaður skyldu til bæði at tala og at tala at.
Biskupur hevur sambært § 12 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum sum sagt umsjón við kristniboðanini og sakramentunum, at tey verða umsitin sambært læru og fyriskipan fólkakirkjunnar, og hevur umsjón við sóknarprestunum og embætisførslu teirra. Hann er sostatt bundin av lærugrundarlagnum, eins og sóknarprestarnir, og hevur skyldu til at verja breiddina í fólkakirkjuni.
Havandi í huga heilt serstøku støðuna, sum er komin í, av at eittans biskupsembæti er í fólkakirkjuni í Føroyum, áliggur biskupi á serstakan hátt at hava fyri eyga at verja breiddina í fólkakirkjuni, tí at sóknarprestar og kirkjufólk hava ikki annan biskup í kirkjuskipanini at venda sær til, ella meta støðu sína upp móti.

**Um førleikakrøv til biskupsvalevni**
Skotið verður upp, at biskupsvalevni grundregluliga skal lúka somu førleikakrøv sum sóknarprestur, men at hann hartil skal hava, ið hvussu so er, seks ára starvsroyndir sum

sóknarprestur í Føroyum, ella at hann á annan hátt kann skjalprógva, at hann hevur samsvarandi innlit í føroysk kirkjuviðurskifti.
Kravið um 6 ára starvsroyndir sum sóknarprestur í Føroyum skal tryggja, at biskupsvalevni og próstur altíð hava eitt grundleggjandi, djúptøkið innlit í kirkjuviðurskiftini í landinum. Kravið hevur serliga stóran týdning, av tí at ikki ber til at lesa gudfrøði í Føroyum, meðan bert eitt biskupsembæti og eitt próstaembæti eru í landinum. Fatanir og áskoðanir teirra, ið røkja embætini, kunnu tí ávirka kirkjuna í størri mun, enn um talan hevði verið um fjølmentari kirkju, við samsvarandi meira fleirstreingjaðari innankirkjuligari leiðslu.

Samstundis verður skotið upp, at biskupsvalevni – eins og próstur – skal hava lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu.

**Um biskupsval**
Skotið verður upp, at skipanin við biskupsvali grundregluliga heldur fram sum higartil.

Smærri tillagingar verða skotnar upp í valtilgongdini, so at biskupur kann verða valdur í fyrsta valumfari, hóast minni enn helvtin av atkvøðunum eru fyri honum, um hann hevur fingið nógv flestar atkvøður. Hetta verður tó treytað av, at einki av hinum valevnunum hevur fingið stórt meira enn helvtina av atkvøðutalinum, sum hann hevur fingið.

**Bústaðarskylda hjá sóknarprestum, prósti og biskupi (Kapittul 5)**
Skotið verður upp, at bústaðarskyldan heldur fram á leið sum higartil. Kortini verður skotið upp at áseta greiniligari reglur fyri, nær biskupur kann loyva, at vikið verður frá bústaðarskylduni.

Skipanin við at sóknarprestur býr í prestagjaldinum er fyrndargomul. Til dømis er fyrisett í Norsku Lóg 2-12-1, at "*Præsterne skulle boe i deris Sogne og hos deris betroede Menigheder og i deris rette Præstegaarde...*". Parochial–rætturin, sum er meginreglan um, at kirkjufólk hoyrir til ávísa kirkjusókn, hevur rætt til tænastu í kirkjuni á staðnum og skal vita, hvønn sóknarprest tey kunnu venda sær til; men at kirkjufólkið av tí sama hevur skyldu til at gera sítt til at halda kirkjusóknini og prestaembætinum uppi, er tó meira enn 1000 ár eldri, tí hon gongur líka aftur til Konstantin Mikla.

Metingin er framvegis, at skylda sóknarprests at búgva í prestagjaldinum er ein av týðandi fortreytunum í bygnaði fólkakirkjunnar. Sum dømi kann verða nevnt, at í 1990 var í donsku skipanini lagdur størri dentur á bústaðarskylduna, tá lóggivið var beinleiðis um prestagarðarnar fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð við somu orðing sum í § 17 í galdandi løgskipan. Samsvarandi hesum hava danir síðani útvegað prestagarðar til fleiri embæti enn áður, og málið er sambært lógarviðmerkingunum, at prestagarðar skulu vera til øll sóknarprestaembæti, uttan tey serstøku, so sum fongsuls- ella sjúkrahúsprestaembæti.

Grundgevingin fyri at leggja stóran dent á bústaðarskylduna er sum sagt ikki atlit at sóknarpresti, men atlit at tørvinum hjá kirkjuliðinum/einstaka sóknarbarninum at kunna hava persónligt samband við sóknarprest. Prestagarðurin og bústaðarskyldan eru millum annað við til at tryggja, at sóknarprestur á sjónligan hátt er til staðar í prestagjaldinum, millum kirkjufólkini, ið hann er hirði hjá.
Hevði uppgávan hjá sóknarpresti einans verið at halda gudstænastu, at veita kirkjuligar tænastur og føra kirkjubøkur, kundi hann so at siga búð, hvar tað skuldi verið, men ilt er at ímynda sær ein hirða, ið ikki hevur støðugt, ítøkiligt og dagligt samband við "fylgið".

Eftir § 19 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar eigur og rekur Kirkjugrunnurin, sum Stiftsstjórnin stjórnar, prestagarðarnar.

**Valkirkjulið**
Valkirkjulið hevur ikki verið í Føroyum, men í sambandi við viðgerðina av Løgtingslóg nr. 42 frá 26.05.2008 komu nógvar viðmerkingar við ynski um at varðveita henda møguleika, til tess at tryggja rúmd í kirkjuni. Kirkjulóggávan verður tí øll smíðað soleiðis, at ikki verður neyðugt at gera tillagingar, um valkirkjulið verður stovnað.
Í hesum lógaruppskoti eru ásetingar viðvíkjandi valkirkjuliðum í § 14, stk. 1 og § 23.

Í partinum "Sóknarprestaembæti – kirkjuliðini kjósa sær sóknarprest" verður greitt frá skipanunum, ið tryggja rúmdina í kirkjuni.

**Kirkjutænari og hjálparfólk (Kapittul 6)**

Grundregluliga er endamálið við uppskotinum at halda fast við somu meginreglur sum higartil: at politiski kirkjumyndugleikin – burtursæð frá kørmunum, sum verða ásettir við lóg og kunngerðum – ikki hevur nakran leiklut í avgerðunum um, hvørji onnur størv enn prestaembæti skulu vera í kirkjuni.
Hvussu hesi verða raðfest, verður framhaldandi ein innankirkjuligur spurningur.
Eitt endamál við uppskotunum á hesum øki er at tryggja líkindini fyri, at fólkakirkjan, hvat størvum viðvíkur, í mest møguligan mun varðveitir eyðkennini, ið hon hevur í dag, og serliga hetta, at grundregluliga øll onnur tænasta í kirkjuni enn prestagerningurin er sjálvboðin; men hinvegin skal eins og í dag í avmarkaðan mun bera til at seta onnur størv, og at samsýna fyri tænastur.

Kirkjan hevur – serliga í stóru kirkjusóknunum – seinastu mongu árini notið gott av, at tað í størri mun eru útbúnir urguleikarar, ið hava tað tónleikaliga um hendi. Higartil er tó eingin settur í veruligt starv sum urguleikari, talan hevur verið um samsýnta tænastu. Tá virksemið sum urguleikari t. d. tekur upp móti hálvari tíð, er skipanin við samsýntari tænastu valla nøktandi, tí urguleikarin fær ikki starvsfólkarættindi, so sum rætt til frítíð, løn undir sjúku, eftirlønargjald, og so framvegis. Ynskiligt hevði verið at fingið skipað viðurskifti í slíkum førum. Hinvegin er virksemið – sjálvt í størstu kirkjusóknunum – ikki størri enn so, at grundarlag valla kann vera fyri at stovna fleiri fulltíðarstørv. Tí kundi verið hugsandi, at ein partur av tørvinum hjá bæði fólkakirkjuni og hjá urguleikarunum kundi verið loystur betur, um fólkakirkjan gjørdi sáttmálar við til dømis musikkskúlaskipanina um at seta urguleikarar í starv til at virka í bæði musikkskúlaskipanini og kirkjuni.
Hinvegin skapa verandi viðurskifti við samsýningum fyri tænastur møguleikar fyri, at fleiri urguleikarar sleppa framat, og lata sostatt upp fyri størri fjølbroytni, enn um tørvur kirkjunnar á urguleikarum í størst møguligan mun verður nøktaður við (parttíðar) starvssetanum.

Tað er ein sannroynd, at sum samfelagsgongdin er, er kanska ikki hugsandi, at til dømis øll reingerð í stóru kirkjusóknunum kann vera sjálvboðin. Har koma nógv fólk í kirkjuna, og sumt byggitilfar er so serligt, at sjálvt vanliga reingerðin í ávísan mun kann krevja servitan.

Bæði viðvíkjandi urguleikarum, og tá um onnur starvsfólk ræður, er tó neyðugt at hava fyri eyga, at bert fá størv aftrat kunnu broyta kirkjuna rættiliga avgerandi: Sóknarprestaembætini eru einans

23, og tí skulu ikki so nógv onnur størv koma afturat, áðrenn tey fáa munandi ávirkan á, hvussu kirkjan virkar – og tað ikki einans kostnaðarliga.
Tí er ráðiligt at miðsavna avgerðarheimildina um at seta størv, og skotið verður upp at gera hetta soleiðis, at kirkjuráðini – stóru kirkjusóknirnar hvør sær, og fleiri smáar kirkjusóknir saman – kunnu heita á ávíkavist Próstadømisráðið og Stiftsstjórnina um at taka avgerð um at veita størri samsýning ella at seta størv.

Aðrar grundgevingar fyri at miðsavna avgerðarheimildirnar viðvíkjandi starvssetanum og meira umfatandi samsýningum eru, at siðvenjurnar skulu vera sambæriligar kring landið, og at tey starvandi fáa samlíkar skyldur og sømdir, sum tey skulu.
Hyggja vit eftir gongdini í Danmark, er líkt til, at starvsfólkatal og útreiðslur hjá kirkjusóknunum hava verið í vøkstri, meðan illa stendur til við trivnaðinum hjá hesum starvsfólkabólkum í mun til meðal í landinum. Partur av frágreiðingini er givið, at talan er um krevjandi og fjølbroyttar uppgávur, men ein onnur orsøk er uttan iva, at kirkjuráðini eru ikki skipanarliga væl fyri at røkja arbeiðsgevaraleiklutin, og størvini eru so fá, at kirkjuráðini altíð verða at hava fáar royndir á økinum.
Hóast mett verður, at stórir fyrimunir kunnu vera við, at avgerðarheimildirnar viðvíkjandi starvsfólki verða miðsavnaðar, er ætlanin við uppskotinum tó samstundis at tryggja, at eingin fyriskipan kann vera í kirkjusóknini, uttan at kirkjuráðið ynskir hana og tekur undir við henni.

Umframt hetta verður skotið upp at áseta ávísar nýggjar umsitingarreglur, kirkjutænarum og hjálparfólki viðvíkjandi. Skotið verður upp, at

- øll uttan urguleikarar skulu vera limir í fólkakirkjuni, men at biskupur kann loyva fráviki
- at øll skulu vátta við trú og heiður at vilja inna starvið í trúskapi móti lærugrundarlagi fólkakirkjunnar
- at kirkjutænari og hjálparfólk í øllum virki í kirkjuni ella fyri kirkjuna eru fevnd av ásetingunum í áttanda kapitli í fyrisitingarlógini, sum er um tagnarskyldu og varlætisatlit annars.

**Størv hjá Stiftsstjórnini (Kapittul 7)**
Í mun til galdandi lóg verður skotið upp at flyta heimildirnar viðvíkjandi starvsfólkunum hjá Stiftinum frá landsstýrismanninum í kirkjumálum til Stiftsstjórnina, sum í dag fremur hesar hansara vegna. Samstundis verður skotið upp, at Stiftsstjórnin, mótsatt almennum stovnum, sjálv fær allan setanarmyndugleikan yvir egnum starvsfólkum. Men Stiftsstjórnin verður tó bundin til at fylgja almennu sáttmálaviðurskiftunum, so at starvsfólkini fáa samsvarandi setanarkor, sum um tey vóru alment sett.

Við lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar fekk fólkakirkjan meira fíggjarligt sjálvræði í mun til landið. Føroya Stift bleiv ein sjálvstøðug fíggjar- og fyrisitingareind við kirkjugrunni og einum tiltaksgrunni, ið tilsamans í ávísan mun kunnu samanberast við danska "fællesfonden", men meðan danska kirkjumálaráðið varðar av danska "fællesfonden" varðar Stiftsstjórnin (ikki landsstýrismaðurin) av Kirkjugrunninum og Tiltaksgrunninum. Uppskotið er tí í betri samsvari við hesa nýskipan.
Av tí at lønarútreiðslurnar til starvsfólkini hjá stiftinum (mótsatt útreiðslunum til prestalønir) á ongan hátt kunnu ávirka stuðulin frá landinum, er betri samsvar millum gjald og vald, um Stiftsstjórnin, ið eisini varðar av Kirkjugrunninum og Tiltaksgrunninum, hevur endaligu ábyrgdirnar og heimildirnar viðvíkjandi egnum starvsfólki.

**Umsitingarreglur**
Skotið verður upp at áseta, at reglurnar í fyrisitingarlógini um gegni, skjalainnlit partanna, partshoyring og tagnarskyldu v.m. skulu galda fyri setanartilngongdir eftir lógini.

Eisini verður skotið upp, at avgerðir ikki kunnu verða kærdar, í tann mun tær eru um læru ella boðan fólkakirkjunnar. Ikki ber til at lata øðrum myndugleika heimild at eftirmeta innankirkjuliga partin av avgerðum biskups, uttan at viðkomandi myndugleiki samstundis hevði fingið okkurt slag av erkibiskupsmyndugleika.

**Hoyring**
(Hesin parturin verður bygdur út, so hvørt sum viðmerkingar koma inn í sambandi við almennu hoyringina)

Um latín sum kravt amboðsfak
Umframt spurningin um, hvussu førleikakrøvini til sóknarprestar grundregluliga verða sett saman, er spurningurin um, hvørji krøv verða sett viðvíkjandi amboðslærugreinini latíni, tann spurningurin sum higartil tykist hava havt størstan áhuga millum manna. Mentamálaráðið hevur tí longu fingið fleiri fyribils viðmerkingar um uppskotið um at krevja annaðhvørt 30 ECTS-námsstig ella hástig A av miðnámi í latíni.
Tey sum meta, at ikki er rætt at krevja annaðhvørt 30 ECTS-námsstig ella hástig A av miðnámi í latíni, grundgeva í høvuðsheitum við, at
- hetta er í andsøgn við aðalregluna um at laga krøvini til, so at allar viðurkendu útbúgvingarnar í gamla dansk-norska ríkinum (tá serstøku, føroysku námini eru tikin aftrat) geva beinleiðis atgongd til at søkja embæti her
- Rímiligt lutfall er ikki millum krøvini viðvíkjandi latíni (30 ECTS-stig) og krøvini viðvíkjandi hebraiskum og grikskum (10 og 20 ECTS-námsstig ávíkavist), ið jú eru upprunamálini, ið bíblian er skrivað á, meðan eingin partur av bíbliuni upprunaliga er skrivaður á latíni
- Kravið um 30 ECTS-stig í latíni skapar trupulleikar fyri lesandi úr Íslandi, Noregi og Bretlandi so at í roynd og veru hava einans lesandi við teimum báðum viðurkendu donsku gudfrøðiútbúgvingunum lætta atgongd til at søkja embæti eftir nýggju førleikakrøvunum
- Tað tykist margháttligt, at ein luthersk kirkja skal leggja so stóran dent á latín havandi í huga, at eitt av aðalmálunum við trúbótini var boðanin á móðurmálinum
- Krav sum hetta er í andsøgn við rákið, sum hevur verið seinastu rættiliga nógvu árini innan útbúgving av prestum í nógvum londum, heldur at leggja dent á amboðslærugreinar, ið stuðla uppundir boðan og virki sóknarprests, enn á akademiska partin av útbúgvingini einans. Talan er til dømis um at leggja størri dent á hitt prestlæruliga, og at leggja til dømis sálarfrøðiligar, sosialfakligar og samskiftisfakligar lærugreinar afturat.

Serliga til hetta seinsta er at siga, at um og hvussu stór rúmd skal vera fyri latíni ella til dømis sálarfrøðiligum, sosialfakligum og samskiftisfakligum lærugreinum í gudfrøðilestrinum, veldst – á umleið sama hátt sum viðvíkjandi hebraiskum og grikskum – um, hvussu vit hugsa okkum, at presturin skal virka. At bera boðskapin og vera sálarhirði, eru sjálvandi høvuðsstørvini, men á hvørjum grundvølli og við hvørjum amboðum hetta verður gjørt, veldst í stóran mun um, hvat verður valt at leggja dent á í gudfrøðiligu útbúgvingini, tí allir nevndu førleikarnir eru viðkomandi. Víst verður eisini til partin “*Sóknarprestaembæti – atlit, tá førleikakrøv verða sett*”

Kunnleiki til upprunamálini er ein avgerandi førleiki, til tess at kunna leggja út bíbilsku tekstirnar sjálvstøðugt; men týdningarmikil gudfrøðilig verk eru skrivað á latíni, tí at so ómetaliga stórur partur av eldru menning kirkjunnar, til og – fyri ein rættiliga avgerandi part – eisini *við* Luther og trúbótini, hevur verið í høpum, har latín mestsum burturav hevur verið akademiska málið um okkara leiðir – í langt størri mun enn enskt hevur henda leiklut nú á døgum. Hesir tekstir – stavandi frá trimum fjórðingum av teirri tíð, ið kristna kirkjan hevur verið til – hava bæði etiskt, tilveruligt og trúarligt innihald, sum hevur havt serstakliga stór árin á kirkjurnar í dag, og eins og bíbliuni viðvíkjandi er best at skilja, tulka og greina í mun til upprunamálið.
Luthersku læruni og latíni viðvíkjandi er eisini vert at hava í huga, at hóast valla nakar hevur skrivað so nógv á týskum sum Luther, so komu Luther og trúbótin úr hálærdum katólskum umhvørvi. Tí er stórur og týðandi partur av ritverkum Luthers kortini á latíni, eins og grundleggjandi læruritini, sum hann skrivaði saman við næstu starvsfeløgum sínum – eitt nú augsburgska trúarjáttanin og kirkjuordinansarnir, ið skrivaðir vórðu sum grundleggjandi reglugerðirnar fyri hvørja trúbøtta kirkju sær, til dømis danski kirkjuordinansurin frá 1537 – upprunaliga vórðu skrivað á latíni.

Tað kann tykjast sum um, at rímiligt lutfall ikki er millum krøvini viðvíkjandi latíni (30 ECTS-stig) og krøvini viðvíkjandi hebraiskum og grikskum (10 og 20 ECTS-námsstig ávíkavist), ið jú eru upprunamálini, ið bíblian er skrivað á; men neyðugt er ikki formliga at áseta í ECTS námsstigum eins høg krøv til hebraiskt og grikst sum amboðslærugreinarnar, tí meðan hin gudfrøðilesandi við uppskotnu førleikakrøvunum ikki kemur uttanum at arbeiða meira við grikskum og hebraiskum (av tí at arbeitt verður út frá tekstum á upprunamálunum, tó at hesar lærugreinarnar ikki formliga eru lærugreinar í *máli*), eitt nú í klassisku gudfrøðilærugreinunum gamla testamenti og nýggja testamenti, er ikki á sama hátt givið, at hin lesandi kemur at arbeiða við latíni sum annað enn amboðsfak – tað veldst um, hvørji lestrarverkevni hin einstaki lesandi velur.

Rætt er, at kravið um 30 ECTS-stig í latíni kann vera ein trupulleiki fyri lesandi úr Íslandi og Noregi, men broyttu førleikakrøvini gera annars, at lesandi úr øllum øðrum londum enn Danmark fáa heilt munandi lættari við at lúka førleikakrøvini enn eftir galdandi førleikakrøvum. Hjá lesandi úr Noregi og Íslandi verður kravið viðvíkjandi latíni hitt einasta, sum tey lesandi skulu gera eyka, til tess at lúka førleikakrøvini, og hetta verður greitt frammanundan. Tað er eitt stórt framstig í mun til galdandi førleikakrøv.
Ofta man liggja fyri at leggja lesnaðin soleiðis til rættis, at til ber at taka kravda latín-førleikan sum part av sjálvum gudfrøðilesnaðinum. Haraftrat ber til at taka hástig A av miðnámsútbúgving í latíni í staðin. Hetta kann verða gjørt áðrenn lesnaðin, men annars skuldi ikki verið trupult at fingið eyka frálæru í latíni í nøkrum universitetsbýi – ið hvussu so er ikki í vesturevropu.

---

**Um viðmerkingarnar, sum koma til lógaruppskotið**
Skrivligu viðmerkingarnar, ið koma, verða lagdar hjá lidna lógaruppskotinum sum fylgiskjøl, eins og tá í høvuðsheitum verður greitt frá munnligum viðmerkingum*;* men í tann mun skrivligar viðmerkingar koma, meðan almenna hoyringin er, verða tær lagdar út á heimasíðuna so hvørt.

**Kap. 2**
**Avleiðingar av uppskotinum**

1. Lógaruppskotið hevur smávegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið, og ongar fyri kommunurnar.
   Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið eru, at tað fylgir av førleikakrøvunum til sóknarprestar, at neyðugt er at seta á stovn nám í føroyskari kirkjusøgu, kirkjusiðum og meira við Fróðskaparsetur Føroya. Neyðugt verður tí at skipa eitt nýtt granskarastarv á Fróðskaparsetrinum, men fólkakirkjan kann fíggja ein part av hesi útreiðslu.
   Eisini verður neyðugt at seta serfrøðinganevnd at meta um gudfrøðiútbúgvingar. Nakað av útreiðslum verður til fundarpening e.a. samsýning o.t.
2. Smávegis umsitingarligar avleiðingar verða fyri landið.
   Nevnd verður sett at meta um gudfrøðiútbúgvingar, men umsitingarbyrðan av henni verður avmarkað.
   Eisini verður greiðari ábyrgdarbýti millum biskup og landsstýrismann, tá um at seta sóknarprestar ræður. Her er tó fyrst og fremst talan um sama ábyrgdarbýti, sum við delegatión var sett í verk beint eftir yvirtøkuna, so í verki verður ilt at fáa eyga á tær broytingarnar.
   Ongar umsitingarligar avleiðingar verða fyri kommunurnar.
3. Lógaruppskotið fær ikki fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.
4. Lógaruppskotið fær ikki avleiðingar fyri umhvørvið.
5. Lógaruppskotið fær ongar serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.
6. Lógaruppskotið fær ikki sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar; men uppskotið broytir í ávísan mun førleikakrøvini til at søkja prestaembæti og broytir mannagongdirnar í hesum sambandi nakað.
   Við broyttu førleikakrøvunum fáa kandidatar av flestøllum lærdu háskúlum í heiminum lættari atgongd til at søkja sóknarprestaembæti; meðan øll – umframt tað, ið útlendsku lærdu háskúlarnir kunnu bjóða – skulu taka eitt styttri nám í føroyskari kirkjusøgu, kirkjusiðum og meira.
   Eisini verður skotið upp at flyta nakrar lítið nýttar setanarheimildir (at seta ávís onnur starvsfólk enn sóknarprestar) frá kirkjuráðunum í 4 teimum størstu kirkjusóknunum til Stiftsstjórnina. Hetta tí at størvini í fólkakirkjuni eru so fá, at hvør einasta starvssetan kann gera fittan mun, bæði fyri bygnaðin og kostnaðarstøðið.
   Skotið verður upp at taka innihaldsligu avmarkingarnar fyri, hvørji størv kirkjusóknirnar kunnu seta, av.
   Endiliga verður skotið upp, at eisini smá kirkjulið kunnu ganga saman um at heita á Stiftsstjórnina um at seta teimum ávís onnur starvsfólk enn sóknarprestar.
7. Sáttmálar eru ikki, sum fáa fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar.
8. Lógaruppskotið fer ikki at áleggja fólki nýggjar skyldur.
9. Lógaruppskotið gevur ikki øðrum landsstýrismanni heimildir.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| avleiðingar | | | | | |
| Umsitingarligar avleiðingar | (Ja) | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3**
**Serligar viðmerkingar**
**Um § 1**
Krøvini, ið her verða nevnd, eru aðalfortreytirnar fyri at kunna gerast sóknarprestur og eru sum so tey somu sum í § 1, stk. 1 nr. 1 og stk. 2 í galdandi løgskipan.
Her eru krøvini tó skrivað saman í eina áseting, og kravið um limaskap í fólkakirkjuni sett fremri, til tess at gera greitt, at hóast høga gudfrøðiliga støðið er eitt av aðalmerkjum fólkakirkjunnar, er fólkakirkjan fyrst og fremst eitt trúarsamfelag og kann tí – uttan mun til fakligan førleika – ikki nýta aðrar gudfrøðingar sum sóknarprestar, enn teir sum eru limir í fólkakirkjuni, tí at teir taka undir við læru hennara.
Staðiliga lógarásetta kravið um limaskap tryggjar eisini, at ivi ikki er um, at fólkakirkjan kann seta krav sum hetta, tá sóknarprestur verður settur, uttan mun til vanligu mannarættindagrundaðu aðalreglurnar um ikki at gera mannamun eftir átrúnaði.
Sambært Norsku Lóg 2-2-4 geldur umframt kravið um limaskap, at ”Ingen maa stædis til noget Præstekald, som ikke er sine fulde fem og tyve Aar”. Aldursmarkið er tikið við úr kanóniskum rætti og gongur heilt langt aftur í kirkjusøguna. Rætt er at halda fast við hetta aldursmark, tí ein ávís persónlig búning er avgjørd fortreyt fyri at kunna røkja prestakall.

Stk. 2
Her uppskotnu ásetingarnar, við prinsipiellum innihaldsligum krøvum til einstøku fakini, sum meira ítøkiliga verða útgreinað í kunngerð, koma í staðin fyri meginregluliga kravið í galdandi løgskipan (§ 1, stk. 1, nr. 1) um gudfrøðiútbúgving av donskum lærdum háskúla.
Í almennu viðmerkingunum, seinnu helvt av partinum *“Sóknarprestaembæti – um galdandi førleikakrøv og um gudfrøðiútbúgvingar”,* og fyrru helvt av partinum *“Sóknarprestaembæti – uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving”* er greitt frá orsøkunum til, at skotið verður upp at regluseta førleikakrøvini á henda hátt í staðin.
Viðvíkjandi innihaldsligu grundgevingunum fyri at seta hesi fakligu krøv verður víst til almennu viðmerkingarnar, serliga seinnu helvt av partinum *“Sóknarprestaembæti – uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving”.*
Nevndin eftir §§ 4-5 skal meta um, hvørt hesi krøv eru lokin í nøktandi mun, bæði tí at heldur ikki í kunngerð ber til at regluseta so neyvt um førleikakrøvini, at heilt einfalt er at gera av, nær tey eru lokin, og tí at ikki er heilt einfalt til dømis at meta um, hvat ið er “kirkjusøga við nøktandi denti á lutherska kirkjusøgu”. Neyðugt er, at tey sum skulu gera metingina, hava fakliga innlitið til at kunna meta um gudfrøðiútbúgvingina sum heild og til at skyna á, hvat ið skal til til tess at tryggja, at hin gudfrøðilesandi fær hóskandi breitt og viðkomandi innlit í tann partin av kirkjusøguni, sum er serstakur fyri evangeliskt luthersku kirkjurnar.

Ítøkiligu krøvini um amboðslærugreinarnar og klassisku lærugreinarnar verða sambært hjálagda uppskoti til kunngerð løgd soleiðis, at tey í øllum førum uttan einum samsvara við krøv og lærugreinaútboð á øllum teimum gudfrøðiútbúgvingunum á lærdu háskúlunum í Danmark, Íslandi og Noregi, sum fólkakirkjurnar í viðkomandi landi í dag viðurkenna sum førleikagevandi til sóknarprestaembæti har.
Undantakið er latín, sum ikki er kravd lærugrein á hesum støði í Noregi og Íslandi, men støðið er lagt ájavnt við hástig A av miðnámsútbúgving, so hinum lesandi ikki nýtist at taka tað sum lið í universitetslestrinum. Fakið kann verða tikið áðrenn lestrarbyrjan, meðan lisið verður, ella eftir loknan lestur, tað ger ikki mun í mun til kravið, sum tað er orðað í uppskotinum til kunngerð.

Við hesum broytingum fara gudfrøðingar úr Danmark grundregluliga at hava somu atgongd til at søkja embæti í Føroyum sum í dag (jbr. tó eisini nýggju krøvini í § 2), meðan tað grundregluliga verður lættari hjá gudfrøðingum úr Noregi og Íslandi at søkja embæti her.
Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar, partarnar "*Sóknarprestaembæti – atlit, tá førleikakrøv verða sett*" og "*Hoyring*".

Yrkisútbúgvingin er í summum londum (Ísland og Noregi, t.d.) samrunnin partur av gudfrøðiútbúgvingini, um tú fert prest-vegin í lesnaðinum, meðan hon í øðrum londum (Danmark, t.d.) er ein sjálvstøðug útbúgving til teirra, ið hava lokið prógv í gudfrøði.
Verkligi førleikin, sum lesandi ogna sær í yrkisútbúgvingini, er neyðug fortreyt fyri at kunna inna prestgerningin í Føroyum; men ágóðarnir av at skipa serstaka føroyska yrkisútbúgving høvdu ikki staðið mát við kostnaðin.
Lærdu námini eftir § 2, stk. 1 eru um meira ítøkilig/formlig viðurskifti í Føroyum og kunnu tí <u>ikki</u> koma í staðin fyri yrkisútbúgvingina.
Kravið um yrkisútbúgving sum prestur verður ikki bundið at ávísum yrkisútbúgvingarstøðum, tí at talan er um hampiliga almennar førleikar. So leingi sum talan er um yrkisútbúgving til at virka við lutherska kirkju, verður mett, at ymiskleikin verður ikki størri enn, at saman við lærda náminum, sum er kravt eftir § 2, stk. 1, fer ein og hvør prestlæra til at virka við lutherska kirkju at geva komandi sóknarprestinum nøktandi førleikar verkliga partinum av prestgerninginum viðvíkjandi.

Stk. 3
Ásetingin er innihaldsliga javnlík við § 3, stk. 1 í galdandi løgskipan.
Hetta, at kirkjuliðið á serstakan hátt og við stórari undirtøku tekur seg saman um at kjósa sær ávísan sóknarprest (sí §14), ger, at vikið kann verða frá øllum fakligu førleikakrøvunum (helst ber til at siga, at serstaka kallingin kemur sum eitt annað slag av førleika, í staðin fyri fakligu førleikakrøvini), umframt at setanartilgongdin broytist; men annars galda nett somu reglur sum fyri sóknarprest, sum er settur eftir høvuðsregluni.
Skotið verður tó ikki upp, at til skal bera at gera frávik frá nýggja kravinum um kunnleika til føroyskt, sbr. § 2, stk. 2, tí hetta at kunna samskifta við kirkjuliðið er so avgerandi fortreyt fyri at kunna røkja prestagerningin á nøktandi hátt.
Fortreytin er tó, at biskupur eisini mælir til hetta. Allir sóknarprestar standa undir hirðaligu umsjón biskups, og tí hevði ikki borið til at sett sóknarprest, sum biskupur ikki kann geva kallsbræv.
Tilmæli biskups verður grundað á próvhoyringina, sum í slíkum føri eftir vanligum fyrisitingarreglum kemur at vera lagað til á hóskiligan hátt í mun til útbúgvingarstøðið, ið tann hevur, sum kirkjuliðini hava kosið sær.

Stk. 4
Ásetingin hevur á leið sama virknað sum § 4 í galdandi løgskipan, ið heimilar, at biskupur kann viðmæla, at sóknarprestur, sum er komin í starv við samsvarandi fráviki frá fakligu førleikakrøvunum, sum sbr. stk. 3, longu eftir 7 ára starvstíð kann søkja á jøvnum føti við gudfrøðingar.
Flestu heimildirnar í setanartilgongdini eftir uppskotinum liggja hjá biskupi. Tí verður orðing sum í galdandi løgskipan innantóm. Hinvegin er týdningarmikið, at mál sum hetta, eins og eftir galdandi skipan, verður viðgjørt á tvinnanda stigum, tí sóknarprestaembætini eru so fá, at manningin av hvørjum einstakum embæti kann ávirka kirkjuskipan og –siðir. Skotið verður tí upp, at biskupur kann gera frávikið við loyvi landsstýrismansins.

Stk. 5
Við hesi ásetingini verður heimilað biskupi at skipa prest úr kirkju í lutherska heimssamfelagnum í tíðaravmarkað sóknarprestaembæti, og í hesum sambandi gera frávik frá øllum førleikakrøvum, uttan kravinum um at presturin skal hava embætisprógv í gudfrøði.
Heimildin er til dømis ætlað at verða nýtt í sambandi við starvsumbýti, har sóknarprestur eitt styttri skifti fer í starv í aðrari lutherskari kirkju, meðan presturin, hann loysir av, kemur í hansara starv ímeðan.
Skal meining vera í himildini, má eisini verða vikið frá kravinum um limaskap í fólkakirkjuni, tí talan verður helst um, at viðkomandi hvørki hevur ella fer at hava fastan bústað í Føroyum, og tí ikki kann vera limur í fólkakirkjuni her. Innihaldsliga er hetta tó ikki nakað stórt frávik, tí fortreytin er, at viðkomandi er prestur í lutherskari kirkju.
Eftir § 9, stk. 3 verður skotið upp at heimila biskupi landsstýrismansins vegna at skipa sóknarprest í embæti upp til 6 mánaðir, uttan at embætið er lýst leyst frammanundan. Av tí at her verður heimilað at gera munandi frávik frá førleikakrøvunum, eigur frávikið ikki at kunna vera fyri meira enn 3 mánaðir.
Ikki ber til at seta í fast starv eftir hesi heimildini, og tí eru førleikakrøvini eftir § 2 ikki viðkomandi.
Onki høpi hevði tó verið í at skipa prest í embæti, uttan so at hann kann samskifta við kirkjuliðini, og tí kemur natúrliga at vera talan um prest, sum so ella so frammanundan hevur okkurt slag av sambandi við Føroyar og ávíst innlit í føroyskt og føroysk viðurskifti – til dømis ein, ið hevur føroyskan maka, ella føroying í starvi hjá aðrari lutherskari kirkju.
Talan er um so stutt starvsskeið, at neyðugt er ikki at áseta staðilig krøv um málførleika, hetta verður upp til biskup at meta um í einstaka førinum.
Ásetingin um, at biskupur ger frávikið eftir samráð við kirkjuráðini, er, tí at viðkomandi er ætlaður at vera prestur hjá teimum. Samráðið er ikki um, hvørji frávik biskupur kann gera, men um, hvørt tey eru áhugað í, at hann býður ávísa prestinum at virka sum teirra prestur eitt skifti.

**Um § 2**
Við ásetingini fær tann, sum ikki hevur tikið nevndu nám sum part av gudfrøðilestrinum, embætisskyldu at taka tey innan 2 ár eftir, at viðkomandi er blivin sóknarprestur.
Neyðugt kann vera at hava heimild til at gera tíðaravmarkað frávik frá hesum kravinum í sambandi við starvssetan, tí gudfrøðingur kann eitt nú ikki taka kravdu lærugreinarnar sum lið í lestrinum, uttan so at lærdi háskúlin, hann lesur á, hevur ella ger okkurt slag av avtalu við Fróðskaparsetrið. Eisini er væntandi, at tað ikki altíð hóskar inn í lærugreinaútboðið á Fróðskaparsetrinum at bjóða allar lærugreinarnar út hvørt ár, og tí kann tað vera tvørligt hjá hinum einstaka lesandi at fáa lestraruppihald í Føroyum at hóska inn í lesturin.
Hinvegin verður mett neyðugt, at sóknarprestur nemur kravdu førleikarnar innan 2 ár, og tí kann ikki verða givin longri freist enn 2 ár.
Er treytin ikki lokin, tá freistin er farin, eru førleikakrøvini ikki lokin, og viðkomandi skal fara úr starvi.
Í verki kemur hetta at merkja, at umsøkjari, sum fær treytir eftir hesi áseting, ikki kann verða settur sum tænastumaður, fyrr enn treytirnar eru loknar. Tá so treytirnar eru loknar, og viðkomandi verður tænastumannasettur, kann hann seta fram ynski um, at sáttmálaásetta eftirlønaruppsparingin (eftir reglunum í núgaldandi § 4a, í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumanneftirlønir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 14. mars 1997) verður goldin í landskassan, so at viðkomandi á henda hátt keypir sær eftirlønarrættindi sum tænastumaður í staðin.

Av tí at lestur í hesum lærugreinum ikki er skipaður við Fróðskaparsetrið enn, verður í skiftisásetingunum skotið upp, at ásetingin ikki kemur í gildi fyrr enn 1. januar 2014.

Stk. 2
Mestsum føst siðvenja er, at umsøkjari, sum dugir føroyskt, verður tikin framum umsøkjara, ið ikki dugir føroyskt, hóast staðilig lógarheimild ikki hevur verið fyri hesum; men við uppskotnu ásetingini verður hetta at skilja føroyskt eitt førleikakrav, sum tó ikki kemur at galda í sambandi við styttri tíðaravmarkaða setan.
Eins og hini førleikakrøvini skal eisini kravið í fyrra liði í ásetingini vera lokið, áðrenn biskupur kann lata kirkjuráðunum umsókn at viðgera, og kravið eftir seinna liði í ásetingini er – eins og kravið eftir seinna liði í stk. 1 – fortreyt fyri, at sóknarprestur kann verða verandi í embæti.
Í verki kemur hetta at merkja, at umsøkjari, sum fær treytir eftir hesi áseting, ikki kann verða settur sum tænastumaður, fyrr enn treytirnar eru loknar. Víst verður til næstseinasta reglubrot í viðmerkingunum til stk. 1.
Einki er at taka seg aftur í, at tað kann vera ein forðing og elva til óneyðuga fjarstøðu í samskiftinum millum sóknarprest og sóknarbarn, um kirkjufólk noyðast at orðbera seg á øðrum máli enn móðurmálinum, tá tey samskifta við sóknarprest.
Hóast ávíst førleikastøði ikki verður ásett staðiliga, er greitt, at til tess at kunna samskifta við sóknarbørnini um stór, torfør og ofta tyngjandi evni á føroyskum, er neyðugt at hava eitt hampiliga stórt orðatilfeingi á føroyskum, og eisini gott og væl at hava grundleggjandi hylling á orðalagslæruni, meðan mállæra annars og framburður ikki nýtast at hava eins avgerandi týdning í fyrstu atløgu.
Vert er eisini at vísa á, at eftir § 2, stk. 3 í løgtingslóg nr. 42 frá 26. mai 2008 um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni, krevst loyvi frá biskupi, um ætlanin er, at annað mál (enn føroyskt ella danskt, sbr. § 11 í Heimastýrislógini) verður brúkt við gudstænastur og kirkjuligar tænastur. Sostatt hevði verið neyðugt, at gudfrøðingur við øðrum móðurmáli var so stinnur í føroyskum (ella donskum), at hann kundi hildið alla gudstænastuna á føroyskum, áðrenn hann hevði verið at meta sum skikkaður umsøkjari til fast embæti.

**Um § 3**
Í fyrsta og øðrum tátti verður heimilað, at ítøkiligu akademisku førleikakrøvini verða ásett í kunngerð, tí skal nakað veruligt virði vera í at áseta tey, mugu tey vera somikið ítøkilig, at tey koma at ávirka, hvussu hin lesandi setir sær lesnaðin saman. Tí verða tey eisini so ítøkilig, at neyðugt kann verða at laga tey til, um umfatandi tillagingar verða framdar í gudfrøðiútbúgvingunum í fleiri av hinum londunum í gamla dansk-norska ríkinum.
Ítøkiligu krøvini um amboðslærugreinarnar og klassisku lærugreinarnar verða sambært hjálagda uppskoti til kunngerð løgd soleiðis, at tey, sum er, í høvuðsheitum samsvara við krøv og lærugreinaútboð á øllum teimum gudfrøðiútbúgvingunum á teimum 6 lærdu háskúlunum í Danmark, Íslandi og Noregi, sum fólkakirkjurnar í viðkomandi landi í dag viðurkennna sum førleikagevandi til sóknarprestaembæti har.
Sum útbúgvingarnar verða broyttar, er væntandi, at minni ósamsvar kunnu koma í, men hetta skuldi ikki verið nakar bági, um bert hin lesandi veit av føroysku krøvunum, so hann kann laga lesturin til hesi.
Kunngerðarheimildin er tí ikki orðað soleiðis, at tað verður eitt krav, at landsstýrismaðurin støðugt nýtir kunngerðarheimildina til at fylgja gongdini í hesum londum, sí eisini almennu viðmerkingarnar, partin “*Sóknarprestaembæti – ítøkiliga um førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving*”.

Meðan krøvini í uppskotinum til kunngerð yvirhøvur eru lagað eftir krøvum og útboðum á øllum 6 nevndu gudfrøðideildum, er kravið latíni viðvíkjandi hægri enn tað, sum í løtuni er kravt í Noregi og Íslandi, men av tí at kravið er *annaðhvørt* 30 ECTS-stig *ella* hástig A av miðnámsútbúgving, nýtist hinum lesandi ikki at taka tað sum lið í universitetslestrinum. Fakið kann verða tikið áðrenn lestrarbyrjan, meðan lisið verður, ella eftir loknan lestur, tað ger ikki mun í mun til kravið, sum tað er orðað í uppskotinum til kunngerð.
Víst verður eisini víst til almennu viðmerkingarnar, partarnar "*Sóknarprestaembæti – atlit, tá førleikakrøv verða sett*", "*Sóknarprestaembæti – grundregluliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving*", "*Sóknarprestaembæti – ítøkiliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving*" og "*Hoyring*".

Heimildin í triðja tátti er myndað leysliga eftir § 1, stk. 3 í galdandi løgskipan. Orðalagsliga er eitt skifti frá, at eftirútbúgving eftir galdandi løgskipan *kann* verða kravd, til at hon *er* kravd, men í roynd og veru er eingin munur, tí føst siðvenja er, at hesi krøv verða sett.
Við heimildini í § 1, stk. 3 í galdandi løgskipan hevur danski kirkjumálaráðharrin sett sum treyt, at gudfrøðingur, umframt útbúgvingina á pastoralseminariet, skal taka lut í kravdum eftirútbúgvingarskeiðum fyrstu árini eftir, at hann hevur tikið við embæti.
Ikki ber til at áseta neyvt í lógini, hvørjar eftirútbúgvingar talan verður um, tí sum er, eru ikki føst skipað eftirútbúgvingartilboð í Føroyum, og ikki hevði verið rætt at bundið skipanina við eftirútbúgving einvíst aftrat samsvarandi skipan í øðrum landi, ella at lagt til grund, at øll eftirútbúgvingin verður skipað í Føroyum.
Talan er um onnur skeið, enn skeiðini og útbúgvingarnar, sum skulu til til tess at lúka førleikakrøvini eftir § 1, stk. 2, triðja tátti, og § 2. Her verður fyrst og fremst sipað til skeið, sum eru serliga viðkomandi fyri yrkisliga partin av virkinum sum sóknarprestur, men tey kunnu eisini vera av meira alment gudfrøðiligum ella kirkjurættarligum slagi.
Virkið sum sóknarprestur er serstakt, tað kann lættliga gerast einsligt fakliga, samstundis sum tað er óvanliga persónliga krevjandi. Tí er meira enn vanliga neyðugt, at sóknarprestur, serliga tey fyrstu árini, nýtir orku til at menna og eftirútbúgva seg, so at hann skal vera førur fyri sjálvur at menna seg víðari við "*støðugt (at) granska Guds orð og trúarinnar læru*", sum ásett er í § 7, stk. 2 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.

Stk. 2
Við ásetingini verður álagt landsstýrismanninum at gera greiniligari ásetingar um innihaldið í gudfrøðiligu ískoytisútbúgvingini, sbr. § 2, um serlig føroysk kirkjulig viðurskifti, og harvið eisini at slík útbúgving verður skipað.
Útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum verða vanliga skipaðar við fyriskipanum við heimild i Seturslógini, heldur enn við lóg beinleiðis.

Stk. 3
Uppskotna ásetingin er heimild til landsstýrismannin at áseta, at ávísar navnnevndar gudfrøðiútbúgvingar úr londunum í gamla dansk-norska ríkinum ikki verða beinleiðis fevndar av aðalregluliga kravinum um, at mett verður neyvt um førleika og útbúgvingarinnihald hjá hvørjum einstøkum kandidati.
Í almennu viðmerkingunum, partinum "*Sóknarprestaembætið – um galdandi førleikakrøv her og í grannalondunum*"verður greitt frá, hví londini vanliga seta innihaldslig krøv til gudfrøðiútbúgvingarnar, og hví hetta vanliga verður gjørt við at taðka støði í gudfrøðiútbúgving í egnum landi. Í almennu viðmerkingunum, pørtunum "*Sóknarprestaembæti – atlit, tá førleikakrøv verða sett*", "*Sóknarprestaembæti – grundregluliga um uppskotnu førleikakrøvini vv.*

*gudfrøðiútbúgving*” og “*Sóknarprestaembæti – ítøkiliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðiútbúgving*” verður greitt frá, hví talan er um lærdar háskúlar úr júst londunum í gamla dansk-norska ríkinum.
Verður kunngerðarheimildin nýtt sum tilætlað, í høvuðsheitum samsvarandi hjálagda uppskoti til kunngerð, fara – við verandi lestrarmynstri – allarflestu føroysku gudfrøðingar at kunna søkja embæti í fólkakirkjuni, uttan at nevndin eftir § 4 metir um støði og innihald í gudfrøðilestrinum. Hetta lættir munandi um møguleikarnar hjá teimum, sum lesa gudfrøði í Noregi og Íslandi, at lúka førleikakrøvini, tí eftir galdandi løgskipan verður mett ítøkiliga um próvskjølini hjá øllum gudfrøðingum, uttan teimum ið hava prógv av lærdu háskúlunum í Århus og København, og kravið er, at prógvið til fulnar samsvarar við gudfrøðiútbúgving av donskum lærdum háskúla.
Við hesi kunngerðarheimildini ber einans til at loyva at gera frávik fyri tær gudfrøðiútbúgvingar úr nevndu londum, sum fólkakirkjan í viðkomandi landi viðurkennir sum beinleiðis førleikagevandi til sóknarprestaembæti. Hetta vil siga, at hóast fólkakirkjan í einum av londunum skuldi viðurkent gudfrøðiútbúgving úr einum øðrum av londunum, sum fólkakirkjan í viðkomandi landi ikki sjálv viðurkennir sum beinleiðis førleikagevandi, kann hon ikki við støði í hesi kunngerðaheimild verða viðurkend at geva førleika til at søkja embæti í fólkakirkjuni í Føroyum, uttan um viðgerð í nevndini eftir § 4.
Við hesi orðingini verða samansettar útbúgvingar – eisini millum í kunngerðini nevndu lærdu háskúlarnar – altíð at skula til metingar hjá nevndini eftir § 4.

Skotið verður upp, at hetta frávikið verður reglusett í kunngerð, tí hóast líkskapurin millum bæði kirkjur og gudfrøðiútbúgvingar í dag er so stórur, at skyldskapurin er eyðsýndur, kunnu stórar broytingar verða framdar eftir stuttari tíð. Til dømis er latín longu minkað munandi í vavi í summum av londunum, og í nøkrum førum hevur eitt skifti verið upp á tal at taka hebraiskt av sum kravda lærugrein. Endiliga er hugsandi, at nýggj gudfrøðinám kunnu verða viðurkend, og í øllum hesum førum er høgligast at kunna laga listan til við kunngerð.
Viðvíkjandi uppskotna kravinum um førleika í latíni verður víst til serstøku viðmerkingarnar til stk. 1.

Uppskot til kunngerð eftir hesi áseting liggur hjá sum fylgiskjal 1 til lógaruppskotið.

**Um § 4**
Nevndin er ikki vanlig í grannalondunum, men er ein fylgja av, at ikki ber til at gerast kandidatur í gudfrøði á føroyskum universtiteti. Sí eisini § 1, stk. 2, og viðmerkingarnar til hesa, og almennu viðmerkingarnar, partarnar *Sóknarprestaembæti – atlit, tá førleikakrøv verða sett* og *Sóknarprestaembæti – grundregluliga um uppskotnu førleikakrøvini vv. gudfrøðútbúgving*.
Líknandi nevndir, men við eitt sindur øðrvísi arbeiðshátti, kundu við heimild í donsku kirkjulóggávuni í seksti og sjeytiárunum verða settar at geva kirkjumálaráðharranum ráð um at viðurkenna gudfrøðiútbúgving eftir ítøkiligari meting.
Natúrligt kundi verið, at annað umboðið, ið landsstýrismaðurin tilnevnir eftir tilmæli frá fróðskaparsetrinum, var komandi granskarin í gudfrøði á fróðskaparsetrinum. Hinvegin er ikki væntandi, at til ber at finna nóg mikið av føroyingum við hóskandi førleika til tess at manna allar sessir, og tí er ásett, at umboðini við granskingarførleika í gudfrøði skulu vera av norðurlendskum lærdum háskúla.
Skotið verður upp, at varalimir skulu vera til tess at tryggja, at nevndin støðugt kann vera virkisfør, og so at manningin kann skifta, tá gegnistrupulleikar koma í.
Ásetingin um at føroyingurin, ið prestafelagið skjýtur upp, skal vera prestlærdur, merkir, at viðkomandi lýkur førleikakrøvini sbr. § 1, stk. 1 og 2, ella kunngerðini eftir § 3, stk. 3. Hinvegin

er tað við hesi orðingini ikki ein treyt, at viðkomandi hevur hægri granskingarførleika ella er í embæti.
Lærugreinar kunnu hava ymisk heiti og skiftandi innihald, alt eftir hvør siðvenjan á viðkomandi lærda háskúla er, og tí er neyðugt, at fólk, ið veruliga hava førleikar og innlit á økinum, eru tey, sum kanna innihaldsligu lýsingarnar av einstøku lærugreinunum.
Millum viðurskiftini, sum nevndin skal hava við í metingini, eru eyðvitað staðiliga nevndu fakligu krøvini, sbr. § 1, stk. 2, men mest krevjandi parturin av virkseminum hjá nevndini verður helst at meta um, hvørt útbúgvingin í hóskandi mun fevnir um evni, sum eru viðkomandi fyri virki í lutherskari fólkakirkju, og at fáa greiðu á, hvørt okkurt krav heilt ella lutvíst kann metast at vera lokið í sambandi við, at annað evni er nomið.

Stk. 2
Ásett verður starvsskipan fyri nevndina við reglum um varalimir, nevndartíðarskeið, starvsstað og virkishátt.
Eitt nú kann hugsast, at tað verður mest hóskiligt, at meginreglan er, at viðgerðin í mestan mun er skrivlig. Hetta til tess at tryggja smidliga og støðuga viðgerð og stuttar avgreiðslutíðir og at halda kostnaðarstøðinum niðri, havandi í huga, at nevndarlimirnir valla allir verða at búgva í Føroyum.
Greiniligari ásetingar um skrivstovuhaldið verða ikki skotnar upp, til tess at skapa sum besta rúmd fyri, at landsstýrismaðurin kann skipa hetta, soleiðis at skrivstovuhaldið kann vera í hóskandi fakligum umhvørvi, eitt nú saman við skrivstovuhaldinum hjá øðrum myndugleika, sum kann hugsast at skula gera líknandi metingar um útbúgvingar og førleikar.

**Um § 5**
Lesandi kunnu ikki av eintingum venda sær til nevndina, men skulu samskifta við nevndina umvegis biskup. Hetta til tess at tryggja, at biskupur í eini handavending kann veita hinum lesandi leiðbeining í óivasomum spurningum, heldur enn at nevndin skal til verka, hvørja ferð onkur lesandi hevur ein lítlan spurning, og at biskupur kann tryggja, at nevndin ikki verður spurd órímiliga ofta í sama máli.
Nevndini verður heimilað at meta um lestraravrik higartil eisini, so at lesandi kann fáa vegleiðing, meðan hann er í útbúgving, heldur enn krøv aftaná einans. Hetta skuldi serliga kunnað verið hent amboð hjá teimum, ið lesa aðrar gudfrøðideildir enn tær í kunngerðini nevndu, ella sum lesa við fleiri gudfrøðideildir.
Skotið verður upp at áseta, at avgerðir nevndarinnar ikki kunnu verða kærdar, tí at ilt er at ímynda sær, hvussu tað skuldi borið til at mannað kærumyndugleika við hóskandi sakkunnleika. Rættarstøðan er eisini í dag soleiðis, at avgerðir viðvíkjandi javnvirðismeting við danska gudfrøðiútbúgving ikki kunnu verða kærdar.

**Um § 6**
Talan er um ráðgeving yvirhøvur, ið ikki nýtist at hava samband við próvhoyringina hjá biskupi, sum er reglusett í greinunum 7 og 8.
Ásetingin peikar á og undirstrikar hirðaliga leiklut biskups, og undirstrikar tað natúrliga í, at gudfrøðilesandi kunnu venda sær til biskups um ráð og leiðbeining, eisini áðrenn tey eru um at gerast sóknarprestar.
Ráðgevingin kann vera um so mangt, men natúrligt er, at biskupur eisini gevur ráð um serligu føroysku førleikakrøvini, og eisini at hann, um ivamál taka seg upp, býður sær til at leggja prógv um lestraravrik higartil og lestrarætlan fyri nevndina við áheitan um vegleiðandi meting, av tí at hin einstaki lesandi ikki sjálvur kann biðja um meting ella ávegismeting frá nevndini.

**Um § 7**
Ásetingin um, at tann, ið hevur í umbúna at søkja kall, skal til próvhoyringar hjá biskupi, er nýggj, bæði í mun til lóggávu og siðvenju. Higartil hevur skipanin verið sum fyrisett í Norsku Lóg, 2-3-2, at einans tann, ið ætlanin er at seta í starvið, skuldi til próvhoyringar. Próvhoyringin hevur sostatt verið liður í sjálvari setanartilgongdini til ávíst embæti, meðan hon við uppskotinum verður fortreyt fyri at kunna koma upp á tal sum umsøkjari. Tí verður skotið upp at taka ásetingarnar í Norsku Lóg 2-3-2 av við skiftisásetingunum til hesa lóg.
Próvhoyringin liggur í dag, samsvarandi ásetingini í Norsku Lóg 2-3-2, vanliga heilt seint í setanartilgongdini, aftan á at tilmælini um setan eru avgreidd, og stutt undan vígslu og innsetan.
Parturin "*Sóknarprestaembæti – Próvhoyring hjá biskupi*" í almennu viðmerkingunum greiðir gjøllari frá verandi skipan og frá meginregluliga endamálinum við nýskipanini.
Við nýggju ásetingini fær tann, ið lýkur formligu førleikakrøvini, sbr. § 1, stk. 1 og 2, ella kunngerð eftir § 3, stk. 3, rætt til at koma til próvhoyringar, uttan mun til um viðkomandi tá beint søkir embæti; meðan hann skal hava verið til próvhoyringar, áðrenn umsókn um embæti kann verða tikin til viðgerðar.
Gudfrøðingur kann eftir ásetingini ikki koma til próvhoyringar, fyrr enn hann lýkur nevndu førleikakrøvini, men tað er ikki ein fortreyt, at førleikakrøvini eftir § 2 eisini skulu vera lokin.
Endamálið við nýskipanini er at flyta próvhoyringina fram í setanartilgongdini, so at biskupur útvegar sær sambæriligar javngjørdar upplýsingar um allar umsøkjararnar, og sostatt hevur upplýst setanarmálið sum best, áðrenn hann letur kirkjuráðunum umsóknirnar.
Í próvhoyringini tryggjar biskupur sum evsti innankirkjuligi myndugleiki sær, at gudfrøðingur, ið hevur í umbúna at gerast sóknarprestur, hevur røttu persónligu, fakligu og trúarlæruligu fortreytirnar fyri at røkja embætið samsvarandi lærugrundarlagi fólkakirkjunnar.
Við orðingini "*gudfrøðingur....... ið hevur í umbúna at søkja kall*" verður ásett, at staðfest skal vera, at tann, ið kann koma til próvhoyringar, lýkur førleikakrøvini. Hetta vil siga, at ikki ber til at koma til próvhoyringar longu í lestrartíðini; men hinvegin ber væl til at koma til próvhoyringar, áðrenn gudfrøðingurin er umsøkjari til nakað ítøkiligt leyst kall.
Ásett verður ikki, at gudfrøðingurin eisini skal lúka førleikakrøvini, sbr. § 2, tí at § 2 heimilar, at gudfrøðinginum kann verða loyvd ein 2 ára freist, eftir at hann hevur tikið við embæti, til at lúka hesi krøvini.

Stk. 2
Biskupur skal vera biskupur hjá øllum prestum og hevur umsjón við og ábyrgd av virki teirra, uttan mun til hvussu kallingin er farin fram. Tí eru próvhoyring hjá biskupi og kallsbræv frá biskupi altíð neyðugar fortreytir fyri at gerast sóknarprestur, uttan mun til á hvønn hátt, kallingin er hend, men av tí at kallingin eftir § 14 júst kann vera heilt uttan mun til formligar førleikar, hevði í hesum føri verið høpisleyst at sett førleikakrøv sum fortreyt fyri at koma til próvhoyringar.
Meðan próvhoyringin við uppskotinum vanliga verður fortreyt fyri at kunna koma upp á tal sum umsøkjari til ávíst embæti, verður skotið upp, at tíðarrøðin er øvut, tá ið kirkjulið kjósa sær prest eftir serstøku mannagongdini í § 14. Grundgevingin er, at biskupur ikki kann taka nakran til próvhoyringar, fyrr enn førleikakrøvini eru lokin, og kalling eftir § 14 ger tann, ið kjósaður er, skikkaðan til embætið, uttan mun til formligar førleikar. Mannagongdin eftir § 14 er tí einasti møguleiki biskups til at fáa vissu fyri, at ein, sum ikki lýkur førleikakrøvini, kortini er skikkaður til embætið.

Ásetingin er eyðvitað ikki til hindurs fyri, at gudfrøðingur, ið eisini lýkur formligu førleikakrøvini, og hevur verið til próvhoyringar, kann koma í embæti eftir mannagongdini í § 14.
Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 8.

Stk. 3
Meginreglan eftir uppskotinum er, at próvhoyring skal altíð vera, um ikki talan er um sóknarprest, sum júst tá er í starvi í fólkakirkjuni í Føroyum; men biskupur kann víkja frá kravinum um próvhoyring, um til dømis talan er um sóknarprest úr aðrari fólkakirkju, ella sóknarprest, sum áður hevur verið í embæti í Føroyum.
Eisini kann – nú próvhoyringin eftir uppskotinum ikki nýtist vera tengd at ítøkiligari starvssetan – hugsast, at fleiri ár líða um, frá tí at kandidatur hevur staðið próvhoyring, til hann søkir ítøkiligt embæti.
Biskupur kann í slíkum førum gera frávik frá kravinum um próvhoyring og hevur tí eisini heimild í hesum førum at gera av, at próvhoyringin skal vera lutvís – til dømis bara samrøður um ávísar partar av fatan prestsins av kirkjuni og læru hennara. Hetta er upp til ítøkiligu meting biskups í hvørjum einstøkum føri.
Orðingin um, at biskupur kann víkja frá próvhoyringini fyri tann, sum áður hevur staðið próvhoyring hjá biskupi, merkir øvut ikki, at biskupur kann sýta fyri at taka umsøkjara, sum eina ferð áður ikki hevur staðið próvhoyring, aftur til próvhoyringar. Ikki við teirri grundgeving einans, at hann áður ikki hevur staðið, men eyðvitað kann biskupur sýta fyri at lata onkran koma til próvhoyringar aftur og aftur, um hann kann grundgeva fyri, at hann metir hetta vera útlitaleyst.

**Um § 8**
Higartil hava ikki verið nágreiniligar reglur fyri, júst hvørji viðurskifti próvhoyringin skal vera um. Hvussu umfatandi hon hevur verið, hevur tí kunnað verið skiftandi.
Við hesi ásetingini verður ásett í høvuðsheitum, hvørji viðurskifti, ið biskupur eigur at kanna í próvhoyringini, og við hesum kann umsøkjarin gera sær eina mynd av, hvat ið hann kann vænta í sambandi við próvhoyringina.

Sóknarprestur hevur boðanarfrælsi innan karmarnar á lærugrundarlagnum; men biskupur hevur embætisliga umsjón við prestum og kirkjuliðum í biskupsdøminum, harundir við boðanini. Við embætisligu umsjónini hevur biskupur eisini ábyrgdina av, at embætisførslan og boðanin hjá prestunum er í samljóði við lærugrundarlagið.
Embætisprógvið í gudfrøði kann – uttan mun til, hvørji lestrarverkevnini hava verið – ikki einsamalt vera fullgóð borgan fyri, at gudfrøðingurin er skikkaður at gerast sóknarprestur, tí undirvísingin á gudfrøðideildum á universitetum er vísindalig, og við hesum aðalregluliga óheft av ávísari trúarlæru.
Við próvhoyringini tryggjar biskupur sær, at gudfrøðingurin hevur røttu fatanina av kirkjuni og læru hennara, og at hann – umframt akademiska kjølfestið – hevur eina kristna, lutherska fatan av heilagu skriftunum og læru teirra, soleiðis at biskupur fer at kunna geva honum kallsbræv, sum ásett í Norsku Lóg 2-3-3.
Gudfrøðingurin skal tí í próvhoyringini vísa, at hann hevur eina nøktandi fatan av lærugrundarlagi fólkakirkjunnar, og at fatan hansara av prestagerninginum eisini er í samsvari við læru fólkakirkjunnar.
Eisini skal biskupur tryggja sær, at persónliga medferðin hjá gudfrøðinginum er soleiðis, at hon ikki tykist at koma at verða til bága fyri virksemi hansara sum sóknarprestur.

Natúrligt er í hesum sambandi, at biskupur eisini leggur dent á decorum-krøvini, ið fylgja við embætinum.
Decorum-krøvini fyri tænastumenn yvirhøvur eru ásett í § 9, stk. 1 í Tænastumannalógini: "*Tænastumaður skal samvitskufult halda tær fyri starv hansara galdandi reglur, og skal bæði í og uttan fyri tænastu vísa slíkan atburð, sum starvi hansara sømir.*"
Harumframt galda serstakt fyri sóknarprestar heldur strangaru ásetingarnar í Norsku Lóg 2-11-1: "*Præsterne skulle i al deris Liv og Levnet og Omgængelse sig saaledis anstille, som det Guds Ords Tienere bør, at deris Tilhørere kunde tage gode Exempler af dem, og deris Liv og Lærdom kand svare hin anden til Opbyggelse og uden Forargelse, saa at de ikke selv med deris Liv og Levnet deris Embede vanære, men sig saaledis altid forholde, som deris Kalds Værdighed udkræver.*" Eyðsýndur skyldskapur er millum hesar orðingarnar í Norsku Lóg og miðjuna í næstseinasta reglubroti í prestlyftinum, ið komandi sóknarpesturin skrivar undir (endurgivið í serstøku viðmerkingunum um stk. 2 í hesi grein), eins og tað eisini er fastur liður í prestvígsluritualinum, at skriftorð um tey kor, ið sóknarprestur gongur undir í virki og levnaði, verða lisin.
Báðar endurgivnu ásetingar eru ikki neyvar, nágreiniligar ásetingar, men vísa í meira almennum orðingum til tað, sum sømir seg embætinum. Nett hvar, ið markið gongur fyri tí, sum loyviligt er, kann tí skifta nakað, sum tíð, siðir og stað skifta; men avgerandi atlitið er, at sóknarprestur ikki leggur fót fyri prestgerningin, við at hann við lívsførslu síni leggur sjógv millum seg og kirkjuliðið. Heldur skulu lívsførðsla og læra stuðla undir hvørt annað, sum sagt verður í Norsku Lóg. Men ikki ber til at krevja ella vænta, at sóknarprestur skal liva sum ein "heilag" menniskja, ið ber embætinum uppi.
Eins og hjá øðrum tænastumonnum er greitt, at markið fyri tí, sum sóknarprestur kann loyva sær, tá hann er í tænastu, er trengri, enn tá hann hevur frí; men samband er millum persónin og embætið, og tí kann eisini tað, sum sóknarprestur ger í frítíðini, fáa embætisligar fylgjur. Her er rásarúmið hjá sóknarpresti heldur trengri enn hjá tænastumanni annars, og hetta, at ilt er á at skyna, nær sóknarprestur er í embæti, og nær hann hevur frí, virkar við til at treingja um rásarúmið. Hinvegin sigur siðvenjan higartil ikki, at *allstórur* munur kann sigast at vera á krøvunum til lívsførslu sóknarprests, í mun til tænastumenn annars, tó at munur er.

Er talan um próvhoyring við einum, ið er kallaður eftir ásetingunum í § 14, er mestsum sjálvsagt, at biskupur í hóskandi mun víkir frá krøvunum til formliga kunnleikan (í mun til støðið, sum skuldi verið, um talan var um kandidat í gudfrøði), tí verður § 14 nýtt, er kallingin í sjálvari sær at meta sum førleikagevandi, og tí skulu formligu førleikakrøvini júst ikki kunna vera avgerandi fyri, hvørt viðkomandi verður settur í embætið. Annars hevði próvhoyringin helst blivið ein avgjørd forðing fyri, at nakar kann verða settur eftir heimildini.

Biskupur ger sær eisini eina meting av, um hann hevur kunnleika til viðurskifti við lívsførsluni hjá umsøkjaranum, ið kunnu geva orsøk til at ivast í, um viðkomandi er skikkaður at gerast sóknarprestur. Her er grundregluliga talan um sama slag av viðurskiftum, ið kunnu gera, at sóknarprestur ikki lýkur decorumkrøvini. – Í donsku skipanini hevur biskupur harumframt lógarálagda skyldu at heinta inn "børneattest", men henda skipan geldur ikki í Føroyum. Biskupur kann í staðin velja at gera eina fasta skipan, har hann fær fulltrú frá øllum umsøkjarum til at heinta inn upplýsingar frá løgregluni um heilt privatu eginumstøður teirra, revsiverdum viðurskiftum og skuldsetingum viðvíkjandi, so at hann á samlíkan hátt tryggjar sær, at umsøkjarin eisini í so máta er skikkaður at gerast sóknarprestur.

Próvhoyringin kann vera ein avgerandi liður í setanartilgongdini, men hon er ikki ein starvssamrøða. Ein væl yvirstaðin próvhoyring verður við hesi broytingini eitt slag av førleikakravi. Hon verður eitt atgongumerki til yvirhøvur at sleppa á mál í setanartilgongdini, og av tí sama eru møguligar útreiðslur í sambandi við próvhoyringina grundregluliga útreiðslur hjá einstaka gudfrøðinginum, ikki hjá Kirkjugrunninum.

Stk. 2
Lærugrundarlagið, ið sipað verður til, er hitt lutherska. Játtanarskriv fólkakirkjunnar vórðu vald út við trúbótini og eru óbroytt, sum seinast ásett í Norsku Lóg 2-1. "*Den Religion skal i Kongens Riger og Lande alleene tilstædis, som overeens kommer med den Hellige Bibelske Skrift, det Apostoliske, Nicæniske og Athanasii Symbolis, og den Uforandrede Aar et tusind fem hundrede og tredive overgiven Augsburgiske Bekiendelse, og Lutheri liden Cathechismo.*"
Fólkakirkjan hevur tær tríggjar samkirkjuligu trúarjáttanirnar felags við flestallar aðrar kristnar kirkjur og hoyrir til evangeliskt luthersku kirkjurnar, av tí at hon eisini hevur augsburgsku trúarjáttanina frá 1530 og Luthers lítlu katekismus sum trúarjáttan og lærugrundarlag.
Nýggjari rættar- og mannarættindameginreglur hava broytt gildið av ásetingini í Norsku Lóg, soleiðis at hon ikki longur kann vera um, hvussu hin einstaki hevur skyldu til at trúgva, men einans ásetir neyvt, hvat lærugrundarlag fólkakirkjunnar er.

Kravið, um tilsøgnina um at vilja geva prestlyfti fólkakirkjunnar, er átøkt kravinum í § 5 í galdandi løgskipan.
Prestlyftið er í nakað ymiskum málsligum útgávum, ið tó eru innihaldsliga eins. Ein teirra er soljóðandi:
"*Eg, xxxxxxxxxxxxxxxxxxx, sum lógliga eri kallaður til embætið sum sóknarprestur í xxxxxxxxxxxxxxxx, og sum í samvitsku míni veit, at eg einki óœrligt havi gjørt fyri at koma í hetta embæti, lovi fyri ásjón Guds, sum alt veit:*

*Fyrst: at eg skal leggja mær nær við at prædika Guds orð reint og rætt, soleiðis sum tað finst í profetisku og apostólsku skriftunum og í symbolsku bókum evangelisk-luthersku kirkju okkara, við virðing og sóma fara um hini heilagu sakramentini eftir Jesu Krists fyriskipan, og her sum í øllum øðrum førum virka í samsvari við tær forskriftir, sum galdandi eru fyri fólkakirkjuna.*

*Framvegis: at eg eftir førimuni skal virka fyri, at náðinnar heilagu nýti ikki verða misbrúkt, at ungdóminum verður veitt kristilig upplýsing og vegleiðing, og virka ímóti slíkum lærdómum, sum ikki samsvara við trúarjáttan fólkakirkjunnar.*

*Endiliga: at eg við ídni og álvarsemi skal granska Guds orð og trúarinnar heilagu læru, og á tann hátt gera meg enn meira dugandi til hetta heilaga embæti, og sum tað sømir einum orðsins tænara, leggja mær eina við at vera kirkjuliðunum eitt gott fyridømi, á øllum økjum innan tænastu mína halda kirkjuligar lógir og fyriskipanir, sum tað er skylda mín, og hava slíka atferð mótvegis yvirvaldi og embætisbrøðrum, at eingin skal hava nakra grund til at klaga meg.*

*Alt hetta lovi eg við roknskapardegnum fyri eyga samvitskufult at vilja halda, eftir teirri náði, sum Gud vil geva mær.*"

Stk. 3
Sum siðvenjan er – og væntandi eisini fer at verða – er tað vanliga, at flestu umsøkjarar hava meira óformligt samskifti við biskup, og at møguligir trupulleikar í mun til læru og annað koma fyri ein dag í hesum samskifti. Tað vanliga man tí vera, at tey sum valla høvdu staðið próvhoyringina, frammanundan fáa ábending um hetta frá biskupi, og tískil hvørki biðja um at

koma til próvhoyringar, ella søkja embæti; men tey, ið lúka formligu treytirnar, hava rætt til at koma til próvhoyring, uttan so at biskupur frammanundan hevur trygga vitan um, at viðurskifti eru, ið forða fyri, at viðkomandi kann verða settur í starv.
Ásetingin um, at niðurstøður biskups skulu vera skrivligar, er, saman við innihaldsligu krøvunum í stykki 1, ætlað til at tryggja, at próvhoyringin verður meira gjøgnumskygd.
Í niðurstøðuskjalinum fer biskupur (væntandi vanliga) at skriva, at hann við støði í próvhoyringini fer at kunna geva gudfrøðinginum kallsbræv, og síðani skrivar hann stutt um, hvørji viðurskifti hann hevur kannað í próvhoyringini, og ábendingar um, á hvønn hátt úrslitið hevur verið nøktandi.
At sýta at geva kallsbræv er hinvegin ein tyngjandi fyrisitingarlig avgerð í mun til gudfrøðingin og krevur at verða grundgivin í niðurstøðuskjalinum. Grundgevingarnar fyri at sýta kunnu illa hugsast at vera aðrar, enn at viðurskifti í persónligu medferð, gudfrøðiligu fatan, embætissýni ella gudstrúgv hansara eftir meting biskups gera gudfrøðingin óskikkaðan at røkja embæti sum sóknarprestur.
Við hesum kann tann, ið hevur verið til próvhoyring, gera sær eina meting um, hvørt niðurstøður biskups eru grundgivnar og rímiligar í mun til endamálið, ið er ásett í fyrsta stykki.

Biskupur gevur komandi sóknarprestinum kallsbrævið við heimild í Norsku Lóg 2-3-3 í sambandi við prestvígsluna, og sambært somu áseting lesur próstur kallsbrævið upp undir innsetingargudstænastuni, ið vanliga er seinni, í størstu kirkjuni í prestagjaldinum, ella í kirkjuni í kirkjusóknini, har prestagarðurin er. Kallsbrævið er fortreyt fyri at kunna taka við embæti. Hetta er staðfest í hægstarættardómi 20.06.1862.

Uppskotna orðingin er *"um hann <u>við støði í próvhoyringini</u> fer at kunna geva umsøkjaranum kallsbræv"*, tí til ber at ímynda sær, at biskupur seinni fær kunnleika til okkurt, ella at okkurt hendir millum próvhoyringina og starvssetan, sum ger, at biskupur fær nýtt grundarlag at taka støðu til, hvørt hann kann geva kallsbræv. Umsøkjarin fær sostatt ikki við niðurstøðuskjalinum frá próvhoyringini eina treytaleysa tilsøgn um, at hann kann fáa kallsbræv.

Ásetingin um kallsbrævið í sambandi við próvhoyringina er eisini viðkomandi í sambandi við, at sóknarprestur, sum áður hevur verið í embæti, er til próvhoyring aftur, tí biskupur gevur kallsbræv, hvørja ferð sóknarprestur verður innsettur, tó ikki tá ið sóknarprestur verður skipaður í embæti at røkja fyribils.

**Um § 9**
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan.
Undan yvirtøkuni var siðvenjan, at danska kirkjumálaráðið mælti drotningini til at skipa prestagjøldini um, og (oftast í sama viðbragdi) at skipa embæti.
Í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum er ásett, at landsstýrismaðurin skipar prestagjøld um eftir tilmæli frá biskupi, og samsvarandi verður her skotið upp, at landsstýrismaðurin skipar embætini eftir tilmæli biskups.
Hetta, at politiski myndugleikin skipar prestagjøld og embæti, ber samstundis við sær, at veruleiki er í, at hann við prestvígsluloyvinum ger av, hvussu nógv verða prestvígd, tí eftir Norsku Lóg 2-3-9 skal eingin verða prestvígdur, uttan til ávíst embæti, jbr. eisini fyrstu reglubrotini í partinum "*Sóknarprestaembæti –setanartilgongd, vígsluloyvi og prestvígsla, setan og innseting*" í almennu viðmerkingunum.

Ofta er talan um eina og somu málsviðgerð av at umskipa prestagjøld og at skipa embæti, men í prestagjaldi við fleiri sóknarprestaembætum kunnu eitt nú størri broytingar í fólkatali elva til, at embæti verða skipað ella tikin av, uttan at prestagjøld verða skipað um.

Stk. 2
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan.
Undan yvirtøkuni var siðvenjan, at danska kirkjumálaráðið lýsti embæti leys og metti um, hvørt førleikakrøvini vóru lokin, áðrenn umsóknirnar vórðu latnar avvarðandi biskupi at viðgera saman við avvarðandi kirkjuráðum. Føroyar er eitt biskupsdømi, tí er einki at vinna við miðsavnaðari mannagongd, og tí hevur Mentamálaráðið síðani yvirtøkuna latið biskupi hesar uppgávur at loysa vegna Mentamálaráðið. Ásetingin leggur biskupi heimildina, og í sambandi við, at heimildin verður løgd út, er natúrligt at regluseta partar av tí, sum hevur verið siðvenja.
Hetta, at embæti verða lýst leys alment, hevur leingi verið siðvenja, men av tí at fólkakirkjan ikki er ein partur av almennu fyrisitingini, er rímiligt, at hesin opinleiki, ið annars er sjálvsagdur, tá talan er um almenn størv, verður tryggjaður við lóg.
Hinvegin verður ikki mett neyðugt at gera lógaráseting um, at biskupur sjálvsagt hevur samskifti við kirkjuráðini, áðrenn hann lýsir embæti leyst, tí hetta kemur av sær sjálvum við kirkjuligu skipanini.

Stk. 3
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan.
Vanligt sóknarprestaembæti er tænastumannastarv, men serlig viðurskifti kunnu fyriliggja, eitt nú at kirkjan ynskir at gera tíðaravmarkaðar royndir við setan til ávís endamál, ella hevur í hyggju at skipa prestagjøldini um í næstum, so at ítøkilig orsøk er til at gruna, at hetta kann koma at hava somikið stórt árin á setanarkorini í embætinum, at tað ikki hevði verið skilagott at sett embætið sum tænastumannastarv júst tá.
Meginreglan er, at tíðaravmarkað størv eru sáttmálasett, men undantak kann verða gjørt, um tann, sum verður settur í tíðaravmarkaða starvið, er tænastumaður frammanundan. Vanligt er eisini, at tann, sum verður settur í tænastumannastarv, og sum frammanundan hevur røkt samlíkt sáttmálasett starv, kann seta fram ynski um, at sáttmálaásetta eftirlønaruppsparingin (eftir reglunum í núgaldandi § 4a, í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumanneftirlønir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 14. mars 1997) verður goldin í landskassan, so viðkomandi á henda hátt keypir sær eftirlønarrættindi sum tænastumaður í staðin.

Stk. 4
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan; men ásetingin løgfestir ta *siðvenju*, ið leingi hevur verið, at biskupi hevur verið heimilað at skipa sóknarprest í embæti í upp til hálvt ár, og ta mannagongd, ið vanliga hevur verið nýtt í hesum høpi.
Kirkjuráðini eru altíð, uttan í hesum serligu førum, partur í setanartilgongdini, tí "*Sóknarprestur er tann, sum á rættan hátt er kallaður til at tæna í fólkakirkjuni við orði og við sakramentum og er vígdur til hesa tænastu*", sum ásett í § 7 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum, og kirkjuráðini eru tey, ið kalla prestin vegna kirkjuliðið. Sí eisini serstøku viðmerkingarnar til nevndu grein.
Her er talan um at seta sóknarprest í embæti, sum einans eru leys fyribils, til dømis tí at sóknarprestur er í styttri eftirútbúgvingarfarloyvi, ella býtir um starvsstað við annan sóknarprest eitt stutt skifti; meðan biskupur noyðist at hava serlig atlit, um hann av heilt serligum orsøkum hevur í hyggju at skipa prest fyribils í embæti, sum fer at verða lýst leyst um stutta tíð, tí hann má tryggja sær, at kirkjuráðini ikki í veruleikanum missa avgerandi ávirkan sína á, hvør ið verður settur.

Stk. 5
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan. Meginreglan eftir upskotinum er, at biskupur kann fremja slíka fyribilssetan uttan medvirkan frá politiska myndugleikanum. Hetta hevur hann higartil kunnað við standandi heimild frá landsstýrismanninum; men hevur biskupur í umbúna at skipa ikki-prestvígdan í starv, geldur ófrávíkiliga kravið um prestvígsluloyvi, ið einans landsstýrismaðurin (fyrr kongur) kann geva, og sum sambært Norsku Lóg 2-3-9 einans kann verða givið til ávíst embæti (*Ingen maa til Præste-Embedet indviis, uden hand til noget vist Kald og Embede er kaldet.........*). Við ávíst embæti er tó ikki einans at skilja fast starv sum sóknarprestur, men eisini øll størv eftir stykki 1, og §§ 15 og 16.

**Um § 10**
Samlík áseting er ikki í galdandi løgskipan. Ásetingin er ein fylgja av broyttu, nágreinaðu førleikakrøvunum.
Mannagongdin kemur í staðin fyri samskiftið, sum danska kirkjumálaráðið eftir skipanini undan yvirtøkuni hevði við gudfrøðideildina við universitetið í Keypmannahavn, og verður hin vanliga, tá umsøkjari verður visiteraður til at vera við í setanartilgongdini, um ikki prógvið er fevnt av “undangóðkenning” í kunnngerð við heimild í § 3, stk. 3, ella um ikki talan er um frávik eftir § 1, stk. 5 fyri umsøkjara, sum hevur verið, ið hvussu so er, 10 ár í starvi í kirkjusókn, sum hevur kallað hann eftir serstøku mannagongdini sbr. § 14.
Orðingin er, at biskupur letur nevndini skjølini til metingar. Hetta merkir, at gudfrøðilesandi ikki av sínum eintingum kann biðja nevndina um eina meting. Ætlanin við ásetingini er at tryggja, at biskupur sum lið í vegleiðingarskyldu síni, sbr. § 6, ger fyrstu grovsáldingina, til tess at spara nevndina fyri óneyðugt arbeiði, eitt nú av at skula taka støðu til próvskjøl, ið heilt ivaleyst ikki koma í námind av at lúka krøvini. Samstundis og av somu orsøk er ætlanin at tryggja, at biskupur er myndugleikin, ið vegleiðir lesandi um førleikakrøvini, ikki nevndin.

**Um § 11**
Áseting sum tann í fyrra punktum, ið leggur fast, hvørjar upplýsingar, ið biskupur, ið hvussu so er, skal senda kirkjuráðunum, er ikki í galdandi løgskipan, men siðvenja hevur verið, at danska kirkjumálaráðið hevur tikið móti umsóknunum og hevur sáldað tær umsóknir frá, ið ikki lúka førleikakrøvini.
Við hesum er eisini óbeinleiðis ásett, at tað er biskupur, ið tekur ímóti umsóknunum og tryggjar, at einans umsóknir, ið lúka førleikakrøvini, verða tiknar til viðgerðar. Hetta hevur verið siðvenja síðani yvirtøkuna.
Eisini er ásetingin um, at biskupur ikki sendir kirkjuráðunum umsóknirnar, fyrr enn allir umsøkjarar hava verið til próvhoyring, nýggj. Ásetingin er ein fylgja av nýggju ásetingunum í § 7, próvhoyringini viðvíkjandi. Her er talan um, at umsøkjarar, ið ikki frammanundan hava verið til próvhoyring, skulu til próvhoyringar, áðrenn biskupur kann lata setanartilgongdina halda fram, meðan biskupur sbr. § 7, stk. 3 sjálvur metir um, hvørt og í hvønn mun hann kallar umsøkjarar, ið áður hava verið til próvhoyring, inn aftur.
Staðin próvhoyring er strangt tikið ikki eitt førleikakrav, hóast hon er fortreyt fyri, at umsøkjari kann verða settur. Tí koma kirkjuráðini við hesi ásetingini eisini at fáa kunnleika um umsøkjara, sum biskupur ikki metir seg at kunna mæla til at seta, tí at próvhoyringin ikki var nøktandi. Biskupur hevur eyðvitað skyldu at kunna kirkjuráðslimirnar um, at hann ikki fer at kunna geva viðkomandi kallsbræv, so at tey fáa at vita, at eingin meining er í at mæla til at seta viðkomandi. Spurdómur er í, hvørt tað ikki hevði verið frægari, at slíkar umsóknir verða sáldaðar frá, eins og tær, ið ikki lúka formligu førleikakrøvini; men eftir galdandi skipan hevði próvhoyringin ikki

verið fyrr enn eftir, at kirkjuráðini hava gjørt tilmæli, so eftir galdandi skipan høvdu kirkjuráðini fingið hetta at vita. Skipanin verður eisini í ávísan mun meira gjøgnumskygd, um greitt er fyri øllum pørtum, at kirkjuráðini verða kunnað um, at umsøkjari ikki stendur próvhoyring.
Vísandi til ásetingina um, at niðurstøðuskjalið og upplýsingar í sambandi við próvhoyringina yvirhøvur eru ikki fevnd av rættinum til alment innlit, er tað mest hóskandi, at biskupur – tó at kirkjuráðini eru myndugleiki í málinum – hevur hóskandi varlæti, tá hann grundgevur fyri, hví hann ikki metir seg at fara at kunna geva ávísum umsøkjara kallsbræv, soleiðis at skilja, at hann ikki leggur fram fleiri og meira nágreiniligar upplýsingar frá próvhoyringini, enn tað sum neyðugt er, til tess at geva kirkjuráðunum sámiliga greiðar ábendingar um, av hvørjum slagi trupulleikarnir eru. – Skuldi kirkjuráðslimur mett, at kirkjupolitiskar orsøkir kunnu vera til at viðgera málið neyvari, kann hann fáa greiniligari upplýsingar frá umsøkjaranum, um umsøkjarin vil.
Hóast kirkjuráðini ikki fáa ítøkiligar upplýsingar um umsóknir, ið eru sáldaðar frá, tryggjar hetta, at biskupur skal upplýsa talið á umsóknum, ið komu inn, at kirkjuráðini vita av tí, um tey eitt nú hava varhuga av, at onkur umsøkjari, sum tey kanska hava serligan áhuga í at fáa í kallið, er áhugaður.

Seinna punktum minnir um § 9 í galdandi løgskipan. Ásetingin um, at leiðbeiningin tekur støði í vitanini, sum biskupur hevur fingið í próvhoyringunum, er tó eyðvitað nýggj.
Her verður tó ikki skotið upp at áseta, sum í galdandi løgskipan, at biskupur ella kirkjuráðslimir kunnu krevja, at ein fundur skal vera aftrat. Óneyðugt er at áseta hetta, tí tað er so sjálvsagt, at ikki ber til at fara víðari í tilgongdini, fyrr enn partarnir meta, at málið er nøktandi upplýst, í mun til tað sum ber til, uttan at koma málsgongdini órímiliga nógv í drag. Heldur ikki verður skotið upp at áseta, at umrødda tilgongdin skal vera sum skjótast. Eisini tað er sjálvsagt eftir vanligum fyrisitingarligum meginreglum, og tí ikki neyðugt at áseta staðiliga.

Stk. 2
Biskupur hevur eyðvitað ábyrgdina av tí partinum av setanartilgongdini, sum hann fremur, ella sum verður framd hansara vegna, men ásetingin staðfestir, at biskupur hevur eina serstaka ábyrgd, ið røkkur longur, og er meira ítøkilig enn vanliga umsjónin við virkseminum hjá kirkjuráðunum, til at tryggja, at kirkjuráðini eisini hava nøktandi og hóskandi leiklut í setanartilgongdini. Vert er at hava í huga, at meðan biskupur javnan er við í setanartilgongdum, er tað mestsum bara, tá illa vil til, at kirkjuráð virka við í so mongum setanum, at tey fáa dyggar royndir í tilgongdini.

**Um § 12**
At kirkjuráðini gera tilráðing í felag, merkir, at tey gera tilráðing á felags fundi. Reglurnar fyri felags kirkjuráðsfund eru ásettar í lógini um kirkjuráð og próstadømisráð (Løgtingslóg nr. 27 frá 19. mai 2008, núverandi § 24). Heraftrat verða greiniligari ásetingar um nett hetta slagið av felags kirkjuráðsfundi gjørdar í kunngerðini við heimild í § 13, stk. 5.
Ásetingin um, at tað ikki er eitt krav, at kirkjuráðini grundgeva fyri tilmælunum, er nýggj.
Hinvegin er siðvenjan – eins og tað, ið galdandi lóggáva leggur upp til – at tilmælið grundregluliga einans er úrslitið av atkvøðugreiðslunum á felags kirkjuráðsfundi.
Kirkjuráðini eru liður í fyrisitingarligari tilgongd, har ein avgerð verður tikin. Tí er helst tryggast at áseta staðiliga heimild til at víkja frá kravinum um grundgeving, hóast hetta strangt tikið ikki átti at verið neyðugt, vísandi til at kirkjan ikki sum slík er partur av almennu fyrisitingini.
Fleiri orsøkir eru til, at neyðugt er at víkja frá kravinum um grundgeving:

Havandi í huga, at kirkjuráðini, ið gera tilráðing, altíð eru fleiri, er eyðsæð, at tað kann gerast serstakliga trupult, um kirkjuráðini skulu finna semju um ella meiriluta fyri grundgevingini, serliga tí at biskupur longu hevur sáldað ikki skikkaðar umsóknir frá, so allar umsóknir eru frá skikkaðum umsøkjarum. Haraftrat eru kirkjuráðslimirnir ikki fakfólk á økinum, men leikfólk, ið umboða kirkjuliðið. Henda skipanin ger, at kirkjuráðslimir valla eru førir fyri at meta neyvt um til dømis eyka formligar førleikar, ið summir umsøkjarar hava fram um aðrar. Hetta er heldur ikki leiklutur teirra. Tvørtur ímóti skulu tey hava møguleikan at "velja við hjartanum". Talan er um eina tilgongd, har formligar fakligar dygdir og t.d. javnstøðuatlit ikki neyðturviliga eiga at viga eins tungt, og tá um vanligar setanartilgongdir hjá hinum almenna ræður.
Ásetingin um, at biskupur kann gera av, at tilráðingin skal vísa, hvussu umboðini fyri einstøku kirkjuráðini hava greitt atkvøðu, er átøk seinna punktum í § 8, stk. 2, í galdandi løgskipan, har tað tó er kirkjumálaráðharrin, ið kann gera hetta av.
Hetta kann til dømis vera viðkomandi, um umhugsað verður at nýta heimildina í § 13, stk. 3. Natúrligt er, at biskupur hevur heimildina, av tí at setanartilgongdin her í mestan mun er ábyrgdarøki biskups.

Stk. 2
Siðvenjan at boða umsøkjarum til samrøðu og lata teir royndarprædika hevur tikið seg nógv fram her, men aðrastaðni er hetta vanlig, føst mannagongd. Samlík áseting er tó ikki í galdandi lóg. Royndarprædikan kann ikki koma í staðin fyri setanarsamrøðu, kravið er, at bæði royndarprædika og setanarsamrøða skulu vera.
Endamálið við at seta kravið er, at hetta helst er einasti háttur at tryggja, at kirkjuráðini fáa eitt nøkulunda samlíkt grundarlag at taka avgerð á. Í flestu førum fara kirkjuráðini helst at hava betri kunnleika til summar umsøkjarar enn aðrar. Hetta at samrøður verða havdar við fleiri umsøkjarar, og teir fáa høvi at royndarprædika, fer at virka við til, at umsøkjararnir søkja starvið undir javnari fortreytum, og samstundis kunnu bæði umsøkjararnir og kirkjuráðini við samrøðunum tryggja sær, at sámuligt samsvar er millum tær væntanir, ið partarnir hava til, hvussu embætið verður røkt.
Ásett er, at kirkjuráðini kalla teir umsøkjarar inn, ið tey meta kunnu koma upp á tal at ráða til at seta, tí í summum førum er talið av umsøkjarum rættiliga stórt, og meining er ikki í at nýta tíð og pening til samrøður við umsøkjarar, ið kortini eftir øllum líkindum ikki fara at koma upp á tal. Hinvegin fer misjavnur undankunnleiki til umsøkjararnar helst at kunna gera, at meiriluti sjáldan verður fyri at kalla nógvar umsøkjarar inn, og tí er ásett, at umsøkjari skal verða boðin, um 3 kirkjuráðslimir ynskja hetta. Umsøkjari kann ikki krevja at verða boðin at royndarprædika, ella til setanarsamrøðu.
Í § 19, stk. 2 nr. 4 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar er Kirkjugrunninum heimilað at rinda aðrar útreiðslur í sambandi við sóknarprestaembætið, harundir eisini útreiðslurnar í sambandi við, at umsøkjarar verða bodnir til royndarprædiku og setanarsamrøðu.

Stk. 3
Eftir § 1, stk. 2 í lógini um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni eru gudstænastur og aðrar kirkjuligar tænastur almennar. Tí ber líka lítið til at lata royndarprædiku sum aðra gudstænastu vera fyri innbodnum einans, um ikki serstøk heimild er fyri hesum.
Serliga um umsøkjari er í embæti frammanundan, er sannlíkt, at tað *kann* koma illa við, um tað verður alment, at viðkomandi søkir annað kall. Tí kundi kravið um royndarprædiku gjørt, at umsøkjari helt sær aftur, um ikki royndarprædikan kann vera fyri kirkjuráðslimunum einans.

Í summum førum ber helst til at laga tað soleiðis, at kirkjuráðslimirnir kunnu fara til vanliga gudstænastu hjá umsøkjara, uttan at hetta vekir ans, og so kann hetta verða gjørt, men neyðugt er at hava møguleika fyri, at royndarprædikan kann vera ein serstøk gudstænasta, ið er í trúnaði. Ásetingin um, at umsøkjarin og biskupur skulu vera samdir um, at royndargudstænastan kann vera almenn, skal – umframt møguligu áhugamál umsøkjarans í, at tilgongdin er í trúnaði – eisini tryggja, at kirkjuráðslimirnir kunnu fáa heilt eins karmar um royndarprædikurnar, um tey ynskja hetta.

**Um § 13**
Beinleiðis samsvarandi áseting, sum hon í fyrra punktum, er ikki staðiliga ásett í galdandi løgskipan, tá um sóknarprestaembæti ræður, men í pørtunum um próst og dómpróst (§ 13, stk. 2, og § 14, stk. 2 í galdandi løgskipan).
Hinvegin er greitt, at eftir galdandi mannagongd, eins væl og eftir samlíku mannagongdini í uppskoti, ber ikki til hjá landsstýrismanninum at avgreiða setanina, um hann ikki veit rættiliga neyvt, hvussu kirkjuráðini hava atkvøtt.
Talan er um tvinni tilmæli, sum tvinnir myndugleikar (biskupur og kirkjuráðini) í setanartilgongdini gera. Hesi hava ymiskar leiklutir og ymisk atlit. Úrslitið av tilgongdini kann tí væl hugsast at verða, at biskupur mælir til annað enn nett tað sama sum kirkjuráðini.
Ásetingin í seinna punktum er innihaldsliga nýggj. Eftir galdandi mannagongdum kann úrslitið av setanartilgongdini vera, at umsøkjari, ið einans hevur fingið atkvøðu frá einum kirkjuráðslimi við triðju atkvøðugreiðslu (um øll hini atkvøddu blankt), verður settur í embætið, um bæði nr. 1 og nr. 2 taka seg aftur. Hetta er óheppið, eisini fyri tann, ið settur verður, tí lutfalsliga atkvøðubýtið mundi mangan verið eitt heilt annað, um greitt hevði verið, at fyrst tilmælti ikki var millum umsøkjararnar.
Kirkjuráðini fáa við ásetingini høvi at gera nýggja tilráðing, uttan mun til nær í tilgongdini, umsøkjari tekur seg aftur – eisini um umsøkjari tekur seg aftur, eftir at biskupur hevur sent landsstýrismanninum tilmæli.
At kirkjuráðini “fáa høvi” at gera nýggja tilráðing, merkir, at tey kunnu velja at lata vera við at gera nýggja tilráðing, og setanin verður tá framd við støði í upprunaligu tilráðingini.
Eftir lóg um tænastumenn landsins verða sóknarprestar, sum lúka treytirnar fyri hesum, vanliga settir sum tænastumenn landsins, tó við nøkrum frávikum, sum gera, at skipanin hóskar betur í kirkjuligum høpi. Mentamálaráðið hevur heitt á Fíggjarmálaráðið um at taka frávikið viðvíkjandi royndarsetan burtur, so at sóknarprestar kunnu verða royndarsettir eins og aðrir tænastumenn.

Stk. 2
Ásetingarnar er tær somu sum í § 10, stk. 2 í galdandi løgskipan og undirstrika, (saman við fyrsta pkt. í fjórða stykki) hvussu avgerandi kallingin er, tá sóknarprestur verður settur í embæti: Hava ikki verið álvarslig brek í setanartilgongdini, ella broytast fortreytirnar ikki, áðrenn tilgongdin er endað, er restin av setanartilgongdini einans at tryggja, at reglur og siðvenjur verða fylgdar, tá setanin verður avgreidd, tá øll í kirkjuráðunum longu í fyrstu atløgu eru samd um, hvør umsøkjari eigur at fáa embætið. Sama er, tá ið hvussu so er tveir triðingar av kirkjuráðslimunum hava greitt atkvøðu fyri sama umsøkjara í prestagjaldi, har einans eitt sóknarprestaembæti er (sí tó eisini serstøku viðmerkingarnar til stk. 3). – Er ikki so serstakliga stór undirtøka fyri ávísum av teimum tilmæltu, stendur landsstýrismanninum hinvegin frítt at seta annan umsøkjara enn hann, sum fekk flestar atkvøður. Mótsatt kirkjuráðslimunum skal landsstýrismaðurin tó kunna grundgeva sakliga fyri avgerð síni, og ein slík hugsandi saklig grundgeving kundi verið, at biskupur mælir til at seta onkran annan av umsøkjarunum, sum kirkjuráðini mæla til.

Hetta, at kirkjuráðslimirnir kunnu hava so altavgerandi leiklut í setanartilgongdini, undirstrikar eisini, hvussu neyðugt tað er, at biskupur við kunning og leiðbeining síni gevur teimum best møguligar fortreytir fyri at meta um dygdirnar hjá hvørjum einstøkum umsøkjara í mun til embætið.

Stk. 3
Ásetingin er hin sama sum í § 10, stk. 3 í galdandi løgskipan.
Orðingin um minnilutar sipar í hesum føri ikki til fólkaeyðkenniligar minnilutar, men til ymiskar átrúnaðarliga grundaðar kirkjuligar fatanir, sum rúm er fyri innan lærugrundarlag fólkakirkjunnar.
Ásetingin, sum verður nýtt sera sjáldan, er til tess at varðveita breiddina í fólkakirkjuni, so at sum flest kunnu kenna seg aftur í kirkjuni.
Eitt nú ber til at hugsa sær, at 45% av kirkjuráðslimunum umboða eitt sjónarmið, meðan tey 55% umboða onnur sjónarmið, ið liggja ræettiliga langt frá hesum fyrru. Eru tvey ella fleiri sóknarprestaembæti, kann góð meining vera í at tryggja sær, at tað ikki einans eru sjónarmiðini hjá meirilutanum, ið hvørja ferð verða best umboðað við setanini.
Uttan mun til hesa ásetingina geldur ásetingin í stykki 4 um, at landsstýrismaðurin ikki setir umsøkjara, ið ikki er teirra millum, sum kirkjuráðini ráða til at seta, og tí er neyðugt at áseta í kunngerðini eftir § 13, stk. 5, at hevur landsstýrismaðurin fingið áheitan um at nýta hesa heimildina, skulu øll, sum atkvøtt er fyri við fyrstu atkvøðugreiðslu, vera í tilráðingini frá kirkjuráðunum.

Stk. 4
Ásetingin er hin sama sum í § 10, stk. 1 í galdandi løgskipan.
Ásetingin í fyrra punktum tryggjar, at kirkjuráðini, ið virka við í kallingini vegna kirkjufólkið í prestagjaldinum, veruliga hava peikað á tann, ið settur verður.
Ásetingin í seinna punktum tryggjar, at landsstýrismaðurin altíð kann lata setanartilgongdina byrja heilt umaftur. Tað er ein vanlig meginregla, at setanarmyndugleikin altíð kann velja at lýsa starv leyst aftur, heldur enn at seta tað, men neyðugt er at staðfesta, at hetta eisini er ein møguleiki, tá um sóknarprestaembæti ræður, tí tilgongdin er so serlig.
Mótsatt í galdandi løgskipan verður ikki skotið upp at áseta, at tað er “undir serligum umstøðum”, landsstýrismaðurin kann taka hesa avgerð. Ilt er at siga, hvat serligar umstøður eru. Hinvegin er greitt, at landsstýrismaðurin sum fyrisitingarmyndugleiki skal kunna grundgeva sakliga fyri slíkari avgerð; meðan serstøk, ítøkilig grundgeving ikki nýtist vera fyri avgerðini hjá kirkjuráðunum, sbr. § 30e í Tænastumannalógini um at heita á biskup um at lata starvið lýsa leyst av nýggjum. – Ikki onnur enn annaðhvørt hetta, at kirkjuráðini halda, at eingin av umsøkjarunum, er nóg væl skikkaður til starvið, ella at ov fáar umsóknir eru komnar til starvið, soleiðis sum ásett er í lógini.
Ásetingin í fyrra punktum er at skilja bókstaviliga: skuldi tað til dømis hent, at allir umsøkjarar, sum kirkjuráðini hava mælt til at seta, hava tikið seg aftur, áðrenn landsstýrismaðurin hevur framt setanina, noyðist setanartilgongdin at byrja heilt umaftur, uttan so at biskupur og kirkjuráð semjast um, at so nógvir skikkaðir umsøkjarar eru eftir, at tilgongdin kann byrja umaftur við, at kirkjuráðini gera nýggja tilráðing. – Hinvegin er tað einans, tá umstøðurnar eru sum í stk. 2, at formlig forðing er fyri, at tilmæltur umsøkjari verður settur, hóast hann hevur fingið fáar atkvøður, um biskupur til dømis mælir til hetta.
Skipanin miðar ímóti, at landsstýrismaðurin ikki fer so nógv í staklutir í málsviðgerðini – til dømis kann embæti væl bæði verða lýst av fyrstan tíð og verða lýst leyst av nýggjum, áðrenn tilgongdin er komin so langt, at landsstýrismaðurin fær tilmæli, uttan at landsstýrismaðurin

verður kunnaður um hetta – so serlig viðurskifti skulu til, um landsstýrismaðurin skal taka stigið at gera av, at embætið verður lýst leyst av nýggjum; men hetta kann til dømis verða neyðugt, um einki samsvar er ímillum tilmælið frá kirkjuráðunum og tilmælið frá biskupi: landsstýrismaðurin kann ikki seta umsøkjara, ið kirkjuráðini ikki ráða til at seta, og tað man meira enn so kunna hugsast, at ikki er ráðiligt at seta umsøkjara, ið biskupur ikki mælir til at seta. Í slíkum førum er natúrligt, at landsstýrismaðurin hevur samskifti við biskup, aðrenn nøkur avgerð fellur.

Stk. 5
Ætlanin er, at kunngerðin eitt nú skal áseta greiniligari reglur um atkvøðugreiðslu og mannagongdir, samsvarandi teimum sum í dag galda, tó við teimum broytingum og tillagingum, sum fylgja av broytingunum í lógaruppskotinum.
Uppskot til kunngerð eftir hesi grein liggur hjá sum fylgiskjal 2 (ER IKKI GJØRT ENN).

**Um § 14**
Í stuttum er virknaðurin av ásetingunum í hesi grein, at hevur kirkjuliðið eitt nóg sterkt ynski um at kalla onkran til prest, verður viðkomandi sóknarprestur teirra, grundregluliga uttan mun til um viðkomandi hevur útbúgving yvirhøvur. Í hesum serstaka føri eru einastu førleikakrøvini limaskapur í fólkakirkjuni, at viðkomandi er, ið hvussu so er, 35 ár, at viðkomandi stendur próvhoyringina hjá biskupi – og so fortreytin: hetta, at ynskið um at kjósa sær júst henda ávísa persónin til prest, er so sterkt og so breitt grundað í kirkjuliðinum.
Ásetingin svarar – til og við nr. 2 – rættiliga neyvt til § 11, stk. 1, og (fyri ein part) stk. 2 í galdandi løgskipan; men treytirnar eru herdar millum annað við, at skotið verður upp at krevja, at í minsta lagi 40% av kirkjufólkinum í hvørjari av kirkjusóknunum í prestagjaldinum skulu skriva undir áheitanina á biskup. Í galdandi løgskipan er kravið 20%, eins og í donsku lógini, sum løgskipanin er gjørd eftir. Flestu kirkjuliðini eru smá, og tað vanliga er, at væl størri partur av kirkjuliðinum er kirkjuliga virkin í Føroyum enn í Danmark. Tí er kravið um í minsta lagi 20% helst væl ov lágt í mun til føroysk viðurskifti. Endiliga tykist tað yvirhøvur, sum um at føroyingar í væl størri mun enn fólk í grannalondunum eru fúsir at skriva undir, tá biðið verður um undirskriftir, og hetta talar eisini fyri at hækka markið.
Eisini kann ein ávís herðing í treytunum liggja í, at bæði kirkjuráðini og stóri minnilutin av kirkjufólki skulu meta, at ynski er um at seta viðkomandi, til tess at kirkjuliðsfundur verður um evnið. Hinvegin man tað vera eitt rímiligt krav at seta, at stór undirtøka skal vera fyri at kjósa henda ávísa persónin til prest, um vanligu mannagongdirnar og førleikakrøvini skulu kunna verða sett so fullkomiliga til viks.
Orðingin um, at biskupur uttan mun til mannagongdina eftir §§ 12 og 13 kann mæla landsstýrismanninum til, at viðkomandi verður settur, merkir, at gongur kallingin eftir hesi grein ígjøgnum, verður vanliga mannagongdin steðgað, og , hinar umsóknirnar verða ikki viðgjørdar.
Reglan er – saman við reglunum um kirkjuráð og próstadømisráð, um at loysa sóknarband og um valkirkjulið – við til at tryggja, at fólkakirkjan í roynd og veru er fyri allar tær trúarlæruligu fatanir, sum eru sambæriligar við lærugrundarlag fólkakirkjunnar.
Henda reglan hevur, eins og reglurnar um valkirkjulið, ítøkiligt nyttuvirði, uttan mun til, hvørt hon verður nýtt, um so er, at ymisku partarnir hava í huga, at møguleikin er til staðar, og tí ikki eitt nú nýta ein tryggan meiriluta til áhaldandi at seta loysnir ígjøgnum, sum ganga einum týðandi minniluta ríkiliga nær. Harumframt liggur stórt súmbolskt virði í, at júst hesin møguleikin er til: ásetingin peikar aftur til læru Luthers um, at hvør tann, sum er doyptur við kristna dópinum, longu hevur lut í almenna prestadøminum, og at kirkjunnar sjónliga skipan fyrst og fremst krevur, at prestur er kallaður á rættan hátt til sítt embæti.

Ikki eitt einasta krav um formliga útbúgving kann verða sett honum, ið verður settur á henda hátt. Tí er rímiligt at tryggja sær, at viðkomandi er persónliga og átrúnaðarliga búnaður, og at toliliga skilligt er, at viðkomandi eisini hevur gávur at røkja prestagerningin. Tí verður skotið upp at leggja krøvini í nr. 3 og 4 afturat teimum galdandi. Hesi krøv eru tey somu, sum eftir § 2 í galdandi løgskipan verða sett teimum, sum kunnu verða sett í sóknarprestaembæti, hóast tey hvørki eru kosin á serstakan hátt (sum eftir § 14 í uppskotinum), ella lúka vanligu førleikakrøvini (henda danska skipanin við sonevndum neyðprestum hevur einans verið nýtt hendinga skifti, tá alt ov fáir skikkaðir gudfrøðingar hava verið til at søkja embætini, og skotið verður ikki upp at taka heimildina við í lógaruppskotið).
Reglurnar um valrætt, ið nú eru ásettar í §§ 3-8 í Løgtingslóg nr.107 frá 17. august 2009 um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn, sum broytt við løgtingslóg nr. 10 frá 26. februar 2010, áseta í stuttum, at øll kirkjufólk í kirkjusóknini, sum eru fylt 18 ár valdagin, hava valrætt (verandi § 3, stk. 1)
Tá atkvøðurnar á kirkjuliðsfundi verða gjørdar upp, verða eisini blonku atkvøðurnar taldar við. Treytin í seinasta punktum er meinlík § 3, stk. 2 í galdandi løgskipan.
Valkirkjulið skal – við teimum frávikum, ið fyljga av øðrvísi atknýtinum at fólkakirkjuskipanini og víðtøkna sjálvræðinum egnum viðurskiftum viðvíkjandi – hava somu rættindi og skyldur sum kirkjusókn, og kann tí eisini kjósa sær sóknarprest undir fortreytum, ið eru so sambæriligar við tær hjá einum og hvørjum øðrum kirkjuliði, sum til ber; men ikki ber til at halda kravinum í nr. 2) uppi, uttan so at valkirkuliðini eru fleiri, og sjálvkravd samvirka um at kjósa ávísan prest. Kravið um meiriluta á aðalfundi kemur tí aftrat. – Og hetta vil siga, at tað í roynd og veru kemur í staðin fyri nr. 2), uttan so at fleiri valkirkjulið eru, og samvirka um at kjósa sær hin sama til prest.

Stk. 2
Eftir samsvarandi ásetingini í § 11, stk. 2 í galdandi løgskipan ber til at býta kirkjuliðsfundin sundur, so hann verður hildin sum tvinnir fundir, ið eru samstundis. Neyðugt skuldi ikki verið at havt henda møguleikan. Skuldu hølistrupulleikar víst seg at verið ein bági, ber helst til at fáa frægari úrslit við at nýta nútíðar samskiftistøkni, so at sami fundur verður hildin í tveimum hallum samstundis.

Stk. 3
Setanin verður annars framd eftir mannagongdunum í § 13, í tann mun serstaka tilgongdin eftir § 14 ger, at hetta ber til.

**Um § 15**
Lógin um fólkakirkjuna í Føroyum letur í § 8 upp fyri hesum sløgum av starvssetanum.
Biskupur kann leggja ávísum sóknarpresti ella ávísum sóknarprestaembæti seruppgávur, ið sóknarpresturin røkir fyri stiftið alt, ella fyri ávís prestagjøld, um so skuldi verið. Hetta er ikki annað enn vanlig arbeiðsleiðsla og krevur ikki serstaka heimild; men er talan um so stórar uppgávur, at tær ikki kunnu verða røktar samstundis, sum meginparturin av arbeiðsorkuni fer til vanliga sóknarprestagerningin, er embætið ikki eitt vanligt sóknarprestaembæti, og tað krevur tá at verða skipað og lýst leyst við veruliga starvsinnihaldinum.
Eins og tá um vanlig sóknarprestaembæti ræður, kann embæti ikki verða stovnað ella tikið av uttan eftir avgerð landsstýrismansins, sbr. § 4, stk. 3 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.
Innlendis kann talan vera um stovnsprestar, so sum sjúkrahúsprest ella fongsulsprest, sum longu er í skipanini, ella til dømis um sonevndan stiftsprest, ið verður settur at arbeiða burturav við

ávísum verkevni – eitt dømi kundi verið ungdómsgudstænastur og konfirmatiónsfyrireiking – í føstum starvi ella sum verkætlanarsettur.
Uttanlands kann talan vera um sjómansprest, ella prest ið meira beinleiðis er settur at virka millum landsmenn uttanlands yvirhøvur.

**Um § 16**
Ásetingarnar í hesi grein eru, vísindastarvsfólki viðvíkjandi, løgfesting av siðvenju, ið leingi hevur verið í Danmark, og koma annars í staðin fyri mesta partin av *"Bekendtgørelse nr. 49 af 21. Januar 1921 om Præstevielse af teologiske Kandidater i visse Tilfælde"*, sum skotið verður upp at taka av við skiftisásetingunum í hesum lógaruppskoti (§ 36, stk. 1, nummar 4). Víst verður til serstøku viðmerkingarnar til hesa og til almennu viðmerkingarnar.

Við heimildini eftir nr. 1 (ið løgfestir siðvenju, sum høvi ikki higartil hevur verið til at nýta í Føroyum) kann landsstýrismaðurin heimila biskupi at prestvíga gudfrøðing, ið lýkur allar treytir fyri at koma í embæti sum sóknarprestur, men sum granskar mestsum burturav í føroyskum kirkjuviðurskiftum í Føroyum.
Førleikakrøvini til vísindastarvið, ið neyðugt er at gera, til tess at kunna halda førleikakrøvunum eftir § 2, stk. 1, uppi (sí serstøku viðmerkingarnar um § 2, stk. 1), fara fyrst og fremst at vera vísindalig. Tí er ikki givið, at granskarin er sóknarprestur frammanundan, ella lýkur førleikakrøvini til tess at verða prestvígdur.
Í Danmark er siðvenja, at tey vísindastarvsfólk í gudfrøði, ið ynskja tað, og sum lúka treytirnar, kunnu verða prestvígd til ólønta tænastu í ávísum prestagjaldi, tí tað verður mett gagnligt, at tey eisini sjálv kunnu gera sær nakrar royndir við at virka sum sóknarprestur.
Ivi kann vera um, hvørt slík óløgfest siðvenja flytur við í sambandi við yvirtøkuna, havandi í huga, at talan er ikki um siðvenju, ið kann sigast at hava nakran størri týdning í kirkjuskipanini. Tí er tryggast at løgfesta møguleikan.
Avmarkingin, sum liggur í, at gudfrøðingurin skal hava starvsøkið, ið er aðalatvoldin til, at prestvígslan skal kunna vera ein møguleiki sum høvuðsstarv, vísir aftur til meginregluna, sum verið hevur síðani trúbótina, at prestvígd verða ikki fleiri, enn neyðugt er, til tess at røkja prestagerningin í landinum. Orsøkin til, at orðingin í 1) er "sum høvuðsstarv", og ikki, sum í 2), "í fulltíðarstarvi" er, at sum gongdin hevur verið seinnu árini, er alt meira vanligt, at vísindastarvsfólk fáa munandi uttanhýsisfígging í sambandi við granskingarverkætlanir, eins og tey part av starvstíðini kunnu virka við í størri uttanhýsis granskingarverkætlanum, og spurnartekin tí kanska kann verða sett við, hvørt tey formliga sæð í roynd og veru eru í fulltíðarstarvi hjá lærda háskúlanum.
Ætlanin er sostatt ikki, at t.d. fleiri gudfrøðingar í parttíðar granskingarstarvi kunnu verða prestvígdir við hesi heimild, men at møguleiki skal kunna vera at gera hetta í einstøkum førum.

Við heimildini eftir nr. 2 (ið higartil ikki hevur verið nýtt í Føroyum, men hevur verið nýtt nokkso javnan í Danmark) kann biskupur prestvíga gudfrøðing, ið lýkur allar treytir fyri at koma í embæti sum sóknarprestur, sum stovnsprestur ("institutionspræst"), til at virka hjá fríum kirkjuligum felagsskapi.

Treytin um, at gudfrøðingurin er í fulltíðarstarvi hjá felagsskapinum, merkir, at viðkomandi kann skjalprógva, at bróðurparturin av inntøkuni kemur frá felagsskapinum, og at gudfrøðingurin kann leggja við uppgerðir e.a., ið greitt benda á, at eisini bróðurparturin av arbeiðstíðini verður nýttur í tænastu hjá felagsskapinum.

At henda fortreytin stendur í nútíð (ikki í framtíð) merkir eisini, at viðkomandi má vera og hava verið í starvi hjá felagsskapinum í rættiliga drúgva tíð (t.d. eini tvey ár), so at til ber at vísa á, at treytin er lokin, og benda á, at hon framhaldandi fer at verða hildin.
Hetta ber í sær, at einans ein væl skipaður felagsskapur, sum hevur manning og fíggjarorku til at arbeiða við rættiliga langskygdum tíðarkørmum, fer at vera førur fyri at lúka treytirnar.

Einki er at taka seg aftur í, at slíkar skipanir eru ikki í fullum samsvari við kirkjuskipanina annars, og ráðiligast er tí, at tær verða nýttar við varsemi og afturhaldni, eins og higartil hevur verið í Danmark.
Greitt verður frá, hvat liggur í hugtakinum "fríur, kirkjuligur felagsskapur" í serstøku viðmerkingunum til stykki 3.

Neyðugt er ikki at gera serstakar reglur um møguleikarnar hjá presti eftir hesi grein at nýta kirkjur, tí reglurnar í lógini um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni eru somikið breitt orðaðar.

Prestur, sum er vígdur eftir hesi áseting, kemur, tó at hann ikki er í embæti sum sóknarprestur, í prestagerningi sínum grundregluliga at hava nett somu embætisskyldur, sum um hann var sóknarprestur; men av tí at hann ikki verður í embæti sum sóknarprestur, og tí við fáum undantøkum ikki hevur dagligar tænastuskyldur sum ein sóknarprestur, verður í verki fyrst og fremst talan um skyldurnar til at vera trúfastur móti lærugrundarlagi fólkakirkjunnar, virða kirkjusiðirnar og vera trúgvur móti verðsligu yvirvøldini.

Prestur, sum er vígdur eftir hesi áseting, fer at hava rættindi at virka sum ein og hvør annar prestvígdur, men fær ikki við hesum starvsfólkarættindi ella setanarkor sum sóknarprestur, hvørki frá fróðskaparsetrinum/felagsskapinum ella fólkakirkjuni.

Prestur, sum er vígdur eftir hesi áseting, verður ikki í starvi í fólkakirkjuni. Tí fara brot á frammanfyri nevndu embætisskyldur ikki at kunna fáa aðrar tænastuligar fylgjur, enn at viðkomandi kann koma til tænastuligar samrøður, fáa átalu, fáa ávaring, og í serliga víðgongdum føri at kallsbrævið verður tikið aftur (viðkomandi "missir kragan"), alt grundregluliga undir somu treytum og eftir somu mannagongdum, sum um talan var um sóknarprest – ella kanska heldur um talan var um pastor emeritus, ella annan prestvígdan, ið ikki er í starvi.

Stk. 2
Treytirnar í nr. 1 og 2 eru orðaðar við fyrimynd í treytunum nr. 2 og 6 í kunngerðini frá 1921, og siðvenjuni, ið var eftir hesi, ta tíð hon galt í Danmark.

Um 1)
Ikki ber til at gerast prestur í fólkakirkjuni, uttan at skriva undir prestalyftið. Váttanin eftir § 8, stk. 2 er um, at gudfrøðingurin hoyrir til fólkakirkjuna, tekur undir við lærugrundarlagi hennara og vil geva prestlyfti fólkakirkjunnar; men í hesum førunum er endamálið við tilgongdini ikki, at viðkomandi verður settur í starv í fólkakirkjuni, og tí er neyðugt, at viðkomandi, í staðin fyri tað sum annars natúrliga hevði hent í sambandi við setanina, skrivliga váttar at vilja fylgja reglunum, ið galda í fólkakirkjuni.
Kravið um hesa váttanina er nýtt í mun til nr. 2 í kunngerðini frá 1921, ið einans er um eitt lyfti átøkt prestlyftinum.
Um 2)

Árliga frágreiðingin, ið er kravd eftir nr. 6. í kunngerðini frá 1921, er við til at tryggja, at fast skipað samskifti er millum biskup og prestvígda. Støðugt samskifti, sum annars millum sóknarprest og biskup/dómpróst, um gerandis tænastulig viðurskifti verður valla eins sjálvsagt í slíkum førum, men frágreiðingin verður við til at tryggja neyðuga samskiftið.

Stk. 3
Um 1)
Sum fríur, kirkjuligur felagsskapur er at skilja felagsskapur, sum hevur júst sama lærugrundarlag sum lærugrundarlag fólkakirkjunnar – hvørki meira ella minni – men sum er skipanarliga óheftur av fólkakirkjuni. Hetta vil siga, at felagsskapurin ikki er partur av formliga bygnaðinum, fíggjarkervinum og starvsskipanini í fólkakirkjuni – og heldur ikki fevndur av lógarkørmunum um fólkakirkjuna.
Dømi um frían, kirkjuligan felagsskap kundi verið Kirkjuliga Heimamissiónin ella Kirkjuliga Missiónsfelagið, KFUM ella KFUK, meðan eitt nú ein kirkjusókn ella eitt prestagjald ikki kunnu roknast sum slíkir, tí tey eru partur av formligu skipan fólkakirkjunnar. Ein tvørkirkjuligur felagsskapur er heldur ikki at rokna sum slíkur, tí at hann ikki allur virkar á nett sama lærugrundarlagi sum fólkakirkjan.
Hugsa vit okkum eina lutherska fríkirkju í Føroyum, sum hevði nett sama lærugrundarlag sum fólkakirkjan, hevði henda heldur ikki verið at rokna sum fríur, kirkjuligur felagsskapur í lógarinnar høpi, tí at "kirkjuligur" í lógarinnar høpi er at skilja sum "fólkakirkjuligur", sbr. siðvenjuna, ið varð byrjað við málbúnanum í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum.
Til ber kanska at siga, at fríur kirkjuligur felagsskapur altíð fyrst og fremst hevur slíkt virksemi,

1. sum kirkjan hevði verið noydd at átikið sær, vóru kirkjuligu felagsskapirnir ikki,
2. ella, ið hvussu so er, slíkt virksemi, sum rúm eisini hevði kunnað verið fyri í meira formligum kirkjuligum høpi.

Ikki ber til at seta neyvt orð á, hvat liggur í hugtakinum "munandi týdning", tað veldst fyri ein part heilt greitt um hirðaligu meting biskups, sum júst ikki skal verða reglusett, men greitt er, at felagsskapurin má kunna metast at vera munandi í kirkjuligum høpi, bæði í slagi og vavi, og týdningurin skal vera fyri meira enn bert ein heilt smalan málbólk, ella í onkrum avmarkaðum parti av landinum. – Og landsstýrismaðurin og biskupur skulu vera samdir um hesa meting av viðurskiftunum, og landsstýrismaðurin er ikki bundin at fylgja tilmæli biskups.

Um 2)
Talan skal vera um skrivliga, formliga tilgongd, ið felagsskapurin tekur stig til, ikki kirkjuligi myndugleikin.

Um 3)
Ásetingin krevur sum so ikki serstakar viðmerkingar, men við hesum er eisini sjálvsagt, at talan skal vera um somikið nógv og støðugt fólkakirkjuligt virksemi í felagsskapinum, og at somikið nógv fólk eru virkin í hesum støðuga virksemi, at høpi er í at prestvíga eitt fólk til hesa tænastu.

Stk. 4
Ásetingin er nýggj í mun til kongligu fyriskipanina frá 1921.
Avmarkingin er ætlað til at tryggja, at talan verður um eitt fátal av prestum, soleiðis sum danska siðvenjan hevur verið, so at í høvuðsheitum verður hildið fast við aðalregluna úr Norsku Lóg um, at prestarnir skulu ikki vera fleiri, enn tað sum krevst til tess at røkja vanliga gudstænastulívið.
Aðalreglan í Norsku Lóg er inngangurin í 2-3-9, og ljóðar "*Ingen maa til Præste-Embedet*

*indviis, uden hand til noget vist Kald og Embede er kaldet....*" og talan er um eina av meginreglunum frá trúbótini.
Tí verður eisini mett rímiligt, at avmarkingin er í lutfalli til sóknarprestaembætini í fólkakirkjuni. Uppskotna avmarkingin tryggjar eisini ímóti, at fólkakirkjan so líðandi – av eintingum ella til dømis undir fíggjarliga grundaðum trýsti frá politiska myndugleikanum – skal kunna rokna við at spara í sóknarprestaembætum við at lata eitt vaksandi tal av prestum hjá sjálvbodnum felagsskapum átaka sær vaksandi partar av uppgávunum hjá sóknarprestunum.
Við orðingini koma prestvígslur eftir 1) ikki at ávirka møguleikan fyri at prestvíga eftir 2). Samsvarandi avmarking verður ikki skotin upp fyri prestvígslu eftir 1), tí orsøk er ikki til at vænta, at nógv fólk fara at hava gransking í føroyskum kirkjuviðurskiftum sum høvuðsstarv, og hartil vera starvssett í Føroyum.

**Um § 17**
Ásetingin svarar innihaldsliga til § 7, stk. 3 í galdandi løgskipan.
Mannagongdirnar undan setanini koma at vera ymiskar, alt eftir hvørjar uppgávur talan er um at seta prest til at røkja. Er talan um sjómansprest, sum sjómanskirkjan setir, er natúrligt, at sjómanskirkjan sjálv hevur kallandi leiklutin, ið annars tilkemur kirkjuráðunum, meðan serstakar mannagongdir mugu verða gjørdar og lagaðar til, alt eftir hvat annað slag av prestaembæti talan er um.

Stk. 2
Meðan sóknarprestaembætini eru skipað við avgerð landsstýrismansins, og serstøk avgerð tí ikki skal til at (endur-) manna tey, krevst serstøk avgerð í hvørjum einstøkum føri um, at embæti eftir øðrum kapitli verða sett, tí at talan er ikki um føst, skipað embæti, men um serstøk tiltøk, ið verða sett í verk í hvørjum einstøkum føri sær.
Tá um § 16 ræður, er hesin parturin av avgerð landsstýrismansins einans um at skipa og staðseta embæti sum óløntur hjálparprestur.

**Um § 18**
Henda greinin er ein prinsipiel broyting í mun til ongatíð nýttu § 13 í galdandi løgskipan. Eftir henni hevði próstaembætið verið eitt embæti í sjálvum sær, tengt at einum ávísum sóknarprestaembæti, og blivið lýst leyst á sama hátt sum presta- ella dómpróstaembæti.
Við uppskotnu broytingini fer próstaembætið (um valt verður at gera fleiri próstadømi) at vera ein eykauppgáva, ið kann verða tengd at einum og hvørjum av sóknarprestaembætunum í próstadøminum.
Próstaembæti fer tí at verða lýst leyst millum sóknarprestar í embæti í próstadøminum at søkja, eins og umsøkjarar til sóknarprestaembæti í próstadøminum kunnu søkja, um sóknarprestaembæti er leyst at søkja, meðan próstaembætið eisini er leyst. Hinvegin fer tað ikki at kunna vera eitt krav, at umsøkjari til kall er sinnaður at taka próstauppgávuna uppá seg umframt, og ráða kirkjuráðini einans til at seta umsøkjarar, ið ikki eru sinnaðir at taka próstauppgávuna uppá seg, skal landsstýrismaðurin seta ein teirra, hóast hetta minkar um úrval biskups próstauppgávuni viðvíkjandi – sbr. tó eisini § 13, stk. 4, seinna pkt.
Broytingin ber so eisini við sær, at próstur í grundregluni fer at kunna siga próstaembætið frá sær aftur (í samráð við biskup, eyðvitað), hóast hann ikki hevur í hyggju at fara úr sóknarprestaembætinum.
Uppskotna broytingin er ein fyrimunur í mun til hetta, at sóknarprestur verður kallaður (sí viðmerkingarnar til § 19, stk. 1) og er í frægari samsvari við, at grundregluliga verður mett, at próstauppgávurnar eiga ikki at vera meira krevjandi, enn at sóknarprestaembætið kann fylla

bróðurpartin av arbeiðstíðini – ella sum ásett í § 9, stk. 1, í lógini um fólkakirkjuna: "*Próstur er sóknarprestur, ið er innsettur at røkja próstaembæti umframt.*".
Sí eisini almennu viðmerkingarnar um próstaembæti, serliga partarnar "Próstaembæti" og "Próstur, setanartilgongd".

Stk. 2
Próstur er avloysari biskups, um dómprósti berst frá, eins og siðvenja er, at biskupur eisini í ítøkiligum førum kann leggja prósti partar av biskupsembætinum at røkja. Tí er rímiligt, at førleikakrøvini, sum verða sett prósti, eru nett tey somu, sum sett verða biskupi. Víst verður til § 22, og serstøku viðmerkingarnar til hesa, og til almennu viðmerkingarnar um førleikakrøv til próst og dómpróst.

**Um § 19**
Ásetingin svarar, við teimum tillagingum, sum fylgja av broytingini í § 18, stk. 1, neyvt til § 13, stk. 2 í galdandi løgskipan.
Biskupur verður við uppskotnu ásetingini einsamallur um at geva landsstýrismanninum tilmæli. Hetta tí at próstaembætið við uppskotnu ásetingini í § 18, stk. 1 ikki verður tengt at ávísum sóknarprestaembæti, men verður ein uppgáva, sum verður løgd sóknarpresti í embæti. Tí verður ikki talan um kalling í sambandi við at manna próstaembæti. Hetta ger, at innankirkjulig orsøk verður ikki til, at kirkjuráðini skulu virka við vegna kirkjuliðini, og tí eiga leiðsluligu atlit biskups at vera avgerandi fyri, hvør fær embætið. Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar, serliga partin "Próstur, setanartilgongd".

Stk. 2
Ásetingin er ein lítil herðing í mun til § 13, stk. 3, í galdandi løgskipan. Eftir galdandi løgskipan hevði landsstýrismaðurin kunnað sett umsøkjara, sum biskupur ikki hevur mælt til, men tó ikki fyrr enn hann hevur havt samráðingar við biskup hesum viðvíkjandi.
Próstur skal samstarva neyvt við biskup, og biskupur skal eisini kunna leggja honum partar av embætisuppgávum sínum at røkja styttri ella longri skifti. Tí er rættari, at landsstýrismaðurin skal seta umsøkjara, sum biskupur hevur mælt til, uttan so at týðilig brek eru við setanartilgongdini ella tilmæli biskups, soleiðis at hesi eftir vanligum fyrisitingarreglum eiga at ganga umaftur.

**Um § 20**
Dómpróstur er næstur biskupi í tign og fasti avloysari biskups, eins og siðvenja er, at biskupur eisini í ítøkiligum førum kann leggja dómprósti týðandi partar av biskupsembætinum at røkja. Tí er rímiligt, at førleikakrøvini, sum verða sett dómprósti, eru nett tey somu, sum sett verða biskupi.
Víst verður til § 22 og serstøku viðmerkingarnar til hesa, og til almennu viðmerkingarnar um førleikakrøv til próst og dómpróst.

**Um § 21**
Ásetingin svarar til § 14, stk. 1, fyrsta punktum, í galdandi løgskipan, men er heldur nágreiniligari um, hvat fyrifarast skal á fundinum.
Prestagjaldið, ið sipað verður til, er eins og í galdandi reglum prestagjaldið, sum dómkirkjusóknin er partur av. Dómkirkjusóknin er í Suðurstreymoyar Eystara prestagjaldi, men hetta kann verða broytt. Hóast tað er lítið hugsandi, at onnur kirkja verður dómkirkja (Havnar Kirkja er nevnd sum dómkirkja í § 6, stk. 2 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum), er kanska

meira hugsandi, at prestagjøldini kunnu verða skipað um. Tí hevði verið skeivt at nevna prestagjaldið, sum dómkirkjusóknin er í, við navni.

Stk. 2
Ásetingin svarar til § 14, stk. 1, annað punktum, í galdandi løgskipan, men er heldur nágreiniligari um, hvat fyrifarast skal á fundinum.

Stk. 3
Ásetingin svarar til § 14, stk. 2, í galdandi løgskipan. Biskupur kann raðfesta umsøkjararnar eftir egnum tykki. Eyðvitað eru ummælini frá kirkjuráðunum ein týðandi partur av avgerðargrundarlagi biskups, men hann er ikki bundin av ummælunum frá kirkjuráðunum.

Stk. 4
Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 14, stk. 3, í galdandi løgskipan.
Nýtt er, at skotið verður upp at áseta, at landsstýrismaðurin ger løgmanni tilmæli um at seta dómpróst. Hetta var mannagongdin, ið funnið var fram til fyrstu ferð, ið dómpróstur varð settur í embæti eftir yvirtøkuna.
Eins og tá talan er um at seta biskup, er leiklutur løgmans ikki sum landsstýrismaður, men sum landshøvur – samsvarandi leiklutinum, ið kongur hevði undan yvirtøkuni. Leiklutur løgmans er sostatt mest ímyndaligur, meðan avvarðandi landsstýrismenn hava innihaldsligu ábyrgdina av fyrisitingarligu málsviðgerðini í teimum pørtum av setanarmálinum, sum fara fram í miðfyrisitingini.
Tá talan er um dómpróst, kann landsstýrismaðurin ikki velja at mæla til at seta umsøkjara, ið biskupur ikki hevur tilmælt.
Sambært galdandi løgskipan skal ráðharrin taka upp samráðingar við biskup, um hann ikki hevur í hyggju at tilnevna nakran av teimum trimum, sum biskupur hevur mælt til; men dómpróstur er varamaður og næsti maður biskups. Tí eigur landsstýrismaðurin at kunna finna skikkaðan umsøkjara millum tey trý, sum biskupur helst vil seta í embætið, uttan so at týðilig brek eru við setanartilgongdini ella tilmæli biskups, soleiðis at hesi eftir vanligum fyrisitingarreglum eiga at ganga umaftur.
Setanirnar í Føroyum hava verið so fáar, so ilt er at siga nett, hvør føroysk siðvenja er; men vanlig donsk siðvenja er, at kongur eftir tilmæli ráðharrans setir tann, sum biskupur hevur mælt til at seta. Í serligum førum er tað tó komið fyri, at fremsta tilmæli biskups ikki er fylgt, men tá hevur grundgevingin verið atlit at øðrum siðvenjum í sambandi við setan.

**Um § 22**
Ásetingin er ein rúmkan í mun til § 1 í galdandi løgskipan "Anordning nr. 886 af 08.12.1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning", ið hevur prógv í gudfrøði av donskum lærdum háskúla sum ófrávíkiligt krav. Grundleggjandi førleikakrøvini til biskupsvalevni – ið eisini verða skotin upp at galda fyri próst og dómpróst – eru sostatt hini somu sum til sóknarprest.
At ásett er, at biskupur lýkur treytirnar at gerast sóknarprestur, merkir, at eisini sóknarprestur, ið er ella hevur verið í embæti her, er skikkaður at søkja, uttan mun til, um hann á sinni var settur í starv eftir nú galdandi ella eftir áður galdandi formligum førleikakrøvum, tí útbúgvingin hjá øllum, sum eru blivin sett í sóknarprestaembæti her, er annaðhvørt donsk gudfrøðiútbúgving, ella er blivin javnvirðismett við hesa. Hvør einstakur hevði sostatt lokið treytirnar at fáa góðkenning, sbr. uppskotnu kunngerðini eftir § 3, stk. 3.

Av tí at tað er ein fortreyt, at biskupur lýkur nevndu førleikakrøvini fyri at koma í "vanligt" embæti sum sóknarprestur, kann ein, ið er kjósaður eftir mannagongdunum í § 14, ikki verða biskupsvalevni, uttan so at hann eisini lýkur nevndu formligu førleikakrøv.
Samstundis er sum nakað nýtt sett inn, at biskupur, eins og próstur, skal hava lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu, sbr. § 2. Hetta vil siga, at eisini sóknarprestur, ið er komin í embæti, áðrenn hetta kravið kom, skal taka námið, áðrenn hann er skikkaður at gerast biskupsvalevni ella søkja próstaembæti.
Kravið um 6 ára starvsroyndir sum sóknarprestur í Føroyum skal tryggja, at biskupsvalevni og próstur altíð hava eitt grundleggjandi, djúptøkið innlit í kirkjuviðurskiftini í landinum. Kravið hevur serliga stóran týdning, tí at bert eitt biskupsembæti og eitt próstaembæti eru í landinum. Fatanir og áskoðanir teirra, ið røkja embætini, kunnu tí ávirka kirkjuna í størri mun, enn um talan hevði verið um fjølmentari kirkju, við samsvarandi fleirstreingjaðum leiðslubygnaði.
Ilt er at siga heilt neyvt, hvat ið kann verða mett at vera royndir og vitan, ið geva samsvarandi innlit í kirkjuviðurskiftini í Føroyum, men talan kundi eitt nú verið um ein, sum hevur granskað í nútíðar føroyskum kirkjuviðurskiftum, men sum einans – ella í høvuðsheitum – hevur starvsroyndir sum sóknarprestur í øðrum landi.

Stk. 2
Eins og tá talan er um at seta dómpróst, er leiklutur løgmans ikki sum landsstýrismaður, men sum landshøvur – samsvarandi leiklutinum, ið kongur hevði undan yvirtøkuni. Leiklutur løgmans er sostatt mest ímyndaligur, meðan avvarðandi landsstýrismenn hava innihaldsligu ábyrgdina av fyrisitingarligu málsviðgerðini í teimum pørtum av setanarmálinum, sum fara fram í miðfyrisitingini.

**Um § 23**
Ásetingin svarar til § 3 í galdandi løgskipan um "udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsning". Tey, ið hava valrætt á biskupsvali, eru tey somu, sum hava valrætt til próstadømisráð, sbr. § 37, stk. 1 í Løgtingslóg nr. 107 frá 17. august 2009 um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn. Harumframt hava umboð fyri valkirkjulið atkvøðurætt eins og sum umboð fyri kirkjusóknirnar, og eisini prestur í starvi uttanlands, sbr. stk. 2 og 3.

Stk. 2
Valevnini á biskupsvali eru tey somu kring alt landið. Tí er – mótsett tá um kirkjuráðsval ræður – sum so lítil ella eingin munur á, í hvørjum kirkjuráði sóknarprestur greiðir atkvøðu.
Ásetingin er tí fyrst og fremst ætlað at gera greitt, at sóknarprestur kann einans greiða atkvøðu í einum kirkjuráði, hóast hann altíð er limur í fleiri kirkjuráðum.
Ásetingin tryggjar harumframt, at eisini annar prestur í starvi í fólkakirkjuni hevur rætt til at greiða atkvøðu, og ger greitt, í hvørjum kirkjuráði hann kann nýta atkvøðurættin. Treytin er tó, at hann er settur í starv í longri enn eitt ár.
Heitini "sóknarprestur" og "prestur" eru at skilja sum prestur, sum er í starvi í fólkakirkjuni sum slíkur, meðan ásetingin ikki gevur prestvígdum, sum er í øðrum starvi í fólkakirkjuni atkvøðurætt, eins og prestvígdur, sum ikki er í embæti, tá atkvøðugreiðslan fer fram, ikki hevur atkvøðurætt.
Prestur hjá valkirkjuliði hevur atkvøðurætt og greiðir atkvøðu eftir somu meginreglum sum sóknarprestur.
Ásetingin tryggjar somuleiðis, at prestur ikki hevði fingið fleiri atkvøður, um hann skuldi røkt fleiri embæti. Í slíkum føri er neyðugt at prestur boðar valstýrinum frá, hvar hann greiðir

atkvøðu, so tað kann tryggja, at samljóð er millum atkvøðutølini og talið á teimum, ið hava atkvøðurætt.

Stk. 3
Valkirkjulið velja sambært hesi áseting umboð í sama lutfalli í mun til limatal, sum kirkjusóknir velja kirkjuráðslimir. Sí § 2 í lógini um val til kirkjuráð og próstadømisráð og viðmerkingarnar til hesa. Valkirkjulið er undir umsjón biskups og hevur tí valrætt á biskupsvali, men ikki til stiftsstjórn og próstadømisráð, ið ikki hava heimildir yvir tí.
Valkirkjulið nýtist ikki at velja kirkjuráð á sama hátt sum kirkjusóknir. Tí er neyðugt at áseta, hvussu nógvar atkvøður, valkirkjuliðið hevur á biskupsvali.
Ásetingin er myndað neyvt eftir § 2, stk. 2 og 3 í lógini um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn og tryggjar, at eitt møguligt valkirkjulið fær somu ávirkan við biskupsval eftir limatali, sum eitt og hvørt kirkjulið úr eini kirkjusókn.
Tað verður upp til egnu viðtøkurnar hjá valkirkjuliðinum at gera av, hvørji verða at virka sum valmenn.

**Um § 24**
Ásetingin svarar á leið til § 4, stk. 1 í galdandi løgskipan. Minsta kravið um stillarar er 50 eftir galdandi løgskipan, hámarkið er 150. Hámarkið er, so at ikki so stórur partur av kirkjuráðslimunum verða stillarar hjá einum lista, at ilt verður at finna øðrum listum stillarar. Skotið verður upp heldur at hava tølini sum samsvarandi prosent, so at tey ikki gerast lutfalsliga størri ella minni, verða kirkjuráðslimirnir færri ella fleiri. 10% eru umleið 40 við verandi tali av kirkjuráðslimum, meðan 20% eru umleið 80. Tølini skifta, sum kirkjusóknir vaksa og minka, verða lagdar saman ella býttar sundur og verða rundað til næsta heila tal av stillarum.

Stk. 2
Krevur ikki serstakar viðmerkingar.

Stk. 3
Hetta er ein minni broyting í mun til galdandi løgskipan, tí eftir § 4, stk. 1 kundi biskupsvalevni verið stillari á øðrum valevnislista, men ikki á egnum lista.
Krevur annars ikki serstakar viðmerkingar.

**Um § 25**
Biskupur er føddur limur í Stiftsstjórnini og dómpróstur er føddur limur í Próstadømisráðnum. Verða próstadømini – og harvið próstadømisráðini – fleiri, verða próstadømisráðini at velja valstýrislimir í felag.
Valstýrið tekur avgerð um allar ivaspurningar valinum viðvíkjandi, eisini hvørt eitt valevni lýkur førleikakrøvini, men tað kann eyðvitað, sum liður í skyldu síni at upplýsa mál á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin, heita á serfrøði – harundir eisini á nevndina, sbr. § 4 at gera sær tilmæli.

Stk. 2
Neyðugt er, at kærufreistin er stutt, so at tilgongdin í minstan mun verður nervað.

**Um § 26**
Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 5, stk. 1 og 2 í galdandi løgskipan.

Heimild til landsstýrismannin, eins og eftir galdandi reglum, at áseta greiniligari reglur um tilgongdina í sambandi við biskupsvalið.
Talan er um at áseta greiniligari reglur um valtilgongdina yvir høvur, so sum

- valnevnd og valstýri
- mannagongdir og eftirlit í sambandi við vallistar og valevnislistar og freistir fyri upptøku á hesar
- atkvøðugreiðsluna, og freistir í sambandi við hesa
- uppteljing
- umval
- kæru

**Um § 27**
Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 6, stk. 1 í galdandi løgskipan, kortini við teirri broyting, at eftir galdandi løgskipan hevði landsstýrismaðurin gjørt av, hvør varð settur, um tað stóð á jøvnum.
Nýtt er eisini, at skotið verður upp at áseta, at landsstýrismaðurin ger løgmanni tilmæli um at seta biskup. Hetta var mannagongdin, ið funnin varð fram til, fyrstu ferð biskupur varð settur í embæti eftir yvirtøkuna.
Leiklutur løgmans er í hesum føri ikki sum landsstýrismaður, men sum landshøvur – samsvarandi leiklutinum, ið kongur hevði undan yvirtøkuni. Leiklutur løgmans er sostatt mest ímyndaligur, meðan avvarðandi landsstýrismenn hava innihaldsligu ábyrgdina av fyrisitingarligu málsviðgerðini í teimum pørtum av setanarmálinum, sum fara fram í miðfyrisitingini.

Stk. 2
Ásetingin kemur í staðin fyri § 6, stk. 2 í galdandi løgskipan og broytir reglurnar fyri, nær valevni er valt: Eftir galdandi løgskipan verður altíð umval millum tey bæði valevnini, ið fingu flestar atkvøður, um ikki eitt fekk meirilutan av atkvøðunum. Eftir uppskotinum er eitt valevni sjálvandi valt, hevur tað fingið meira enn helvtina av atkvøðunum; men tað er eisini valt, um tað hevur fingið so mikið sum 42% av atkvøðunum, samstundis sum einki av hinum valevnunum hevur fingið fleiri enn 26% av atkvøðunum.
Broytingin er ætlað til at tryggja, at sleppast kann undan so at siga óneyðugum øðrum valumfari, um tað frammanundan tykist greitt, at eitt ávíst valevni stendur til at vinna, men skuldi samstundis tryggjað, at annað valumfar verður, um líkinda undirtøka eisini er fyri øðrum valevni.
Endiliga er munurin eisini, at eftir galdandi løgskipan hevði landsstýrismaðurin gjørt av, hvør varð settur, um tað stóð á jøvnum eftir aðru atkvøðugreiðslu.

Stk. 3
Krevur ikki serstakar viðmerkingar.

**Um § 28**
Ásetingin í stk. 1 hevur sama virknað sum fyrra punktum í § 17 í galdandi løgskipan.
Orðingin er soleiðis, at í teimum førum, prestagarður ikki er, ber ikki til at áseta staðiliga bústaðarskyldu. Hinvegin er greitt, at ein týðandi partur av uppgávuni hjá sóknarpresti er at vera til staðar í prestagjaldinum.
Bústaðarskyldan er tænastuskylda. Ikki at halda hana er tænastubrot, sum fær tænastuligar fylgjur, og kann enda við, at sóknarprestur verður loystur úr starvi.
Bústaðarskylda merkir, at sóknarprestur býr í prestagarðinum, hevur vanliga dagliga virki sítt har, og at hann eisini vanliga er at hitta har.

Bústaðarskylda merkir hinvegin ikki, at sóknarprestur altíð skal liggja nátt í prestagarðinum (uttan tá hann hevur frí) ella at hann altíð skal vera at hitta dag og nátt. Stórir partar av prestagerninginum kunnu verða framdir aðrastaðni enn í kirkju ella prestagarði, og sóknarprestur hevur uttan mun til bústaðarskylduna sama rætt til eitt nú at fara til frítíðarvirksemi sum ein og hvør annar, eins og hann á leið í sama mun sum ein og hvør annar skal hava hóskandi fyrilit fyri arbeiðinum, tá hann eitt nú velur frítíðarvirksemi (sbr. tó eisini serstøku viðmerkingarnar til § 8, stk. 1, decorum-krøvum viðvíkjandi).
Annars hevur sóknarprestur grundregluliga sama ræðis- og nýtslurætt prestagarðinum viðvíkjandi, sum ein og hvør annar, ið leigar eini íbúðarhús, kortini við teimum frábrigdum sum fylgja av, at prestagarðurin eisini skal virka sum skrivstova og móttøkustaður hjá sóknarpresti, og tí eisini lutvíst er fevndur av reglum, ið galda fyri arbeiðsstøð hjá tí almenna. Harafturat koma ávísar avmarkingar, ið ikki eru so lættar at seta orð á, men hava samband við hetta, at eins og ilt kann í ávísum førum vera at skilja millum menniskja, sum røkir sóknarprestagerningin og embætið, so ber so at siga ikki til at skilja ímillum embætisbústaðin og embætið, og sóknarprestur hevur tí fyri neyðini at hava ávíst fyrilit fyri teirri tign, ið er tengd at prestagarðinum.

Stk. 2
Bústaðarskyldan kann ikki vera strangari enn so, at tað skal bera til at gera frávik, tá serlig viðurskifti tala fyri hesum, men hinvegin kann atgongdin til at gera frávik ikki vera so rúm, at bústaðarskyldan gerst eitt tilboð ella eitt eiti.
Í Danmark kann verða vikið frá bústaðarskylduni, tá hálvt ár er eftir til tvungnan fráfaringaraldur, men siðvenjan eftir yvirtøkuna hevur verið at gera frávik upp til 3 ár, áðrenn sóknarprestur fer frá. Millum annað hetta, at bústaðarmarknaðurin í Føroyum er so fábroyttur og stirvin, talar fyri størri lagaligheit.
Orðingin “fer frá” er at skilja bókstaviliga: talan kann annaðhvørt vera um, at í mesta lagi 3 ár eru til tvungnan fráfaringaraldur, ella – um sóknarprestur hevur tikið avgerð um at fara frá fyrr – at hann hevur latið inn uppsøgnina, so at til ber at staðfesta, at í mesta lagi 3 ár eru, til hann fer frá.
Heilt serlig persónlig viðurskifti eru til dømis, um sóknarprestur ikki fær nýtt prestagarðin, tí hann er rørslutarnaður, ella at sóknarprestar eru hjún, og tí ikki bæði fáa lokið treytina, um makin hjá sóknarpresti hevur annað starv við bústaðarskyldu, ella t.d álvarslig sjúka ger, at makin ikki kann búgva í prestagarðinum.
Ásetingin um, at kirkjuráðini fáa høvi at verða hoyrd, er til at tryggja, at biskupur kennir sjónarmiðini í kirkjusóknunum, áðrenn hann tekur avgerð, men bindir ikki biskup til at taka avgerð samsvarandi ummælunum.

Stk. 3
Hetta, at sóknarprestur er í prestagjaldinum, er so týðandi fortreyt í bygnaði fólkakirkjunnar, at undir ongum umstøðum skal bera til at gera frávik, um ikki koyrandi er frá bústaðnum til kirkjuna í størstu kirkjusókníni, ella til nærum eins stóra kirkjusókn í prestagjaldinum, og um ikki flutningstíðin er undir hálvan tíma.
Treytin um, at koyrandi er, er at skilja sum, at annaðhvørt skal vera landfast ímillum, ella eisini skal brúgv ella undirsjóvartunnil vera oyggjanna millum, og í báðum førum skal vegur vera at koyra eftir.

**Um § 29**

Ásetingin er broytt í mun til § 15, stk. 1 í galdandi løgskipan, sum ásetir, at kirkjuráðið, eftir greiniligari reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir, ger av, hvussu kirkjutænastan verður skipað, og stendur fyri at gjalda starvsfólki samsýning. Greiniligari reglur eru ikki ásettar.
Nýtt er, at ásett verður, at kirkjuráðið heitir á fólk um at taka á seg tænastu sum kirkjutænari ella hjálparfólk. Ætlanin við hesi áseting er tó eingin broyting, men hinvegin at tryggja, at ivi ikki kann vera um, at neyðugt er ikki at lýsa hesi embæti og uppgávur leys í hvørjum einstøkum føri. Kirkjuráðið kann velja at lýsa eftir fólki, men kann eisini, sum siðvenja í mestan mun hevur verið, velja at heita á fólk, sum tey vænta hava hug og hegni til tess, um at taka tænastuna uppá seg.
Staðiliga heimildin til at veita endurgjald fyri útreiðslur er nýggj, tó at hetta hevur verið siðvenja. Sum endurgjald fyri útreiðslur er eisini at skilja endurgjald fyri inntøkumiss, tá neyðugt er at leggja niður arbeiði í sambandi við kirkjuligar tænastur.
Somuleiðis er hámarkið fyri samsýning, sum kirkjuráðið sjálvt hevur heimild at gjalda út, nýtt. Víst verður til stk. 2, 3, 4 og 5 og serstøku viðmerkingarnar til hesi, og til § 32.
Er landskirkjuskatturin 25 milliónir, svarar uppskotna hámarkið, svarandi til 0,08% av landskirkjuskattinum, til 20.000 kr um árið, ella slakar 1670 kr um mánaðin.
Hugtøkini "kirkjutænari" og "hjálparfólk" eru ikki nágreiniliga allýst. Ikki minst stendst ógreiða av, at skiftandi er, hvat starvsinnihald verður lagt í ymisku starvsheitini í ymisku kirkjusóknunum. Hesi bæði heiti verða tí í hesi lóg nýtt í felag, ætlað at fevna øll tey, ið so ella so virka í kirkjuni á staðnum, ella fyri hana, eftir ávísari skipan. Heitini fevna sostatt, umframt dekn, klokkara, kirkjutænara og urguleikara, eisini um til dømis skrivstovufólk, reingerðarhjálp, kirkjusangarar og tey, ið taka móti eitt nú ferðafólki, tá kirkjan er opin, meðan tænasta ikki er. Verða fólk sett til, ella samsýnt fyri, at fremja meira lærandi, hjálpandi ella boðandi tænastu, verða tey eisini fevnd av hugtøkunum kirkjutænari ella hjálparfólk, og harvið eisini av ásetingunum í hesum kapitli.
Sóknarprestur kann hinvegin ikki tulkast at verða fevndur av hugtøkunum, og sóknarprestaembætið er sostatt ikki fevnt av ásetingunum í hesum kapitli. Ásetingarnar sóknarpresti og sóknarprestaembæti viðvíkjandi eru í kapitlunum 1-3 og 5 í uppskotinum.

Stk. 2
Við uppskotnu ásetingini skal Próstadømisráðið loyva, at kirkjuráðið kann veita endurgjald, hægri enn hámarkið eftir stk. 1. Endurgjaldið kann annaðhvørt vera fyri inntøkumiss, ið stendst av, at kirkjutænari ella hjálparfólk leggur niður arbeiði til tess at røkja kirkjuligar tænastur, ella fyri útreiðslur, ið hava beinleiðis samband við tænastuna í kirkjuni. Dømið kann vera, at urguleikari hevur langan flutningsveg til kirkjuna, ella fer úr arbeiði og hevur inntøkumiss, tí at hann skal spæla í sambandi við kirkjuliga tænastu.
Somuleiðis tekur próstadømisráðið, við at heita á Stiftsstjórnina um at seta fyriskipanina í verk, avgerð um, hvørt meira umfatandi samsýning kann verða veitt.
Ætlanin við at leggja Próstadømisráðnum hesar heimildir er at tryggja, at skipanirnar kring landið í sambandi við samlíkar tænastur í mestan mun eru sambæriligar; men Próstadømisráðið fær við hesum eisini heimild at sýta fyri at seta fyriskipanina í verk, eitt nú um hon ikki stendur mát við, hvussu líknandi uppgávur verða loystar og samsýntar kring landið, sbr. stk. 5, og serstøku viðmerkingarnar til hetta.
Leikluturin hjá Stiftsstjórnini verður í hesum føri ikki at taka avgerð, men at fremja íverksetan og umsiting til tess at tryggja, at formligu viðurskiftini í ymisku málunum viðvíkjandi størri samsýningum eru sambærilig, og formliga í lagi, sbr. § 32.

Stk. 3

Ásetingin er broytt í mun til § 15, stk. 2 í galdandi løgskipan, sum ásetir, at Kirkjuráðið í kirkjusókn við fleiri enn 2000 limum kann seta eitt skrivstovufólk, ein kirkjutænara og ein urguleikara í starv.
Broytingarnar eru, at innihaldslig avmarking er ikki fyri, hvat starvsinnihaldið í starvi fyri kirkjuráðið kann vera, og at kirkjuráðið ikki kann taka avgerð í setanarmáli, men at henda heimild lutvís verður løgd Próstadømisráðnum, lutvís Stiftsstjórnini. Eisini verður skotið upp at broyta markið fyri, hvørjar kirkjusóknir einsamallar kunnu taka stig til setan til eitt lutfalsligt tal. Fleiri enn 4,5% av kirkjufólkinum í landinum er í dag umleið 1800 fólk.
Eftir ásetingini ger Próstadømisráðið av, um starvið kann verða sett.
Ætlanin við at leggja Próstadømisráðnum so týðandi leiklut er at tryggja, at fyrilit verður havt fyri fíggjarstøðuni hjá kirkjukassunum yvirhøvur, og at stóri, ítøkiligi kunnleikin, sum Próstadømisráðið hevur til fíggjarætlanirnar hjá hvørjum einstøkum kirkjukassa, og til hvørjar loysnir, ið ymisku kirkjuráðini hava valt, verður nýttur, áðrenn Stiftsstjórnin tekur endaliga avgerð um setanina í sjálvari sær.
Meðan Próstadømisráðið hevur neyvasta ítøkiliga kunnleikan til fíggjarstøðuna hjá kirkjunum, og til hvussu ymiskar kirkjusóknir hava valt at loysa ymisku uppgávurnar, hevur Stiftsstjórnin royndir við starvssetanum, og tí verður skotið upp, at avgerðin um, hvørt og hvussu setanin verður framd, verður løgd Stiftsstjórnini.
Próstadømisráðið fær avgerðina um, hvørt setanin <u>kann</u> verða framd. Stiftsstjórnin kann sostatt ikki fremja setan eftir hesi heimild, uttan so at Próstadømisráðið hevur gjørt av, at setanin kann verða framd, men hevur annars sjálvstøðugan avgerðarmyndugleika viðvíkjandi setanum.

Stk. 4
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi løgskipan og er ætlað at skapa samvirkandi kirkjusóknum somu møguleikar sum kirkjusóknum við fleiri enn 4,5% av kirkjufólkinum í landinum, treytað av annaðhvørt at allar kirkjusóknirnar í einum prestagjaldi samvirka, ella at, ið hvussu so er, fleiri enn 4,5% av kirkjufólkinum í landinum eru í kirkjusóknunum, sum hava í hyggju at samvirka. Í seinna førinum er tað ikki ein treyt, at allar kirkjusóknirnar eru í sama prestagjaldi.
Við hesum fortreytum aftrat er ætlanin, at henda heimildin skal verða nýtt á nett sama hátt sum heimildin eftir stk. 3, og víst verður tí annars til serstøku viðmerkingarnar til hesa.
Skipanin viðvíkjandi felags kirkjuráðsfundi er reglusett í §§ 24-26 í lógini um kirkjuráð og próstadømisráð (nr. 27 frá 19. mai 2008).

Stk. 5
Ásetingin tryggjar, at hóast talan er um tænastu ella starv í einstakari ella einstøkum kirkjusóknum, er tað eitt løgligt atlit hjá Próstadømisráðnum at taka atlit at fíggjarstøðuni hjá kirkjukøssunum yvirhøvur, áðrenn tað tekur avgerð. Hetta tí, at hóast fíggjarstøðan hjá einstaka kirkjukassanum kann vera góð í løtuni, er starvssetan ella sáttmáli um tænastuveiting ein fíggjarlig binding, ið tekur lutfalsliga langa tíð at loysa seg frá aftur. Haraftrat kann hon ikki verða fíggjað við staðbundnum kirkjuskatti, so í roynd og veru man oftast mestsum einans bera til at fíggja hana við landskirkjuskatti. Tí eru tað neyðug og rímilig atlit at meta um, hvussu økti ella (um talan er um, at fyriskipan verður ætlað at halda fram) framhaldandi útreiðslutørvurin hjá einstaka kirkjukassanum kann ávirka fíggjarvánirnar hjá hinum kirkjukøssunum, og um útlitini til hvussu gongdin í inntøkum og útreiðslum yvirhøvur kann væntast at verða komandi árini. Próstadømisráðið verður sostatt at tryggja, at setanin, umframt at vera ráðilig eftir eini fíggjarligari heildarmeting, stendur í rímiligt mát við væntaðu nyttuna av valdu fyriskipanini.

Við ásetingini ger Stiftsstjórnin sjálv av, hvussu starvið verður sett, í hvønn mun samsýnt verður fyri tænastu, ella um roynt verður at røkka endamálinum innan sama ella lægri útreiðslukarm við at gera avtalu við veitara um tænastu.
Avtala við annan veitara kundi til dømis verið avtala við musikkskúlaskipanina um, at musikkskúlaskipanin setir urguleikara í starv við tí fyri eyga partvís at virka sum urguleikari í ávísari ella ávísum kirkjum. – Tó so, at hugsandi kundi eisini verið at framt setan, ið vendi hin vegin, so at Stiftsstjórnin vegna kirkjuráð er arbeiðstakarin, meðan musikkskúlaskipanin keypir tænastur eftir fastari avtalu.
At Stiftsstjórnin hevur hesar heimildir ger, at henni eisini er heimilað onga fyriskipan at seta í verk, hóast tilmæli kirkjuráðsins og avgerð Próstadømisráðsins.

Stk. 6
Áseting um at kirkjuráðini ikki kunnu kæra avgerðirnar hjá Próstadømisráðnum og Stiftsstjórnini, setanum og samsýntum tænastum hjá kirkjuráðunum viðvíkjandi.
Ásetingin forðar hinvegin ikki fyri, at einstaklingur kann kæra, í tann mun hann hevur rætt til hetta eftir vanligum fyrisitingarrættarligum meginreglum.
Tað verða fyrst og fremst kirkjupolitiskar metingar, og metingar um egnu fíggjarorku og fíggjarvánir fólkakirkjunnar, ið fara at verða lagdar til grund fyri avgerðir um at seta størv ella ikki, og hesar eru illa egnaðar at kæra til politiska myndugleikan.
Mest sannlíkt er, at í longdini verður mestsum av sær sjálvum samskipað millum Próstadømisráðið, Stiftsstjórnina og kirkjuráðini, tí dómpróstur er handgingni maður biskups, og kirkjuráðini velja hinar limirnar í próstadømisráðnum.
Hinvegin er kirkjusóknin berandi eindin í fólkakirkjuni, og hóast rímiligt er, at Próstadømisráðið eftir eini heildarmeting av støðu og fíggjarstøðu fólkakirkjunnar, umframt støðuni á staðnum, ger av, hvørt ávís fyriskipan kann verða sett í verk, meðan Stiftsstjórnin eftir royndum sínum og eftir eini meting av støðuni á staðnum, ger av, hvørt og hvussu ávís fyriskipan kann verða sett í verk, so hevði ikki verið rímiligt, at Stiftsstjórnin hevði kunnað sett eina fyriskipan í verk í kirkjusóknini, sum er so broytt í mun til upprunaliga ynskið hjá kirkjuráðnum, at tað ikki kennist við hana.
Setanartilgongdirnar verða annars tær vanligu, sum tá um at seta almenn størv ræður. Annars verður víst til stk. 1, og serstøku viðmerkingarnar til tað.

**Um § 30**
Ásetingin er nýggj, og er fyrst og fremst ætlað at løgfesta siðvenjuna, at *loyviligt og ofta eisini ráðiligt er* at seta krav um limaskap, so at til dømis fakligur førleiki, royndir og menniskjalig evni ikki einsamøll verða avgerandi, eins og tá um almennar setanir ræður.
Ætlanin við ásetingini er tó ikki, at kravið um limaskap skal verða avgjørd forðing fyri, at heitt kann verða á onnur enn kirkjufólk. Eitt nú á smáplássum kann vera neyðugt at samstarva við fólk úr øðrum trúarsamfelag, og í øðrum førum kann hugsast, at kirkjuráðið heldur tað vera ynskiligt at heita á onkran, sum ikki er kirkjufólk, tí at viðkomandi hevur serstakt hegni ella gávur.
Biskupur kann tí gera frávik frá kravinum, um kirkjuráðið heitir á hann.
Orðingin er ikki, at biskupur *í serstøkum føri* kann loyva fráviki, tí rúm skal vera fyri, at mong ymisk viðurskifti skulu kunna vera orsøk til, at frávik verður givið – tað, sum er avgerandi, er, at kirkjuráðið metir, at frávikið kemur at virka natúrligt og ynskiligt í mun til kirkjuliga lívið á staðnum, og tí heitir á biskup.
At innihaldsligar treytir ikki verða settar fyri, nær vikið verður frá kravinum, ber hinvegin við sær, at biskupur skal kunna grundgeva fyri, hví hann ger av ikki at gera frávik, hóast áheitanina frá kirkjuráðnum. Ilt er at nágreina, hvat kann vera orsøk til at sýta fyri at gera frávik. Hetta

veldst um, hvørjum liði í gudstænastuni ella kirkjuliga lívinum tænastan verður gjørd. Til dømis verður biskupur at gera neyvari meting av tí ráðiliga í at gera frávik, tá um deknatænastu ræður, enn flestum øðrum tænastum viðvíkjandi, meðan lættliga ber til at ímynda sær, at tað helst kann tykjast høpisleyst at gera frávik frá kravinum, um fólk verða sett til meira lærandi, hjálpandi ella boðandi tænastu.

Ásetingin ber eisini við sær, at heldur limaskapurin í fólkakirkjuni hjá kirkjutænara ella hjáplarfólki uppat, verður støða tikin til frávik, á sama hátt sum um talan var um, at ikki-limur stóð til at skula taka tænastu á seg.

Í mongum kirkjum er siðvenja, at spurt verður ikki eftir, um urguleikari er kirkjufólk, og tí er urguleikari undantikin kravinum um limaskap. Leiklutur urguleikarans í gudstænastuni er týðandi, og urguleikarin kann einans virka, sum hann skal, um hann hevur eina grundleggjandi fatan av og kenslu fyri gudstænastuskipanini, men hinvegin er fyrst og fremst talan um eina tónleikaliga/tónlistaliga tænastu, sum verður veitt eftir rættiliga føstum siðvenjum, og tí er ikki innihaldslig orsøk til at krevja, at júst urguleikarin skal vera limur í fólkakirkjuni.

Stk. 2
Ásetingin, ið er nýggj, er myndað eftir samsvarandi ásetingini í § 6 í lógini um kirkjuráð og próstadømisráð og er eins og henda ætlað til at strika undir, at alt virksemi í fólkakirkjuni skal hava støði í lærugrundarlagi fólkakirkjunnar, ella rúmast innan hetta, og til at minna á, at eisini tá ið virkið í kirkjuni er sjálvboðið, ella samsýningin er meira ímyndarlig, er talan um at røkja týdningarmikið starv, ið skal verða røkt í samljóði við lærugrundarlagið, og í trúskapi móti tí. Ásetingin er ikki einans um kirkjutænara og hjálparfólk, sum er limir í fólkakirkjuni, tí hóast tað eyðvitað ikki ber til at krevja trúskap móti lærugrundarlagi fólkakirkjunnar av einum, ið hevur trúgv ella lívsáskoðan, ið ikki er sum fólkakirkjunnar, ber saktans til at krevja, at virkið, sum viðkomandi fremur í fólkakirkjuni, er í trúskapi móti lærugrundarlagnum. – Hetta er ikki grundleggjandi øðrvísi enn eitt nú tann trúskapur móti politisku leiðsluni, ið vanliga verður kravdur av embætisfólki og leggur grundregluliga ikki bond á, hvussu viðkomandi kann hugsa og virka, tá hann ikki er í tænastu.

**Um § 31**
Ásetingin er nýggj, og áleggur øllum, ið gera tænastu í kirkjusóknini somu tagnarskyldu og varlætisatlit yvirhøvur, sum áliggja starvsfólki hjá almennu fyrisitingini. Hesi varlætisatlit bera millum annað við sær, at tey ikki beinleiðis ella óbeinleiðis bera víðari nakra vitan um viðurskifti hjá einstaklingum, sum tey hava fingið í tænastuni, at tey í hóskandi mun ikki heldur á annan hátt lata medferð sína verða ávirkaða av vitan um einstaklingar, sum tey hava fingið í tænastuni, og at tey ikki í tænastuni tilogna sær vitan um viðurskifti hjá einstaklingum, aðra enn ta sum krevst til tess at røkja tænastuna.
Hetta uttan mun til, hvørt talan er um lønt ella ólønt virki, og uttan mun til, um tey virka við í gudstænastuni, hjálpa til við øðrum virksemi hjá sóknarpresti, ella tey eru í øðrum skipaðum virksemi fyri kirkjusóknina. Sí ávegis allýsing av hugtøkunum “kirkjutænari” og “hjálparfólk” í seinnu helvt av serstøku viðmerkingunum til § 29, stk. 1.

Kirkjan er ikki sum slík partur av almennu fyrisitingini, og er tí ikki fevnd av fyrisitingarlógini yvirhøvur. Almenna fíggingin av kirkjuni er einans um 20%, og er tí ikki so munandi, at landsstýrinum, sbr. § 1, stk. 3 í fyrisitingarlógini er heimilað at áseta, at kirkjan skal verða fevnd av fyrisitingarlógini, tó at hon ikki kann roknast til almennu fyrisitingina. Tí er neyðugt at áseta

staðiliga, at virksemið er fevnt av ásetingunum í hesum kapitli. – Innihaldslig orsøk er ikki til at lata aðrar partar av fyrisitingarlógini galda fyri ikki-fyrisitingarliga virksemið í kirkjuni.

Ásetingin tryggjar, at tey, ið venda sær til kirkjuna, kunnu kenna seg trygg við, at farið verður varlætisliga um, serliga soleiðis at skilja, at tey vita, at upplýsingar um heilt privatu viðurskifti teirra verða vardar í kirkjuni, á sama hátt sum um tær vóru hjá almennum myndugleika.
Her er talan um vanligu tagnarskylduna, sum øll almenn starvsfólk eru undir, meðan sóknarprestur er fevndur av munandi meira víðfevndari tagnarskyldu, ið tryggjar honum rætt og skyldu til ikki at lata frá sær upplýsingar, eisini tá vanligur myndugleikapersónur ella privatur borgari – og í serstøkum føri eisini t.d. advokatur ella lækni – undir revsiábyrgd hevði havt skyldu at latið ávísum myndugleika tær, sí til dømis § 170, stk. 1 í rættargangslógini, sbr. stk. 2.

Stk. 2
Fólk, ið eru farin frá í vanliga yrkislívinum fyri aldur, fremja týðandi partar av uppgávunum í mongum kirkjusóknum.
Tó er helst rættast, at starvsfólk í kirkjuni leggja starvið frá sær eftir somu reglum sum alment sett; men hetta er ikki til hindurs fyri, at somu fólk kunnu halda fram við at gera tænastu – kanska eisini samsýnta tænastu – í so mong ár aftrat, sum hugur og heilsa eru til.
Galdandi reglur um fráfaringaraldur hjá alment settum eru í LD-rundskrivinum “Rundskriv um fráfaringaraldur” http://www.lnd.fo/Index.asp?pID={C5F5C1E7-436D-428F-BD0B-DDBE60166B52}
Her er ásett, at tað áliggur almenna arbeiðsgevaranum at siga alment settum starvsfólki upp í so góðari tíð, at tey kunnu fara úr starvi við endan á tí mánaði, tey fylla 70 ár.
Samsýnt tænasta verður við hesum at steðga, tá viðkomandi er blivin 75 ár.
Ætlanin við ásetingini um fráfaringaraldur er at tryggja, at báðir partar fáa eitt skipað høvi at meta javnan um, hvørt orka og evni framvegis eru til at gera tænastu á sama hátt sum higartil.
Við hesum verður hetta at viðgera spurningin, nær tíð er at gevast fyri aldur, ikki eitt persónliga ella ítøkiliga grundað val, men ein afturvendandi skylda, so at ikki annar (ella kanska báðir) partar mestsum kenna seg noyddar at halda fram á sama hátt sum higartil, hóast orka og evni minka.
Gagn mundi valla verið í at latið hesa áseting galda fyri sjálvbodna tænastu, ið ikki er lønt ella samsýnt, tí her eru viðurskiftini vanliga munandi minni formliga skipað, og tí er ilt at síggja, hvussu tryggjast kann, at ásetingin verður hildin. Roknað verður tó við, at ásetingin í ávísan mun eisini fer at ávirka hugburðin viðvíkjandi ikki samsýntari tænastu.

**Um § 32**
Ásetingin áleggur Stiftsstjórnini at vera setanarmyndugleiki í øllum førum, tá starv verður sett vegna kirkjuráðið, og at vera avtalupartur viðvíkjandi tænastu ella veiting í øllum førum, uttan tá kirkjuráðið sjálvt hevur heimildina, sbr. § 29, stk. 1. Stiftsstjórnin verður sostatt eisini avtalupartur vivíkjandi samsýntari tænastu, sum Próstadømisráðið hevur tikið endaliga avgerð um.
Uppgávan sum setanarmyndugleiki/starvsfólkaleiðsla víkur munandi frá uppgávunum hjá kirkjuráðnum annars. Í teimum fáu førum, ið kirkjuráð hava fólk í løntari ella samsýntari tænastu í nevniverdan mun, er talan um sera fá fólk. Sjálvt ikki í størstu kirkjusóknunum eru tí fortreytir fyri at arbeiða upp royndir, siðvenjur og fastar mannagongdir, ið skulu til, til tess at loysa hetta slagið av uppgávum á nøktandi, tíðarhóskandi hátt.
Tí er mest ráðiligt at miðsavna hesi formligu viðurskifti hjá Stiftsstjórnini, til tess at tryggja, at formligu viðurskiftini eru í lagi, og at avtalur og sáttmálar eru samlík, alt hetta ber til.

Stk. 2
Ásetingin ber við sær, at útreiðslan til lønta ella samsýnta tænastu eftir hesi skipan er útreiðsla hjá kirkjuráðnum, meðan umsitingin av hesum og arbeiðsgevaraábyrgdin eru miðsavnaðar. Stiftsstjórnin hevur ikki ræði yvir peningi hjá kirkjukassanum yvirhøvur, men fær við ásetingini heimild at rinda júst nevndu útreiðslur úr viðkomandi kirkjukassa.

Stk. 3
Uppskotna skipanin viðvíkjandi løntari og samsýntari tænastu er ein munandi umlegging í mun til galdandi skipan. Ásetingin er tí ætlað sum eitt amboð til at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá Stiftsstjórnini, um tað skuldi víst seg (kanska serliga í fyrstani) at verið ov tungt hjá Stiftsstjórnini at umsita allar hesar fyriskipanir beinleiðis.
Við orðingini "*....í tann mun* umsitingarlig viðurskifti tala fyri hesum....." verður ásett, at Stiftsstjórnin bæði kann velja fyribils at leggja kirkjuráði ella kirkjuráðum allar heimildirnar viðvíkjandi slagi ella sløgum av løntari ella samsýntari tænastu, ella hon kann gera hetta pørtum av umsitingini viðvíkjandi, ella einans í ávísum, ítøkiligum málum.
Av tí at kirkjuráð í slíkum føri verður at umsita Stiftsstjórnarinnar vegna, hevur Stiftsstjórnin heimild at geva boð um, hvussu umsitingin skal verða framd.

**Um § 33**
Kunngerðarheimild. Ásetingin er ætlað at hava á leið sama virknað, sum heimildin til landsstýrismannin í § 15, stk. 1 í galdandi løgskipan, men er heldur meira nágreinilig, hvat innihaldi í kunngerðini viðvíkur, sum siðvenjan kunngerðarheimildum viðvíkjandi er nú.
Í viðmerkingunum til § 3 í lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar (nr. 61 frá 07.06.2007) verður millum annað sagt, at *"Í sambandi við útreiðslur, sum samsýning til hjálparfólk, er umráðandi, at landsstýrismaðurin ásetir reglur soleiðis, at kirkjuráðini um alt landið arbeiða eftir somu reglum. Eru ongar reglur, kann kirkjuráðið ikki vita, hvørjar útreiðslur tað kann taka við á fíggjarætlanina, og vandi er fyri, at útreiðslurnar til samsýningar vaksa ótálmaðar. Vandin við, at alt størri partur av arbeiðinum í kirkjuni verður samsýntur ella løntur, er tvífaldur: fíggjarligi vansin er eyðsæddur; men hevur, tá ið samanum kemur, kanska minni at siga fyri kirkjuna í mun til vandan fyri, at kirkjan í alt størri mun verður arbeiðspláss hjá teimum, ið hava útkomu sína har, og harvið í alt minni mun verður ein samkoma, ið fólk taka sær av, kenna sum sína egnu og eru góð við. Gongdin er ikki ókend aðrastaðni."*
Reglurnar, ið verða ásettar við hesi heimild, kunnu tí við fyrimuni verða skipaðar saman við kunngerðini, ið koma skal eftir § 3, stk. 5 í nevndu lóg, ella, ið hvussu so er, er neyðugt at hesar verða samskipaðar neyvt, so at umsitingarlig, kirkjupolitisk og fíggjarlig atlit í mestan mun ganga hond í hond.

**Um § 34**
Ásetingin er ein broyting í mun til galdandi lóg, ið ásetir, at kirkjumálaráðharrin tekur avgerð um at skipa ella leggja niður størv í stiftsumsitingini, meðan hann heilt ella lutvís kann heimila stiftsstjórnini at inna setanarmyndugleikan.
Uppskotna skipanin er í betri samsvari við øktu fíggjarligu og verkligu sjálvstøðuna hjá kirkjuni í mun til landið, sum er skapt við lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar. Við hesi skipan kunnu lønarútreiðslurnar til starvsfólkini hjá stiftinum (mótsatt útreiðslunum til prestalønir) á ongan hátt ávirka stuðulin frá landinum. Tí er betri samsvar millum gjald og vald, um Stiftsstjórnin, ið eisini varðar av kirkjugrunninum og tiltaksgrunninum, hevur endaligu ábyrgdirnar og heimildirnar yvir egnum starvsfólki.

Stk. 2
Ásetingin staðfestir, at stiftsstjórnin, mótsatt veruligum almennum stovnum, sjálv hevur allan setanarmyndugleikan yvir egnum starvsfólkum.
Broytingin er lutvís ein fylgja av, at fíggjarskipanin í fólkakirkjuni eftir yvirtøkuna gevur innankirkjuligu myndugleikunum størri sjálvræði (skuldi skipanin verið heilt átøk teirri donsku, hevði tað verið mentamálaráðharrin, heldur enn stiftsstjórnin, ið sat fyri kirkjugrunninum), og lutvís ein verklig undirstriking av, at fólkakirkjan er ikki ein almennur stovnur.
Samstundis verður stiftsstjórnin tó bundin til at fylgja almennu sáttmálaviðurskiftunum, soleiðis at starvsfólkini fáa samsvarandi setanarkor, sum um tey vóru alment sett. Stiftsstjórnin kann tí ikki gera egnar sáttmálar við løntakarafeløg, men skal – grundregluliga eftir somu meginreglum sum almenni arbeiðsgevarin – seta starvsfólk síni inn í lønarstigarnar, ið galda millum almenna arbeiðsgevaran og avvarðandi yrkisfeløg.

**Um § 35**
Meðan virksemi landsstýrismansins er fevnt av fyrisitingarlógini, eins og virksemi biskups er fevnt, í tann mun tað er liður í fyrisitingarligari málsviðgerð, eru eitt nú kirkjuráðini ikki partar av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum. Tí er neyðugt at áseta hetta staðiliga, tá ætlanin er, at meginreglur, sum galda fyrisitingina, eisini skulu galda fyri virksemið hjá innankirkjuligu kirkjumyndugleikunum.
Annar, fjórði, fimti og áttandi kapitul í fyrisitingarlógini eru um ógegni, skjalainnlit partanna, partshoyring og tagnarskyldu v.m., og tað er ein trygd fyri bæði umsøkjarar og tey viðgerandi, at vita, at hesar meginreglur galda.
Einki endamál er hinvegin í at lata ásetingarnar í triðja kapitli um vegleiðing og umboðan v.m. og ásetingarnar í sjeynda kapitli um kæruvegleiðing galda fyri innankirkjuligu kirkjumyndugleikarnar, og skotið verður upp at áseta staðiliga í § 12, stk. 1, at kirkjuráðini ikki skulu grundgeva fyri tilmæli um sóknarprest, so tí er heldur ikki viðkomandi at lata sætta kapitul um grundgeving v.m. galda her. Víst verður annars til serstøku viðmerkingarnar til § 12.

Stk. 2
Ásetingin er leysliga myndað eftir § 9 í galdandi donsku lógini um Folketingets Ombudsmand. Ikki ber til at ímynda sær ein fyrisitingarligan kærumyndugleika, ið tekur innihaldsliga støðu til hirðaligu avgerðir biskups, uttan at hesin samstundis hevði fingið eitthvørt avbrigdi av erkibiskupsmyndugleika. Tí er mest hóskiligt, at niðurstøður biskups í slíkum førum ikki kunnu verða eftirmettar fyrisitingarliga.
Við uppskotnu orðingini "*i tann mun* tær ikki beinleiðis ella óbeinleiðis eru um læru og boðan fólkakirkjunnar" er eisini ætlanin at tryggja, at eisini partar av avgerðum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru um læru og boðan fólkakirkjunnar, kunnu verða viðgjørdir sum kærumál, til dømis í tann mun til ber at eyðmerkja partar av málsviðgerðini ella metingargrundarlagnum, sum í størstan mun eru um roynverulig viðurskifti, ella um fyrisitingarrættarlig krøv, so sum líkskaparreglu, lutfalsreglu, mannarættindagrundað rættindi og krav um grundgeving.
Ásetingin ber heldur ikki í sær, at biskupur trúarlæruliga ger, sum honum lystir. Biskupur er eisini bundin av lærugrundarlagi fólkakirkjunnar, og tann, sum metir, at orsøk er til at stúra fyri, at biskupur setir læru fólkakirkjunnar til viks – hvørt tað so skuldi verið, tí at hann fer útum hana ella treingir hana – kann eftir § 18, stk. 2 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum leggja kæru hesum vv. fyri landsstýrismannin, og landsstýrismaðurin tryggjar tá, at stig verða tikin, eftir somu mannagongdum, sum um talan hevði verið um lærumál viðvíkjandi sóknarpresti.

**Um § 36**
Ásetingin í fyrra punktum er vanlig áseting um gildiskomu, krevur ikki serstakar viðmerkingar.
Í seinna punktum verður skotið upp at útseta gildiskomuna fyri § 2, stk. 1 til 1. januar 2014.
Henda ásetingin er førleikakravið um, at sóknarprestur umframt gudfrøðiútbúgving og prestlæru skal hava tikið lært nám í føroyskari kirkjusøgu -skipan, -siðum og embætisførslu, sum galda í fólkakirkjuni í Føroyum. Neyðugt er at geva myndugleikunum eitt skotbrá at skipa lesturin, áðrenn til ber at lúka kravið.

Stk. 2
Løgskipanir, ið skotið verður upp at seta úr gildi.
*Um nummar 1)*
Hetta er løgskipanin, sum lógaruppskotið fyrst og fremst kemur í staðin fyri. Greitt verður frá broytingum í sambandi við hvørja áseting sær. Víst verður eisini til fylgiskjal nr 3, har greitt verður frá, fyri hvørja einstaka áseting sær í galdandi løgskipanin, hvar samsvarandi áseting er at finna í lógaruppskotinum, ella hví samsvarandi áseting ikki verður skotin upp.

*Um nummar 2)*
Neyðugt er at strika ásetingina, hóast annars verður roynt at varðveita ásetingarnar í Norsku Lóg, tí hon ásetir, at próvhoyringin hjá biskupi er seint í setanartilgongdini, aftaná at prinsippavgerð er tikin um at seta viðkomandi í embæti, og beint undan vígslu. Við nýggju mannagongdini er staðin próvhoyring ikki longur fortreyt fyri at verða settur í embæti, men fyri at umsókn yvirhøvur kann verða tikin til viðgerðar í setanartilgongdini (uttan í serstøku tilgongdini eftir § 14, sbr. § 7, stk. 2). Við hesum verður tað ikki longur sjálvsagt, at ein, sum hevur staðið próvhoyringina, verður prestvígdur stutt seinni, og tí ber ikki til at varðveita ásetingina í Norsku Lóg.
Mett verður ikki, at siðvenjur, ið hava serstakt kirkjuligt virði, kunnu verða nervaðar av, at júst henda ásetingin í Norsku Lóg verður tikin av.

*Um nummar 3)*
Ásetingarnar um biskupsval eru fluttar mestsum púra óbroyttar yvir í §§ 23-27 í hesum lógaruppskoti, meðan ikki verður skotið upp at hava ásetingar um at loysa stiftsband, av tí at Føroyar er eittans stift.
Ásetingarnar um, at kirkjulið í fyrsta lagi eitt ár aftaná biskupsval kann loysa stiftsband, verða tí at taka av, uttan at samsvarandi reglur verða settar í gildi aftur. Ikki ber til at loysa stiftsband, tí at Føroyar er eitt stift við einum biskupi. Áseting sum umrødda hevði tí verið innantóm.
Henda heilt serstaka støðan, at eittans biskupsembæti er í fólkakirkjuni í Føroyum, áleggur biskupi eina serstaka skyldu. Kirkjufólk og sóknarprestar hava ikki annan biskup í kirkjuskipanini at venda sær til, ella meta støðu sína upp móti. Biskupur má tí í embætisførslu síni í staðin á serstakan hátt hava fyri eyga at verja og lívga breiddina í fólkakirkjuni.
Víst verður eisini til fylgiskjal nr 4, har greitt verður frá, fyri hvørja einstaka áseting sær í galdandi løgskipanin, hvar samsvarandi áseting er at finna í lógaruppskotinum, ella hví samsvarandi áseting ikki verður skotin upp.

*Um nummar 4)*
Dagførdar orðingar samsvarandi ásetingunum í hesi løgskipan eru skotnar upp í §16. Greitt verður frá broytingum í serstøku viðmerkingunum til hesa, og í almennu viðmerkingunum, partinum *Annar prestur*.

*Um nummar 5)* Skotið verður upp at strika ásetingina, tí hon er óneyðug: Evangelisk luthersk fríkirkjulið eru ikki í Føroyum, og tað verður eftir vanligum meginreglum fyri starvsfólkaleiðslu upp til sóknarprest og biskup at finna fram til, í hvørjum ítøkiligum førum tað er sambæriligt við embætið, at sóknarprestur virkar við í gudstænastu hjá øðrum trúarsamfelag.

*Um nummar 6)*
Løgskipanin, sum skotið verður upp at taka av, tryggjar í fólkakirkjuni í Danmark, at kirkjulið og sóknarprestur kunnu koma undir umsjón hjá øðrum biskupi, til tess at skapa betri rúmd fyri samstarvi innan karmar fólkakirkjunnar, hóast átrúnaðarliga grundaðar ósemjur innan lærugrundarlagið.
Føroyar er eitt stift við einum biskupi. Tí er hesin møguleikin ikki til, og skipanin – ið ikki hevur verið nýtt í verki her – noyðist at verða tikin av.

*Um nummar 7)*
Løgskipanin er í roynd og veru farin úr gildi, og skuldi av røttum verið tikin av í 2007 við lógini um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar.

Stk. 3
Við ásetingini verða nýggju førleikakrøvini og broytta setanartilgongdin eisini at galda embæti, ið eru lýst leys, tá lógin kemur í gildi.
Nýggju førleikakrøvini gera tað lættari hjá gudfrøðingum av norsku og íslendsku gudfrøðideildunum, ið ætlanin er at góðkenna sum beinleiðis førleikagevandi. Einans kravið um latínførleikar kemur at standa eftir sum ein eyka avbjóðing hjá gudfrøðingum av norsku og íslendsku gudfrøðideildunum. Samsvarandi krav verður altíð sett í dag, meðan nýggju krøvini, sum verða at galda í 2013, ikki hækka gáttina fyri nøkrum. Hetta tí at §2, stk. 1 ikki kemur at galda fyrr enn í 2014.
Formliga ber helst til at siga, at kravið í § 2, stk. 2 er ein nýggj forðing, men í roynd og veru er serstakliga lítil møguleiki fyri, at kirkjuráðini kunnu hugsast at mæla til at seta umsøkjara, ið ikki hevur kunnleika til føroyskt.

Stk. 4
Broytingin er fylgja av uppskotinum um broytt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum kirkjuráð, Stiftsstjórn og Próstadømisráð í §§ 29-32.
Galdandi orðing í § 18, stk. 2 í lógini um kirkjuráð og próstadømisráð er "*Kirkjuráðið ger tilráðing til leys prestastørv og tilnevnir/setir kirkjutænarar og hjálparfólk hjá kirkjuni.*". Hetta verður eftir uppskotinum broytt til "*Kirkjuráðið ger tilráðing til leys prestastørv og tilnevnir kirkjutænarar og hjálparfólk hjá kirkjuni.*"

**Kunngerð um sóknarprestaembæti**

Við heimild í § 3, stk. 1 og 2, § 1, stk. 6......... og ........ í løgtingslóg nr. XX frá DD  MM 2012 um embæti í fólkakirkjuni verður ásett:

**§ 1.** Kravdar lærugreinar, sbr. § 1, stk. 2 í lógini eru:

4) Amboðslærugreinar:
   a. Latín, í minsta lagi 30 ECTS námsstig, ella hástig A av miðnámsútbúgving
   b. Hebraiskt, í minsta lagi 10 ECTS námsstig
   c. Grikst, í minsta lagi 20 ECTS námsstig
   d. Vísindaástøði, heimspeki, í minsta lagi 20 ECTS námsstig
5) Klassiskar gudfrøðilærugreinar, til samans í minsta lagi 150 ECTS námsstig, tó kortini:
   a. Gamla testamenti í minsta lagi 10 ECTS námsstig
   b. Nýggja testamenti í minsta lagi 25 ECTS námsstig
   c. Trúarlæra, harundir luthersku játtanarritini, í minsta lagi 15 ECTS námsstig
   d. Siðalæra og trúarheimspeki í minsta lagi 15 ECTS námsstig
   e. Kirkjusøga við nøktandi denti á lutherska kirkjusøgu, í minsta lagi 20 ECTS námsstig
   f. Praktisk gudfrøði í minsta lagi 15 ECTS námsstig

**§ 2.** Hesar gudfrøðiútbúgvingar á, ið hvussu so er, 300 ECTS námsstig tilsamans, av lærdum háskúlum í Danmark, Íslandi og Noregi verða, treytað av, at viðkomandi gudfrøðingur hevur í minsta lagi 30 ECTS námsstig, ella hástig A av miðnámsútbúgving í latíni, viðurkendar sum førleikaveitandi til sóknarprestaembæti, ið verða viðurkendar at geva førleika til at søkja sóknarprestaembæti uttan viðgerð í nevndini eftir § 4 í lógini:

1. Teologisk Fakultet, Københavns Universitetet
2. Teologisk Fakultet, Aarhus Universitetet
3. Teologisk Fakultet, Oslo Universitetet
4. Det teologiske Menighetsfakultet, Oslo
5. Misjonshøgskolen, Stavanger
6. Guðfræði- og trúarbragðafræðideild Háskóla Íslands

*Stk. 2.* Somuleiðis verða góðkendar útbúgvingar, sum avvarðandi myndugleiki hevur javnvirðismett við nevndu útbúgvingar.

**§ 3.** Tey fyrstu fimm árini í føstum starvi skal sóknarprestur sum eftirútbúgving taka lut í 4 serskeiðum, eftir fyriskipan biskups. Hetta kann til dømis vera á kirkjuligum eftirútbúgvingarskeiðum í Føroyum, ella á kirkjuligum útbúgvingar- og eftirútbúgvingarskeiðum í øðrum londum.

......

**§ Ω.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og geldur eisini fyri embæti, ið eru lýst leys, tá kunngerðin kemur í gildi.

Mentamálaráðið, 4. oktobur 2012

**Bjørn Kallsø (sign.)**

Landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)